# Ársfrágreiðing og ársroknskapur 2011



NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
541 705

**Ársfrágreiðing og Ársroknskapur 2011**
Ársaðalfundur 27. apríl 2012
Myndir: SEV og onnur
Forsíðumynd: Útbyggingin av Eiðisverkinum

Umbróting, prent og liðuggerð: Føroyaprent

# Innihaldsyvirlit

**Frágreiðing frá nevndini** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **2**

Árið, ið fór . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **5**
Formansskifti í SEV . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 6
Venjing í basing av oljudálking . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7
Nýggj koplingarstøð byggjast í Vestmanna . . . . . . . . . 8
Eitt miðal ár til varandi elorku . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9
Fyrsta elbilaráðstevnan í Føroyum . . . . . . . . . . . . . . . . . 10
Umvælingar og viðlíkahald . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 11
Ódnarveðrið á vetri 2011/2012 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 13
Hugtiknir av grønu útbyggingunum hjá SEV . . . . . . . . . 14
Í starvsvenjing hjá SEV . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 15
Eiðisverkið fingið triðju turbinuna . . . . . . . . . . . . . . . . . 16
Eitt fjølbroytt ár hjá orkuráðgevingini . . . . . . . . . . . . . . 17
Heilsa, trygd og umhvørvi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 18
Nýggjar vindmyllur bílagdar frá Enercon . . . . . . . . . . . . 21
Starvsfólkahópurin hjá SEV . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22
Vaktarskifti í fyrisitingini hjá SEV . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
Lýsing av bygnaðinum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 25
Býtisvirkini . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 26
Elframleiðslan frá vatnorkuni fyri alt landið
– elverksøkir 2011 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27
Íløgur 1997-2011 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27
Maskinyvirlit 31. desember 2011 . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28
Avroknað elsøla . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28
Oljunýtslan í tonsum frá 1988 til 2011 . . . . . . . . . . . . . 29
Størsti eftirspurningur og installeraður máttur
– meginøkið frá 1954 til 2011 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 29
Elframleiðslan fyri alt landið frá 1954 til 2011 . . . . . . 30
Elframleiðslan í Suðuroy frá 1940 til 2011 . . . . . . . . . 30
Elframleiðslan fyri alt landið – elverksøkir 2011 . . . . . 31
Elframleiðsla fyri hvønn íbúgva í Føroyum
1970-2011 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31
Døgnlastin fyri meginøkið mikudagin 5. okt 2011 . . . 32
Leypandi 12 mánaða framleiðsla fyri alt landið
frá 1985 til 2011 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 32

**Ársfrágreiðing**
**& ársroknskapur 2011** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **33**

Upplýsingar um felagið v.m. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 34
Leiðsluátekning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 35
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . . . . . . . . . . 36
Høvuðs- og lyklatøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 37
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 39
Rakstrarroknskapur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 44
Fíggjarstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 45
Peningastreymsuppgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 47
Virkisbýti, framleiðsla og net . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 48
Rakstrarbýti framleiðsla og net . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 50
Nýttur roknskaparháttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 51
Notur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 54

**Framleiðsluroknskapur 2011** . . . . . . . . . . . . . . . **61**

Upplýsingar um felagið v.m. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 62
Leiðsluátekning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 62
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . . . . . . . . . . 64
Høvuðs- og lyklatøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 65
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 67
Rakstrarroknskapur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 71
Fíggjarstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 72
Kapitalfrágreiðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 74
Nýttur roknskaparháttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 75
Notur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 77

**Netroknskapur 2011** . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . **83**

Upplýsingar um felagið v.m. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 84
Leiðsluátekning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 84
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . . . . . . . . . . 86
Høvuðs- og lyklatøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 87
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 89
Rakstrarroknskapur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 93
Fíggjarstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 94
Peningastreymsuppgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 96
Nýttur roknskaparháttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 97
Notur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 100

# Frágreiðing frá nevndini

Nevndin hevur skipað seg av nýggjum. Formaðurin seinasta skeiðið Páll á Reynatúgvu bleiv tann 29. oktober 2011 valdur á Føroya Løgting, og hann segði tí formanssessin frá sær. Samstundis tók Bødvar Hjartvarsson sætið í nevndini umboðandi Sandoyar sýslu, og Niclas Hentze hevur umboðað Suðuroynna síðani seinasta aðalfund, tá ið Niels Olaf Eyvindsson tók seg úr nevndini.
Nýggjur formaður er Jákup Suni Lauritsen, ið frammanundan sat sum næstformaður. Nýggjur næstformaður er Kári E. Jacobsen.

## Útbyggingar við varandi orku

Eiði 2 verkætlanin gongur sína gongd. Borað verður framhaldandi suður ímóti Blásenda á Selatrað. Samlaða longdin er 8,3 km, og farið er nú um tann 5'ta. Tilfarið, sum nú er syllugrót, er harðari at bora í, tí er framdriftin nakað væl minni, enn tá ið byrjað varð. Upprunaliga tíðarætlanin ásetur, at tunnilin skal takast í rakstur á vári 2013, tó verður tíðarætlanin endurskoðað í løtuni. Eisini stendur Eiðisverkið fyri stórari víðkan og broytingum. Triðja turbinan er uppsett, og stórar dagføringar verða gjørdar av hinum báðum turbinunum og øllum installatiónunum á verkinum. Hædd er m.a. tikin fyri automatikki og skjótum reguleringum. Hetta hjálpir um tað samspæl, sum skal til millum framleiðslueindirnar, tá ið meira vindorka kemur inn á elkervið.

Ein roynd varð gjørd at fáa loyvi frá Sjóvar kommunu til at fáa áirnar kring Selatraðar bygd við til elframleiðslu. Hetta var gjørt samsvarandi samtykt hjá umboðsnevnd felagsins í 2003, og loyvi fyriliggur eisini frá Yvirfriðingarnevndini, men Sjóvar kommuna vildi ikki ganga umsóknini á møti. Vit virða sjálvandi avgerð teirra og tey sjónarmið, sum fólk á Selatrað framførdu, men henda meirútbyggingin hevði munað um grøna orkupartin, og útbyggingarkostnaðurin hevði verið sera lágur.

SEV vann fyrsta vindútboðið, sum Elveitingareftirlitið framdi samsvarandi nýggju elveitingarlógini. Henda avgerðin hjá eftirlitinum bleiv kærd, og myndugleikin hevur tí bíðað við at geva elfelagnum framleiðsluloyvið. Avgerð fall í kærunevndini tann 13. februar 2012, sum staðfesti avgerðina hjá eftirlitinum. Harvið eru nú øll loyvi tøk til uppsetan av teimum trimum vindmyllunum á Eystnesi, og sáttmáli er eisini gjørdur við Enercon um keyp av trimum myllum til uppsetingar í august mánaði 2012. Farið er eisini undir fyrireikingarnar til at gera veg, fundamenti og elsambandið klár.

Í ódnarveðrinum veturin 2011/2012 fingu allar tríggjar vindmyllurnar í Neshaga skaða, tvær teirra gjørdust vrak. Kannað og viðgjørt verður í løtuni møguligt keyp av tveimum nýggjum 900 kW vindmyllum frá Enercon í staðin fyri tær tríggjar 660 kW frá Vestas.

Felagið hevur í meira enn eitt ár havt drúgvar samráðingar við Sp/f Røkt um samstarv innan pumpuskipan á vatnorkuverkið í Vestmanna. Úrslitið av samráðingunum er ein „letter of intent" um samstarv, sum partarnir tó ikki hava undirskrivað enn.

Fyri stuttum sendi felagið út skriv um verkætlan við stórari vindmyllulund í Suðurstreymoy, sum SEV bjóðar seg til at byggja og menna til ta føroysku elskipanina. Við eini 10 MW vindmyllulund ber til at spara 10.000 tons av olju árliga, men hetta er ein sera stór teknisk avbjóðing fyri elskipanina, og tí skal nógv gransking og menning til fyri at fáa hetta at rigga. Tankin um slíka útbygging bleiv sum heild jaliga móttikin, men myndugleikarnir eru av tí fatan, at framferðarhátturin við fyrst at uppseta og menna lundina, fyri síðani at bjóða myllurnar út til sølu, ikki rúmast innan fyri verandi elveitingarlóg. Tí er ikki meira gjørt burtur úr verkætlanini.

Fylgt verður væl við, hvat ið hendir á økinum innan útbygging við sjóvarfalsorku. Í november 2011 luttók felagið saman við Knud Simonsen á seminari uttanlands, har nógvir framleiðarar greiddu frá sjóvarfalsmyllum, og tí menning og teimum royndum, ið verða gjørdar í løtuni. Felagið hevur samband við nakrar av hesum veitarum, og roynt verður at skapa áhuga teirra millum fyri at fáa teir at koma til Føroya at royna útgerð sína her.

P/F Fjarhitafelagið, sum SEV eigur 50% av, arbeiðir enn við byggiætlanini við einari tiltaksveitingarstøð inni á Gøtu í Hoyvík. Fjarhitafelagið og SEV hava staðfest og formaliserað samstarvið um hølir á Sundi og hitaveitingina í skrivligum sáttmálum.

## Heildarætlanin hjá Vinnumálaráðnum

Í august mánaði 2011 gav Vinnumálaráðið út eina frágreiðing nevnd „Heildarætlan fyri elorkuøkið í Føroyum". Nýggja samgongan leggur hetta skjal til grund fyri politikk sín sambært samgonguskjali teirra. Frágreiðingin fevnir víða og kemur við uppleggi til stórar broytingar á økinum.

SEV fekk møguleikan at gera viðmerkingar til frágreiðingina. Orsakað av útskriving av bæði fólkatings- og løgtingsvali kom hetta í drag, men viðmerkingar blivu latnar Vinnumálaráðnum tann 17. februar 2012.

Síðani hevur arbeiðsbólkurin, sum orðaði viðmerkingar, eisini verið á fundi í Vinnumálaráðnum at umrøða, hvussu arbeiðast kann frameftir í tøttum og góðum samstarvi partanna millum.

## Búskaparstøða felagsins

Oljan er framhaldandi nógv tann størsta einstaka útreiðslan hjá SEV. Í 2011 brúktu vit olju fyri 142,6 mió.



*Nevndin í SEV. Aftast f.v.: Bødvar Hjartvarsson, Marin Katrina Frýdal, Niclas Hentze og Steinbjørn O. Jacobsen. Fremst f.v.: Kári E. Jacobsen, Jákup Suni Lauritsen og Pauli T. Petersen.*

kr. Hetta eru 25,3 mió. kr. meira enn ásett í fíggjarætlanini. Hetta er næstan líka nógv sum restin av øllum rakstrinum, sum kostaði 152,8 mió. kr., har framleiðslan er 90,8 mió. kr., netparturin 35,5 mió. kr. og umsitingin 26,5 mió. kr.

Neyðugt hevur verið við munandi lántøku í 2011. Lánskuldin bleiv økt við 100 mió. kr. og einum kassakreditti uppá 30 mió. kr.

Fyri at føla seg tryggan viðvíkjandi gjaldførinum, verður mett, at tað skal bera til at gjalda fyri eina oljuveiting og hava so mikið afturat, at til ber at keypa ein týðandi maskinlut, um ein slíkur gongur fyri.

Viðvíkjandi mannagongdum innan tekning av tryggingum, verður hon endurskoðað í løtuni. Við tað at búskaparliga styrkin hjá SEV er minkað, er eisini neyðugt at minka um váðan í sambandi við skaðar og líknandi, sum kann tyngja um búskapin.

Nevndin arbeiðir í løtuni við dagføringum av starvsskipanini fyri nevndina og reglugerðini fyri viðurskifti millum nevnd, stjóra, deildarstjórar og rakstrarleiðara í SEV. Herðsla verður m.a løgd á at skerpa avrikini innan fíggjar-, tryggingar- og htu-viðurskiftini (heilsa, trygd og umhvørvi) í felagnum.

„Benchmark" kanning verður gjørd í løtuni. Vit samstarva við óheftar serfrøðingar frá útlendskari ráðgevingarfyritøku. Umframt, at hesir kunnu hjálpa til við framleiðslu av samanberingartølum frá líknandi

elskipanum sum okkara, fáa vit eisini staðfest lyklatøl, sum vit kunnu brúka til at stýra gongdini í felagnum við. Miðað verður eftir, at uppgávan er loyst beint eftir summarfrítíðina í ár.

Annað árið á rað kemur SEV út við metstórum halli, fyri 2011 gjørdist hetta 49,44 mió. kr. Hetta er ikki nøktandi, og gongdin má vendast, um vit skulu varðveita kredittvirðið, og hetta var eisini útgangsstøðan hjá nevndini, tá ið fíggjarætlanin bleiv gjørd fyri 2012.

Á aðalfundinum legði nevndin fram fíggjarætlan fyri 2012, sum hevði eitt yvirskot uppá 1,3 mió. kr. og innihelt eina príshækking uppá 0,15 kr./kWt áðrenn MVG. Men eigararnir samtyktu, at elprísurin skuldi hækka við 0,10 kr/kWt áðrenn MVG, og at felagið, umframt eina sparing uppá 5 mió. kr., sum nevndin hevði ásett, skuldi spara 5 mió. kr. afturat. Samtykta fíggjarætlanin fyri 2012 vísir sostatt eitt hall uppá 6,3 mió. kr. Nevnda spariætlan uppá 10 mió. kr. er framd, og hetta hevur m.a. viðført, at 9 fólk eru givin í starvi hjá felagnum. Eisini steðgar felagið við at hava skrivstovur opnar fyri kundamóttøku í Klaksvík og í Vestmanna.

Nevndin er framhaldandi av tí fatan, at felagið frameftir í minsta lagi eigur at hava javnvág í rakstrinum.

## Samskifti við eigararnar

Felagið hevur farna árið og frameftir havt eitt opið og tætt samskifti við eigararnar. Umboð fyri kommunurnar hava verið boðin til fundar 6 ferðir at hoyra um varandi orku- og útbyggingarmøguleikar og annars at umrøða framtíðina hjá felagnum. Fyrsti fundurin var í Tórshavn tann 23. februar 2011, tá ið framlagdir blivu nakrir útbyggingarmøguleikar. Næsti fundur var aftur í Tórshavn tann 30. mars 2011, tá ið útbyggingarmøguleikarnir blivu umrøddir. Triði fundurin var 26. august 2011 í Løkshøll í Runavík. Á tí fundinum blivu einstøku útbyggingarmøguleikarnir lýstir frá búskaparligum, tekniskum og umhvørvisligum sjónarhornum.

Í november 2011 hava aftur tveir fundir verið í Tórshavn, annar tann 17. og hin tann 29. Báðir fundirnir hava viðgjørt heildarætlanina frá Vinnumálaráðnum, útbyggingarmøguleikar felagsins og fíggjarætlan felagsins fyri 2012. Í februar 2012 var so aftur fundur, har niðurstøður og svar blivu viðgjørd viðvíkjandi hoyringarsvari til Vinnumálaráðið um heildarætlanina.

Nevndin metir, at sum heild hava fundirnir verið góðir og upplýsandi, og at eigararnir eru nøgdir við nevndarfundarvirksemi.

## Starvsfólk

Tann 1. juli 2011 tók Bogi Bendtsen við sum deildarstjóri innan fyrisitingina. Hetta tí at John P. Danielsen sum hevur røkt hetta starv í 25 ár, valdi at gevast. Móttøka var á skrivstovuni í Tórshavn í hesum sambandi. Sera nógv fólk vitjaðu okkum fyri at heilsa upp á farandi og komandi deildarstjórarnar.

Felagið hevur broytt mannagongd fyri fráfaringaraldur hjá teimum starvsettu. Fráfaringaraldurin, ið var 70 ár, varð broyttur til 67 ár við virknaði frá 1. oktober 2011.

## Rakstur felagsins

Høvuðsumvæling av turbinu og generatori á Heygaverkinum í Vestmanna er gjørd. Verkið lá stilt í tíðarskeiðinum mai til desember 2011.

Oljuriknu verkini á Sundi og í Vági bera enn ta tyngstu uppgávuna í føroysku elskipanini. Rakstrartímarnir á motorunum á hesum báðum verkunum eru nú so nógvir, at tíð og peningur verður settur av til at skaffa avloysarar fyri hesar. Sannast má, at vit enn verða munandi heft at oljuni eina tíð afturat, sjálvt um vit byggja út sum mest við mátti frá varandi orkukeldum.

Ikki alt kann ráðleggjast, óvæntaðar hendingar koma meira enn so fyri. Hetta sóu vit ikki minst, tá ið ódnin Berit herjaði náttina millum 24. og 25. november 2011. Vindmátingar okkara frá mátimastur í Húsahaganum í Tórshavn vístu, at mesta miðalferðin yvir 10 minuttir var 48 m/s, og mesti hvirluvindurin yvir 2 sekund var 68 m/s. At veita streym hesa náttina gekk væl. Tað vóru bara hendinga økir, sum høvdu streymloysi í meira enn ein tíma, hetta hóast vit vóru fyri fleiri óhappum. Av størri skaðum kann nevnast, at sjógvur kom inn í Eiðisverkið, tríggir reaktorspolar í Skálabotni brunnu, og tekjan á Fossáverkinum í Vestmanna reiv.

Um samanborið verður við jólaódnina í 1988, kom SEV mest sum snikkaleyst í gjøgnum hesa ferð. Tann miðvísa kaðalleggingin, sum tá varð sett í verk, gevur nú góð úrslit.

Verri hevur gingið í byrjanini av nýggja árinum 2012. Tann 9. januar fekk ein Vestas mylla í Neshaga stóran stormskaða, tá ið narcellan við øllum tólútbúnaðinum og veingjunum datt niður. Líknandi óhapp hendi aftur tann 6. mars, tá ið tornið á einari aðrari myllu gekk fyri, og øll myllan datt niður. Serfrøðingar frá Vestas og tryggingarfelagnum kanna skaðarnar. Arbeitt verður við at fáa nýggjan myllumátt í rakstur aftur sum skjótast.

Jákup Suni Lauritsen,<br>nevndarformaður<br>apríl 2012

# Árið, ið fór



# Formansskifti í SEV



Jákup Suni Lauritsen, nývaldur formaður í SEV, handar fráfarandi formanninum, Páll á Reynatúgvu, eina serstaka tjaldursútgávu í fráfaringargávu frá nevndini.

Í november 2011 skipaði nevndin í SEV seg av nýggjum, eftir at formaðurin síðani februar 2009, Páll á Reynatúgvu, noyddist at leggja frá sær eftir at vera valdur á Føroya Løgting.

Sambært stýrisskipanarlógini kann ein løgtingslimur ikki sita í nevndum og ráðum, sum løgtingið hevur eftirlit við, og hesar treytir koma SEV-nevndarlimir undir.

Á nevndarfundi 14. november 2011 legði Páll á Reynatúgvu formliga frá sær sum formaður og nevndarlimur. Inn fyri hann kom Bødvar Hjartvarsson sum eykaumboð fyri Sandoyar sýslu.

Nevndin skipaði seg av nýggjum við Jákupi Suna Lauritsen sum formanni og Kára E. Jacobsen sum næstformanni.

Teir báðir eru valdir í nevndina fyri ávikavist Vágoy og Eysturoy. Jákup Suni Lauritsen var næstformaður frammanundan.

Hinir fimm limirnir í nevndini eru Marin Katrina Frýdal fyri Tórshavnar kommunu, Steinbjørn O. Jacobsen fyri Norðoyggjar, Niclas Hentze fyri Suðuroy (avloysti summarið 2011 Niels Olaf Eyvindsson), Pauli T. Petersen fyri Norðstreymoy og Bødvar Hjartvarsson fyri Sandoyar sýslu.

# Venjing í basing av oljudálking

Fyrst í oktober 2011 varð skipað fyri stórari venjing í basing av oljudálking á Sundi.

Tórshavnar Sløkkilið, Landsverk og SEV stóðu á odda fyri venjingini, sum eisini fleiri aðrir stovnar tóku virknan lut í ella eygleiddu.

Millum hesi vóru oljufeløgini Magn og Effo, Sjóbjargingarstøðin MRCC Tórshavn, Umhvørvisstovan, Fiskiveiðieftirlitið, Skálafjarðar Sløkkilið, Fuglafjarðar Sløkkilið, bjargingarbáturin Lív og Tórshavnar havn.

Nýggja umhvørvisleiðsluskipanin á Sundsverkinum krevur, at skipað verður regluliga fyri tílíkum venjingum.

„Í sambandi við at Landsverk 1. januar 2011 yvirtók ábyrgdina av at basa oljudálkingum á sjónum uttan fyri kommunalar havnir og tískil eisini hevur brúk fyri tílíkum venjingum, gjørdu vit av í felag at skipa fyri hesi venjingini“, greiðir Annika F. Berg, htuleiðari hjá SEV, frá.

Venjingin tók støði í einum hugsaðum leka á einum røri, tá ið tungolja varð pumpað av skipi niðan í ein tanga á Sundsverkinum.

Eftirsum talan var um venjing, vórðu ístaðin fyri veruliga olju, børkuflísar koyrdar á sjógv, sum ikki eru dálkandi fyri náttúruna.

Tað gekst væl at skipa arbeiðið, tí longu ein tíma eftir, at alarmurin fór í gongd, var bjargingarbáturin Lív á staðnum og sleipaði eina oljusperring av bryggjuni á Sundi fram við landinum norðureftir, har „oljan“ rak.

„Venjingin eydnaðist so mikið væl, at allir partar vóru samdir um at halda fram við samstarvinum, umhvørvisverndini at gagni“, sigur Annika F. Berg.



Sløkkiliðsmenn úr trimum sløkkiliðum vóru við í venjingini


Luttakarar á venjingini lýða á, meðan greitt verður frá, hvussu farast skal fram

Lív leggur oljusperring út





# Nýggj koplingarstøð

## byggjast í Vestmanna

Gamla koplingarstøðin hjá SEV á Válinum krevur so nógvar ábøtur, at felagið ístaðin fyri at umvæla hana hevur avgjørt at byggja nýggja koplingarstøð Inni á Fjørð í Vestmanna.

Í hesum sambandi skrivaði SEV í 2011 út kapping millum tríggjar innbodnar arkitektafyritøkur um at gera uppskot til nýggja koplingarstøð umframt umvælingar av Fossáverkinum, soleiðis at nýggja koplingarstøðin og gamla Fossáverkið í felag vórðu ein væl skipað estetisk heild.

Arkitektafyritøkurnar vóru Selmar Nielsen Arkitektur Sp/f, Árni Winther Arkitektar og Arkitektar AF, v/Albert Isfeld & Gudmund S. Hansen.

Tilboðini vórðu latin upp á høvuðsskrivstovuni hjá SEV tann 17. oktober 2011, og ein dómsnevnd varð sett at viðgera og taka støðu til uppskotini.

Í dómsnevndini sótu Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður, Hákun Djurhuus, stjóri, Finn Jakobsen, deildarstjóri, Høgni Hansen, verkfrøðingur, Karl A. Olsen, borgarstjóri í Vestmanna kommunu, og Mikael Viderø, býararkitektur í Tórshavnar kommunu. Skrivari hjá nevndini var Ragnar Heinesen, byggiverkfrøðingur á Landsbyggifelagnum.

### Árni Winther Arkitektar vann

Á fundi fyri jól gjørdi nevndin av at taka av uppskotinum hjá Árna Winther Arkitektum.

Í grundgevingini verður m.a. sagt, at „uppskotið er væleydnað og byggilistarliga ein sera góð loysn fyri byggiharran, sum við hesum - á fyrimyndarligan hátt - hevur fingið svarað teimum ynskjum, hann hevur sett fram, og samstundis fingið íblástur til fleiri ynskir og ætlanir í økinum og sín samleika".

Víðari verður sagt, at „uppskotið er hugsað sum ein einføld og greið loysn, sum í samanspælinum millum verandi og nýtt megnar at siga frá søguni og tonkunum hjá byggiharranum um egið virksemi og visiónir. Ein útsøgn um stabilitet, kontinuitet og samfelagsengagement við støði í einari funktionellari og rationellari tilgongd".

Nýggja koplingarstøðin við glaskubba á tekjuni verður bygd har, sum „gamla garasjan" Inni á Fjørð stendur, og sum sostatt verður tikin niður.

*Soleiðis ímyndar Árni Winther Arkitektar sær, at nýggja koplingarstøðin og Fossáverkið fara at taka seg út í fuglaperspektivi*

## Fossáverkið óbroytt

Fossáverkið varðveitir sína upprunaligu útsjónd.

Lagt er upp til, at kommunan ger heildarætlan fyri økið. Áarbakkin eystan fyri ósan kann hampast, og almenn gøta kann gerast millum brúgv og bátahyl. Goymsluøkið hjá SEV verður stikað, soleiðis at greiður skilnaður er á, hvat er fríøki, og hvat er orkuøki. Fram við gøtuni kunnu lág ljós verða uppsett.

Ætlanin er beinanvegin at fara undir at projektera nýggju koplingarstøðina og byggja hana í 2012 og 2013. Umvælingin av Fossáverkinum verður gjørd samstundis.

Tá ið arbeiðið er liðugt, verður verandi koplingarstøð á Válinum niðurløgd.



*Vinnarauppskotið*

# Eitt miðal ár til varandi elorku

2011 var eitt miðal ár til varandi elorku.

Meðan veðrið ávirkaði framleiðsluna úr varandi orku skeiva vegin í 2010, royndist 2011 munandi betri í so máta. Sambært almennu hagtølunum frá DMI regnaði tað í Tórshavn í 2010 1165 mm, meðan tað í 2011 regnaði 2262 mm. Miðalavfallið í Tórshavn seinastu 12 árini er 1423 mm.

Av samlaðu elframleiðsluni í 2011 upp á 273,8 miljónir kWt, komu sløk 40 prosent frá vatni og vindi ella stívliga 10 prosent meiri enn árið fyri, tá ið parturin frá varandi orkukeldum einans stóð fyri 29 prosentum.

Umframt at tað regnaði minni, var eingin framleiðsla á Fossáverkinum meginpartin av árinum vegna umvælingar og viðlíkahald.

Meðan elframleiðslan í 2010 vaks 1,7 prosent í mun til 2009 (til 280,4 mió. kWt), fall framleiðslan í 2011 við 2,3 prosentum orsaka av minni eftirspurningi.

Elframleiðslan 2011 við ávikavist vatn- og vindorku var 34 prosent og 6 prosent, meðan oljuriknu elverkini stóðu fyri restini.

*Vegna umvælingar á Fossáverkinum rennur Fossá sum í gomlum døgum*





# Fyrsta elbilaráðstevna

## í Føroyum

2011 var árið, tá ið elbilurin av álvara kom á breddan í Føroyum.

15. februar 2011 var Norðurlandahúsið karmur um ta fyrstu elbilaráðstevnuna í Føroyum, sum SEV saman við øðrum skipaði fyri.

Ráðstevnan var liður í eini norðurlendskari verkætlan í útnorðri undir heitinum El-mobility, hvørs endamál var at royndarkoyra elbilar á okkara breiddarstigum og meta um, hvussu økt nýtsla av elbilum fer at ávirka framtíðar ferðslu og ikki minst elnetið.

NORA (Norrønt Atlantssamstarv), ið er stovnur undir Norðurlandaráðnum við høvuðsskrivstovu í Havn, var høvuðsstuðul hjá verkætlanini, ið fevndi um øll trý útnorðurlondini Grønland, Ísland og Føroyar.

Sjey stovnar og orkufeløg í hesum trimum londunum vóru við í verkætlanini, sum byrjaði í 2010 og endaði á heysti 2011. Ein felags frágreiðing um verkætlanina verður ætlandi løgd fyri Norðurlandaráðið á vári 2012.

SEV umboðaði Føroyar í verkætlanini og setti í hesum sambandi ein elbilabólk saman við Jarðfeingi, ið samskipaði arbeiðið í Føroyum.

Elfelagið útvegaði sær eisini tríggjar elbilar til royndirnar, og teir vórðu alt árið royndarkoyrdir kring landið bæði av leikum og lærdum.

Nærverkið, sum var millum mongu stovnarnar og fyritøkurnar, ið fingu høvi at royna bilarnar, hevur síðani ognað sær teir allar, og er sostatt fyrsti føroyski stovnur, ið hevur tikið hesar umhvørvisvinarligu bilar til sín.

*Einir 150 innbodnir luttakarar vóru á elbilaráðstevnuni í Norðurlandahúsinum*



*Finn Jakobsen, deildarstjóri fyri tøkni á SEV, Johan Dahl, landsstýrismaður og Jákup Sørensen, NORA*





Vatnrørini til Fossáverkið

# Umvælingar og viðlíkahald

Eins og í 2010 settu umvælingar og viðlíkahald eisini sín dám á virksemið hjá SEV í 2011.

Í 2010 og 2011 vórðu turbinur og generatorar á Fossáverkinum umvæld. Umvælingin var endaliga liðug mánaðarskiftið apríl-mai 2011, og verkið var tá í fullum rakstri aftur.

Tey bæði stóru rørini úr vatntunlinum í erva oman til Fossáverkið vórðu sandblást og málað í 2010. Seinast hetta arbeiðið varð gjørt var í 1986. Sambært norsku fyritøkuni, ið stóð fyri rørarbeiðinum, tryggjar henda umvælingin, at rørini frá ávikavist 1953 og 1955 halda eini 30-35 ár aftrat.

Í 2011 varð farið undir at fremja somu umvælingar á Heygaverkinum. Rørið oman til Heygaverkið var sandblást og málað og turbinan høvuðsumvæld. Heygaverkið varð tikið í rakstur aftur 16. desember 2011.

Grundað á dagføringar á Heygaverkinum og nýggjan útbúnað, er verkið nú betur ført fyri at luttaka í eini elskipan, har alsamt størri partur av orkuframleiðsluni stavar frá óstøðugari orku.

Í sambandi við elverkið á Strond er umvæling í gongd á rørleiðingini millum Svartadal og Strandadal. Hetta er fyrsta stig í eini størri umvælingarætlan fyri rørleiðingina, sum í fleiri tíðarskeiðum hevur ligið óvirkin.

Eisini kann nevnast, at á Sundsverkinum er ein sokallað „Slam Dewatering Unit“ tikin í nýtslu. Henda



*Elverkið á Strond*

eindin minkar samlaðu spilloljunøgdina frá Sundsverkinum munandi.

Harumframt hava elverkini í Fugloy og á Dímun fingið hvør sítt nýtt anlegg aftrat, soleiðis at tey nú hava ávikavist trý og tvey dieselanlegg.

## Linjurnar fækka í hvørjum

Arbeiðið við at endurnýggja 0,4, 10, 20 og 60 kV netið hevur hildið fram í 2011.

„0,4 kV linjustrekkini fara nú at fækkast“, sigur Jón Nielsen, leiðari á rakstrardeildini hjá SEV.

Aftur í ár hava vit tikið uml. 2 km av lágspenningslinjum burtur og lagt kaðalar ístaðin. Somuleiðis hava vit tikið uml. 20 km av 10 og 20 kV linjum burtur og lagt kaðalar ístaðin. Hesi arbeiði verða gjørd í tøttum samstarvi við myndugleikar, kommunur, Landsverk og Føroya Tele.

„Neyðugt hevur eisini verið at bygt 11 nýggjar 10 og 20 kV trafostøðir runt um í landinum. Hetta er gjørt fyri at styrkja netið á ávísum støðum. Eisini hevur verið neyðugt at skift nakrar av gomlu støðunum út, tí tær hava verið ótíðarhóskandi og niðurslitnar“, sigur Jón Nielsen.

Eisini 60 kV linjurnar verða skiftar út. Hetta eru tær linjurnar, ið knýta knútapunktini saman. Tey elstu strekkini vóru bygd í 60 árunum, og slit er farið at síggjast á mastrum o.ø. Tí varð farið undir at skifta partar av hesum linjustrekkjum út fyri nøkrum árum síðan. Eisini í ár eru 10 mastrar skiftar á strekkinum millum Vestmanna og 60 kV koplingarstøðina í Skálabotni.

Eins og undanfarnu árini er nógv gjørt við viðlíkahaldið av elnetinum til tess at tryggja eina støðuga streymveiting til brúkaran.

Hetta kom okkum til góðar í ódnarveðrinum í november og desember mánaði 2011. Vit høvdu bert smávegis brek á linjustrekkjunum um alt landið.

23 ferðir var órógv á háspenningskervinum í 2011. Hetta er lægsta tal av feilum, síðani rakstrardeildin hjá SEV fór undir at skráseta feilir á háspenningskervinum. Í 2010 vóru 27 feilir á háspenningskervinum.

Lækkandi talið av feilum skal síggjast í ljósinum av miðvísa viðlíkahaldsarbeiðinum seinastu árini.

*Luftlinjur verða avloystar av kaðalum undir jørð*





Nógvur sjógvur floymdi inn á Eiðisverkið í ódnarveðrinum 24. november 2011, men tíbetur hendi ikki stórvegis materiellur skaði

Vraklutir frá vindmylluni



# Ódnarveðrið á vetri 2011/2012

Bæði elverk og vindmyllur vórðu hart rakt av stormskaðum í 2011 og fyrst í 2012.

Í ódnarveðrinum í november 2011 fingu allar tríggjar Vestas myllurnar í Neshaga skaða, eins og nógvur sjógvur floymdi inn á Eiðisverkið og steðgaði framleiðsluni har í nakrar dagar. Eisini tók vindurin ein part av takinum á Fossáverkinum við sær. Í Skálabotni fingu tríggir reaktorspolar stóran skaða.

Í storminum jóladag fingu myllurnar í Neshaga aftur harða viðferð, ein teirra álvarsliga.

Ein av teimum trimum stóru vindmyllunum varð at kalla vrak í nógva vindinum mánakvøldið 9. januar 2012.

Myllan hevði staðið still síðani skaðan, hon fekk í ódnarveðrinum jóladag. Fólk frá vindmylluframleiðaranum høvdu júst verið í Føroyum og kannað skaðan. Samstundis tryggjaðu teir mylluna best møguligt fyri síðani at koma aftur at umvæla hana, tá ið eykalutirnir vóru tøkir.

Men í storminum áður nevnda mánakvøld, tá ið hvirlurnar vóru upp í 30-40 m/s, duttu bløð, rotorur og gir av mylluni og fóru fyri einki. Tornið varð standandi og fekk ikki stórvegis skaða. Tann 7. mars 2012 staðfestu vit, at enn ein vindmylla í Neshaga hevði fingið stóran skaða. Tornið á sunnastu mylluni var brotnað nakað niðan fyri miðjuna.

Kannað og viðgjørt verður í løtuni, hvørjar orsøkirnar vóru til skaðarnar, og møguligt keyp av tveimum nýggjum 900 kW frá Enercon ístaðin fyri tær tríggjar 660 kW vindmyllurnar frá Vestas.



*Umboð fyri SEV, Náttúruvísindadeildina, landsstýrið og grannaoyggjar okkara fyri sunnan avmyndað uttan fyri SEV-høvuðskrivstovuna í Havn 31. august 2011*

# Hugtikin av grønu útbyggingunum hjá SEV

Síðst í august 2011 vitjaðu umboð fyri bretsku grannaoyggjar okkara fyri sunnan saman við løgmanni á høvuðsskrivstovuni hjá SEV.

Hetta var í sambandi við toppfundin millum leiðararnar í Hetlandi, Orknoyggjunum, Hebridunum og Føroyum, sum varð hildin í Havn um hetta mundið.

Ørindi teirra á SEV vóru at fáa kunning um, hvørjar grønar orkuútbyggingar eru framdar í Føroyum gjøgnum árini, og hvørjar framtíðarætlanirnar eru á hesum øki.

Terji Nielsen, verkætlanarleiðari á SEV greiddi m.a. frá vatn- og vindorkuútbyggingunum higartil og útbyggingunum, ið liggja fyri framman m.a. í Neshaga og í Suðurstreymoy.

Gestirnir vórðu serliga hugtiknir av vindorkulundini, sum SEV hevur skotið upp at gera í Suðurstreymoy.

Bárður Niclasen, granskari, greiddi frá rannsóknunum, hann og Knud Simonsen, lektari og havfrøðingur á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, seinastu tvey árini hava gjørt av sjóvarfallinum kring Føroyar sum grundarlag fyri gagnnýtslu av sjóvarfalsorku.

Á hesum øki eru bretar komnir eitt sindur longri enn vit, og har verða í løtuni royndir gjørdar við ymsum framkomnum útbúnaði. SEV fylgir væl við í hesum royndunum í tøttum samstarvi við Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum.

*Gestir og vertir til borðs. Kaj Leo Johannesen, løgmaður, sat við borðendan*



# Í starvsvenjing hjá SEV

SEV hevur javnan næmingar úr Tekniska skúla, fólkaskúlanum o.ø. undirvísingarstovnum í starvsvenjing.

Umframt at fáa neyvt innlit í fjølbroytta virksemið hjá elfelagnum, sleppa næmingarnir eisini at taka eina hond í undir góðari og kønari leiðslu.

Vanliga varir starvsvenjingin í 14 dagar, og hesar báðar vikurnar sleppa næmingarnir at luttaka í virkseminum á fleiri deildum hjá SEV – innleggingardeildini, teknikkdeildini, maskindeildini og rakstrardeildini.

Innleggingardeildin hevur m.a. tilsetan av elinnleggingum og uppsetan av elmálarum kring landið um hendur.

Á teknikkdeildini taka tey sær av montering og programmering av stýringum á elverkunum og netinum.

Maskindeildin framleiðir el við olju, vatni og vindi og tekur sær harumframt av viðlíkahaldi av maskinum o.ø.

Rakstrardeildin hevur ábyrgdina av bygging og viðlíkahaldi av elnetinum um alt landið.

SIT-næmingar á Tekniska skúla í Havn eru at kalla á hvørjum ári í starvsvenjing hjá SEV.

Hetta er av stórum týdningi fyri teir, heldur Tummas Marni Joensen, deildarleiðari á maskindeildini á Tekniska skúla.

„Starvsvenjingin er týðandi liður í undirvísingini og víðari menningini hjá næmingunum.

Tað fellur lættari bæði hjá næmingum og lærarum í teknisku undirvísingini á skúlanum at kunna tosa og vísa til tað verkliga, tá ið næmingurin sjálvur hevur fingið seg royndan", sigur Tummas Marni Joensen.



*Leivur Petersen til arbeiðis á Sundsverkinum*



*Regin við Streym*



*Martin Mortensen og hinir tríggir eru allir SIT-arar á Tekniska skúla í Havn.*



*Sjúrður Samuelsen í gongd við at montera stýringina til nýggju magnetiseringsútgerðina til generator 1 á Fossáverkinum.*

# Eiðisverkið fingið triðju turbinuna

Í sambandi við Eiði 2 Suður verkætlanina, er Eiðisverkið útbygt til at kunna hýsa eini triðju turbinu.

Bæði turbina og generatorur komu til landið í desember 2011 og eru nú uppsett.

Miðað verður eftir at taka turbinuna í nýtslu í fyrru hálvu av 2012. Hereftir verður farið undir at umvæla og dagføra tær báðar gomlu turbinurnar.

Allar tríggjar turbinurnar skulu vera tøkar til elframleiðslu, tá ið Eiði 2 Suður verkætlanin er liðug í 2013.

Nýggja turbinan er eins og tær báðar gomlu av slagnum Voith. Hon er 7,7 MW, meðan hinar báðar eru 6,7 MW hvør. Tær skulu tó dagførast til sama mátt sum tann nýggja.

Sjálvur bygningurin er longdur 12 metrar norðureftir. Hesum arbeiðinum hevur byggifelagið MT Højgaard staðið fyri.

Tað gongst eitt sindur seinni enn ætlað við arbeiðinum upp á nýggja vatnsavningartunnilin frá Norðskála suður ímóti Selatrað – vanliga nevnd Eiði 2 Suður verkætlanin.

Harða tilfarið í fjallinum hevur darvað arbeiðinum, og neyðugt hevur verið at umvæla borimaskinuna nakrar ferðir í sambandi við skaðar, ið eru hendir undir boringini.

1. mars 2012 vóru umleið 5,5 km boraðir av tí 8,4 km langa tunlinum millum Skálá og Blásenda.

Eiði 2 Suður Samtakið, sum eru byggifeløgini MT Højgaard og J&K Petersen, stendur fyri arbeiðinum, sum sambært byggisáttmálanum skal vera liðugt á vári 2013.

Eiði 2 Suður verkætlanin fer at økja um vatnorkuframleiðsluna hjá Eiðisverkinum við umleið 16 mió. kWt. Verandi framleiðsla er umleið 40 mió. kWt um árið.

Útbyggingin av Eiðisverkinum og Eiði 2 verkætlanini kostar umleið 250 mió. kr. tilsamans.



*Ventilur og turbina 3 verða heysað upp á pláss*


*Borimaskinan á veg til arbeiðis*

# Eitt fjølbroytt ár

## hjá orkuráðgevingini



*Næmingar og starvsfólk av Rásini í Saltangará saman við orkuráðgevanum*

### Orkuráðgeving

Eitt av endamálunum við orkuráðgevingini hjá SEV er at gera føroyingin meira tilvitaðan um elorku, og hvussu henda kann nýtast skilabest. Hetta verður m.a. gjørt við, at øllum 9. flokkum stendur í boði at vitja SEV og fáa frálæru í elframleiðslu og sparing. Frálæran verður m.a. skipað við filmi, sum lýsir elóhapp, og hvørjar avleiðingar hetta kann hava við sær. Næmingarnir fáa eisini frálæru í, hvussu tey sjálv kunnu spara el heima við hús. Eisini luttaka tey í eini kondisúkklukapping, har kappast verður um, hvør flokkur klárar seg best at súkkla í kWh.

Í 2011 vitjaðu 32 flokkar við 667 næmingum í frálæruhølunum hjá SEV á Landavegnum í Havn. Henda frálæra byrjar í september og endar í mars mánaði. Vinnarin av súkklukappingini í 2011 var 9. b í skúlanum á Oyrarbakka.

Barnagarðar, frítíðarskúlar og bústovnar vitja eisini SEV fyri at nema sær betri vitan innan sparing á elorkuøkinum. Ein fastur táttur er vitjanin av heilsuskúlanum í Suðuroy.

Í sambandi við at nýggjar elrokningar verða sendar út fyrst í árinum, er nógv samskifti við brúkaran um, hvussu berast kann at við at spara elorku, men henda ráðgeving fer fram alt árið.

### Átakið „brúka minni“

SEV kennir sum sína ábyrgd at eggja Føroya fólki at brúka minni el, tí var farið undir spariátakið „brúka minni“ í 2011. Átakið vendi sær serliga til børn og ung við tí fyri eyga at minna tey á at sløkkja, tá ið tey eru liðug at brúka eltólini. Herrópið í átakinum var „Tendra tá tú ert, sløkk tá tú fert“. Heili 4.565 fólk meldaðu seg til kappingina gjøgnum heimasíðuna www.brukaminni.fo



*Frálæra á SEV*

Í sambandi við átakið varð skipað fyri kapping, sum endaði 23. februar 2012 við lutakasti millum mongu luttakararnar um góðar og vælumtóktar vinningar.

Høvuðsvinningurin var ein I-phone og ein I-pad. Annar vinningur var ein lágorkufrystiboks, og triði vinningur var ein pakki við 10 LED elperum. Hesi høvdu stuðlað átakinum við vinningum: P/F Føroya Tele, Húsarhaldstól á Hálsi og P/F LM-handilin.




*Kristiana Rein, orkuráðgevi*

# Heilsa, trygd og umhvørvi

## Trygdararbeiðið

Í 2011 hevur trygdarnevndin hjá SEV millum annað arbeitt við at fáa trygdarbólkarnar virknari. Dentur varð lagdur á arbeiði í vaktum, við millum annað at fáa Magnar Kleiven at greiða viðkomandi starvsfólkum frá um tey árin, sum kunnu vera í sambandi við hetta arbeiði, og hvat kann gerast fyri at minka um hesi árinini. Skipað hevur verið fyri kranaskeiði fyri starvsfólk á verkunum. Eisini hevur verið skipað fyri at fáa eftirlitið av kranum og trukkum í fasta legu.

Á Sundsverkinum varð skipað fyri brandskeiði í samstarvi við Tórshavnar Sløkkilið og venjing í at basa oljudálking.

## Persónskaðar

Hóast SEV arbeiðir skipað við trygdini, og at hugsjónin er, at eingir skaðar skulu henda, slepst ikki undan, at skaðar kunnu henda. Niðast sæst tal av persónskaðum, sum hava havt við sær óarbeiðsføri í ein ella fleiri dagar umframt skaðadagin. Í 2011 vóru tilsamans 7 persónskaðar fráboðaðir Arbeiðseftirlitinum. Hesir skaðar snúgva seg um beinbrot í sambandi við snávan í hálku, sárskaða í sambandi við, at fingurin varð kleimdur av maskinluti og kolmonoxideitran í sambandi við arbeiði í vatntunli (sí brot um arbeiðsóhapp á næstu síðu). Hetta er størsta tal av skaðum í 15 ár.



*Annika F. Berg, htu-leiðari*

**Persónskaðar 1996-2011**



## Arbeiðsóhapp

Tann 13. desember í 2011 hendi tíverri eitt arbeiðsóhapp í samband við Eiði 2 verkætlanina í vatntunlinum millum Norðskála og Selatrað.

Háspenningstransformararnir á borimaskinuni gjørdist ov heitir. Boð vórðu send eftir rakstrardeildini hjá SEV at loysa trupulleikan. Tað var í sambandi við hetta arbeiði, at fimm starvsfólk frá SEV og tvey starvsfólk frá P/F Zacharias Leitisstein vórðu kolmonoxideitrað.

Seinni varð skipað fyri samrøðu við Pál Weihe, yvirlækna, sum metti, at starvsfólkini ikki høvdu fingið varandi mein av tilburðinum. Eisini varð skipað fyri „debriefing" hjá Hera Kragesteen fyri, at starvsfólkini ikki skuldu fáa sálarligt mein av hesi hending.

SEV hevur síðani gjørt munandi ábøtur, soleiðis at slík óhapp ikki skulu henda aftur. Millum annað kann nevnast, at útgerð er fingin til vega, sum mátar kolmonoxid, eldfim evni og ilt-innihaldið í luftini. Eisini er streymveitingin broytt, soleiðis at ikki verður neyðugt at sløkkja ventilatiónina, tá ið arbeiði av slíkum slag verður framt í tunlinum.



*Arbeiðsplássið Eiði 2 Suður*

## Útlát til luftina

Eitt tað størsta árinið á umhvørvið er brenningin av fossilum brennievnum. Størsti parturin av $CO_2$-útlátinum frá virkseminum hjá SEV stavar frá oljunýtsluni til framleiðslu. Harnæst stavar $CO_2$-útlátið frá oljunýtsluni til upphiting av bæði bygningum og motorum og síðani til oljunýtslu til flutning á landi.

### Útlát av $CO_2$ í 2011




| | |
|---|---|
| Útlát tilsamans: | 111.299 tons $CO_2$ |
| Elframleiðsla tilsamans: | 273.838 MWh |
| Specifik $CO_2$: | 406 g/kWh |

## Burturkast

Í virkseminum hjá SEV verður nógv burturkast framleitt. Ein stórur partur av tí framleidda burturkastinum verður tyrvt og endurnýtt. Eisini verður burturkast sent til serviðgerð millum annað kemikaliirestir.

Av burturkasti til endurnýtslu er størsti parturin spillolja, sum verður latin IRF. Eisini er ein stórur partur jarn og metal.

Á myndini til høgru sæst millum annað, at burturkast til brenning er minkað í 2011. Hetta kemur av, at SEV í 2011 hevur sett skipan í verk at skilja papp og pappír frá burturkastinum, sum annars verður brent. Myndin vísir eisini, at nøgdin av serviðgjørdum burturkasti er vaksin í 2011. Orsøkin til økingina av serviðgjørdum burturkasti í 2011 er í sambandi við skiftan av háspenningsfeltum á verkinum í Trongisvági. Myndin vísir eisini, at burturkast til endurnýtslu er minni í 2011 enn undanfarnu ár. Hetta sæst á niðaru myndini til høgru.

Myndin vísir yvirlit yvir burturkast til endurnýtslu frá 2008 til 2011. Sum sæst, er nøgdin av pappi og pappírsburturkasti í 2011 økt munandi samanborið við undanfarnu ár. Økingin stavar sum nevnt frá, at skipan er sett í verk í 2011 at skilja papp og pappír frá tí vanliga húsarhaldsburturkastinum á Sundsverkinum og í skrivstovubygninginum á Landavegnum í Tórshavn. Umframt at minka um nøgdina til brenning er eisini ein fíggjarligur vinningur av hesi skipan.

Á myndini sæst eisini, at nøgdin av spillolju, sum verður latin endurnýtsluni hjá IRF, er minkað. Orsøkin til minkingina er, at nýggj útgerð er keypt til Sundsverkið, sum kann skilja vatnið frá oljuni, áðrenn hon verður latin IRF. Hóast útgerðin ikki varð tikin í nýtslu fyrr enn í september 2011, sæst longu ein minking. Hetta merkir eina minking á umleið 330 m$^3$, tvs. 330.000 litrar, sum eisini viðførir ein minni kostnað.

### Burturkast 2008-2011




*Myndin vísir yvirlit yvir burturkast frá 2008 til 2011.*

### Burturkast til endurnýtslu




*Myndin vísir yvirlit yvir burturkast, uppgivið í m$^3$, sum er farið til endurnýtslu frá 2008 til 2011.*

*Jákup Suni Lauritsen, nevndarformaður og Hákun Djurhuus, stjóri skriva undir sáttmálan við Enercon um keyp av trimum vindmyllum.*



# Nýggjar vindmyllur

## bílagdar frá Enercon

Á heysti 2010 bjóðaði Elveitingareftirlitið út arbeiðið at seta upp og reka tríggjar vindmyllur upp á tilsamans 3 MW í Neshaga ella á øðrum hóskandi stað. Stutt frammanundan vórðu seks feløg undangóðkend at luttaka í útbjóðingini, teirra millum SEV. Freistin at lata inn tilboð varð sett til 11. februar 2011.

Elveitingareftirlitið fekk tilboð frá trimum feløgum. Eftir at hava mett um innkomnu tilboðini, kunngjørdi eftirlitið tann 18. mai 2011, at tilboðið hjá SEV í Neshaga var vinnandi tilboðið.

Ein av tilboðsgevarunum valdi at kæra avgerðina hjá Elveitingareftirlitinum. Av tí sama valdi eftirlitið at steðga á við at geva SEV neyðuga framleiðsluloyvið. Tann 17. februar 2012 tók Vinnukærunevndin hjá Føroya Kærustovni avgerð í málinum at „staðfesta avgerðina hjá Elveitingareftirlitinum, nú Jarðfeingi“.

Upprunaliga ætlanin hjá SEV var at bíleggja myllurnar á sumri 2011 til avhending summarið 2012, men uttan neyðug loyvir bar ikki til at gera sáttmála um keyp av myllunum. Tað hevur tí verið ein avbjóðandi tíð fyri SEV at samráðst við Enercon fyri at fasthalda avhendingartíðina, uttan tó at hava bundið seg við einum sáttmála. Í somu løtu, sum endalig tilsøgn frá Jarðfeingi var til taks, gjørdi SEV sáttmála við Enercon.

Samlaði kostnaðurin av hesi verkætlan fer at liggja um 30 mió. kr. Ársframleiðslan av hesum trimum myllunum er mett til 10,7 mió. kWt. Við hesi verkætlan spara vit árliga uml. 2.300 tons av tungolju á Sundsverkinum. Við dagsins oljuprísi gevur hetta eina sparing uppá uml. 10 mió. kr.

Nú er farið undir at gera veg út á Eystnes, og roknað verður við, at myllurnar verða uppsettar seint í summar 2012.

# Starvsfólkahópurin



*Oluffa undir Kletti, starvsfólkaleiðari*

Sum ásett í kommustýrislógini grein 5, stk. 5 eru starvsfólk hjá SEV at rokna sum kommunal starvsfólk og koma undir somu reglur og ásetingar sum starvsfólk hjá kommunum.

SEV er limur í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum (KAF). Endamálið við KAF er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. KAF ger sáttmálar/semjur við fakfeløg, sum fevna um starvsfólkini hjá SEV. Hetta er galdandi fyri sáttmálan millum KAF og Starvsmannafelagið fyri starvsfólk hjá elfelagnum SEV, sáttmálan millum KAF og Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar í tænastu hjá SEV og sáttmálan millum KAF og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna um lønir v.m. hjá handverkarum, ið starvast hjá elfelagnum SEV. Afturat hesum hevur SEV starvsfólk, sum eru flokkað og lønt eftir øðrum sáttmálum. Tað snýr seg um sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelagið, sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og BLF og sáttmálan millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Sum ásett í kommunustýrislógini grein 5, stk. 5 eru lønar- og setanarviðurskifti hjá kommunum og kommunalum felagsskapum sum SEV, treytað av góðkenning frá landsstýrinum. Tað er lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum, sum tekur sær av hesum. Endamálið við hesi greinini í kommunustýrislógini er, at lønarlagið og onnur setanarviðurskifti hjá starvsfólkum í almennu og kommunalu fyrisitingunum skulu vera eins.

Í 2011 fingu 278 fólk útgjald gjøgnum lønarskipanina hjá SEV. Í hesum talinum eru 46 fólk, sum hava fingið útgjøld í sambandi við luttøku á aðalfundi og í nevnd, 33 málaraavlesarar, 6 tænastumanna-eftirlønir og 45 hjálparfólk, avloysarar og fólk í tíðaravmarkaðum starvi og 148 fólk í føstum starvi hjá SEV.

Talvurnar snúgva seg um fólk í føstum starvi hjá SEV.

## Býtið av starvsfólkunum

Við árslok 2011 vóru 148 fólk í føstum starvi hjá SEV. Hetta eru 7 færri enn við árslok 2010 og 10 færri enn við árslok 2009. Býtið av starvsfólkunum á ymsu eindunum hevur verið støðugt seinnu árini.

Lagkøkumyndin vísir, hvussu starvsfólkini við árslok 2011 vera býtt út á eindirnar.



## Starvsaldur

Miðal starvsaldurin er vaksandi. Í 2009 var hann 15 ár, tá høvdu 40 starvsfólk ella góð 25% starvast hjá SEV í 25 ár ella meira. Við árslok 2011 var miðal starvsaldurin 16 ár, 44 starvsfólk ella 30% høvdu starvast hjá SEV í 25 ár ella meira.

Stabbamyndin vísir býtið av starvsfólkum eftir starvsaldri.

Hóast høga miðal starvsaldurin vísir stabbamyndin eisini, at rættiliga stór tilgongd er av nýggjum starvsfólkum. Av teimum 57 starvsfólkunum, sum hava starvast hjá SEV í minni enn 10 ár, eru 45 av teimum, ella gott 30% av samlaða starvsfólkahópinum, sett í starv seinastu 5 árini.




## Aldur

Miðalaldurin á starvsfólkunum veksur spakuliga. Í 2009 var miðalaldurin 50 ár og við árslok 2011 51 ár. Við árslok 2011 vóru 40, ella 27% av starvsfólkunum, 60 ár ella eldri. Í 2009 var hetta talið 29 starvsfólk ella gott 18%. 18 starvsfólk, ella 12% av samlaða starvsfólkahópinum, vóru undir 40 ár við árslok 2011.

Stabbamyndin vísir býtið av starvsfólkum eftir aldri.




## Fráfaringaraldurin broyttur frá 70 til 67 ár

Á fundi 14. juni 2011 samtykti nevndin í SEV at broyta fráfaringaraldurin hjá starvsfólkunum hjá SEV úr 70 árum í 67 ár frá 1. oktober 2011 at rokna. Tað vil siga, at starvsfólk, sum tann 1. oktober 2011 vóru 67 ár ella eldri, skuldu frá vegna aldur í tíðarskeiðinum frá 1. oktober og alt eftir, hvussu langa uppsagnarfreist tey høvdu, ella eftir nærri avtalu við sín leiðara.

Hetta fer væntandi at ávirka miðalaldurin á starvsfólkahópinum frameftir, men hetta sæst tó ikki í tølunum fyri 2011, tí ov stutt tíð er fráliðin.

| Starvsdagar 2011 | | |
|---|---|---|
| 1. jan | John P. Danielsen, deildarstjóri fyri fyrisitingina | 25 ár |
| 7. jan | Bjarni Skorastein, handverkari á Sundsverkinum | 35 ár |
| 14. jan | Páll Johannesen, linjuformaður í Eysturoy | 35 ár |
| 1. mai | Tove Jenny Brink, tekniskur assistentur | 25 ár |
| 1. mai | Herluf Mortensen, verkfrøðingur | 30 ár |
| 1. mai | Stig Nielsen, maskinmeistari á Sundsverkinum | 30 ár |
| 1. mai | Hans Jákup Petersen, verkmeistari á Strond | 35 ár |
| 5. mai | Trygvi Samuelsen, linjumaður í Havn | 35 ár |
| 15. mai | Ingeborg Godtfred, stjórnarskrivari | 25 ár |
| 1. aug | Anders Nedergaard-Hansen, deildarleiðari fyri framleiðsluna | 25 ár |
| 7. aug | Bogi Wardum, linjumaður í Havn | 30 ár |

# Vaktarskifti í fyrisitingini hjá SEV

17. juni 2011 varð skipað fyri almennari móttøku á SEV, í sambandi við at John P. Danielsen 1. juli 2011 fór frá, og Bogi Bendtsen tók við sum deildarstjóri fyri fyrisitingina hjá SEV.



*Páll á Reynatúgvu heldur røðu, meðan John P. Danielsen, Bogi Bendtsen og Hákun Djurhuus og onnur lýða á*



## John P. Danielsen

1. juli 2011 gavst John P. Danielsen í starvinum sum deildarstjóri fyri fyrisitingina hjá SEV, eftir at hava røkt hetta starv í meira enn 25 ár.



## Bogi Bendtsen

Nýggi deildarstjórin fyri fyrisitingina hjá SEV eitur Bogi Bendtsen. Nevndin í SEV setti, eftir tilmæli frá stjóranum, tann 45-ára gamla Boga Bendtsen í starvið sum deildarstjóra. Hann myndar saman við stjóranum, Hákuni Djurhuus, og deildarstjóranum fyri tøkni Finn Jakobsen, dagligu leiðsluna í SEV.

# Lýsing av bygnaðinum

Tøkniliga menningin, saman við broytingum í krøvum frá millum annað myndugleikum, hevur ávirkan á, hvørjar uppgávur eru at røkja, og hvussu vit røkja tær. Hetta hevur við sær ávísar broytingar og tillagingar í innihaldinum av uppgávunum hjá deildunum og starvsfólkunum.

Tí er tørvur á við jøvnum millumbilum at gjøgnumganga og dagføra bygnaðarlýsingina og lýsingarnar av ábyrgdarøkjunum og uppgávunum hjá deildunum og innihaldið í ymsu størvunum.

Í hesum sambandi er ein verkætlan farin av bakkastokki í 2011, sum hevur til endamáls at gera eina nágreiniliga og dagførda lýsing av verandi bygnaði hjá SEV, deildunum og ymsu ábyrgdarøkjunum. Ein slík bygnaðarlýsing gevur betri yvirlit og størri gjøgnumskygni. Verkætlanin er komin nakað áleiðis og verður væntandi liðug í 2012.



# Býtisvirkini

| | Fugloy | Svínoy | Viðoy | Borðoy | Kunoy | Kalsoy | Eysturoy | Streymoy | Vágoy | Mykines | Nólsoy | Koltur | Hestoy | Sandoy | Skúvoy | Stóra Dímun | Suðuroy | **Samtal** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *TRAFOSTØÐIR, TAL* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 6kV Transformarastøðir | 1 | | | 2 | | | | | | | | | | | | | | 3 stk. |
| 10kV Transformarastøðir | | 1 | 6 | 32 | 4 | 7 | | 67 | | | 1 | | | 16 | | | 51 | 185 stk. |
| 20kV Transformarastøðir | | | | 2 | | | 111 | 77 | 30 | | | | 1 | | | | | 221 stk. |
| 60kV Transformarastøðir | | | | 1 | | | 2 | 4 | | | | | | | | | | 7 stk. |
| **Samtal økir** | **1** | **1** | **6** | **37** | **4** | **7** | **113** | **148** | **30** | | **1** | | **1** | **16** | | | **51** | **416 stk.** |
| *TRANSFORMARAR, TAL* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 6kV Transformarar | 2 | | | 4 | | | | 1 | | | | | | | | | | 7 stk. |
| 10kV Transformarar | | 1 | 6 | 38 | 4 | 7 | | 78 | | | 1 | | | 18 | | | 60 | 213 stk. |
| 20kV Transformarar | | | | 4 | | | 129 | 104 | 35 | | | | 1 | 3 | | | 3 | 279 stk. |
| 60kV Transformarar | | | | 1 | | | 6 | 12 | | | | | | | | | | 19 stk. |
| **Samtal økir** | **2** | **1** | **6** | **47** | **4** | **7** | **135** | **195** | **35** | | **1** | | **1** | **21** | | | **63** | **518 stk.** |
| *KAÐALSKÁP, TAL* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 0,4kV kaðalskáp | 13 | 25 | 79 | 502 | 30 | 30 | 1569 | 2316 | 511 | 7 | 38 | | 10 | 217 | 11 | | 850 | 6208 stk. |
| *LINJUR OG KAÐALAR* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 60kV linja | | | | 1,02 | | | 37,57 | 42,99 | | | | | | | | | | 81,58 km |
| 60kV kaðal | | | | 0,09 | | | 13,68 | 14,81 | | | | | | | | | | 28,58 km |
| 20kV linja | | | | | | | 60,27 | 52,60 | 9,27 | | | | | | | | 12,03 | 134,17 km |
| 20kV kaðal | | | | 11,46 | | | 151,54 | 143,74 | 39,52 | | | | 0,56 | 0,63 | | | 4,30 | 351,75 km |
| 10kV linja | | 3,23 | 16,31 | 13,84 | 9,37 | 6,44 | | 4,70 | | | | | | 12,14 | | | 44,24 | 110,27 km |
| 10kV kaðal | | 0,55 | 3,96 | 29,86 | 2,75 | 11,15 | | 68,92 | | | 1,47 | | | 34,10 | | | 59,20 | 211,96 km |
| 6kV linja | 2,19 | | | 7,17 | | | | | | | | | | | | | | 9,36 km |
| 6kV kaðal | 0,17 | | | 0,07 | | | | 0,16 | | | | | | | | | | 0,40 km |
| 0,4kV linja | | | | 0,32 | | | | 0,04 | | | | | | | | | 1,70 | 2,06 km |
| 0,4kV kaðal | 1,10 | 4,22 | 11,34 | 60,78 | 2,99 | 2,97 | 197,19 | 285,19 | 57,37 | 0,55 | 3,38 | 0,38 | 0,90 | 28,96 | 0,88 | 0,05 | 95,07 | 753,32 km |
| *MÁLARAR* | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Fjaravlisnir kWh málarar | 58 | 76 | 265 | 302 | 82 | 117 | 2673 | 3423 | 836 | 52 | 175 | 0 | 43 | 783 | 54 | 2 | 509 | 9450 stk. |
| Ikki fjaravlisnir kWh málarar | 2 | 2 | 8 | 2208 | 2 | 4 | 2639 | 7091 | 735 | 1 | 5 | 2 | 0 | 31 | 0 | 2 | 2371 | 15103 stk. |
| **kWh málarar tils./øki** | **60** | **78** | **273** | **2510** | **84** | **121** | **5312** | **10514** | **1571** | **53** | **180** | **2** | **43** | **814** | **54** | **4** | **2880** | **24553 stk.** |
| Vøkstur 2011 | | 3 | | 6 | 0 | 0 | 50 | 85 | 9 | 0 | 2 | 0 | 0 | 3 | 0 | 0 | 11 | 167 stk. |

# Elframleiðslan frá vatnorkuni fyri alt landið – elverksøkir 2011




# Íløgur 1997-2011

| Íløgur hjá SEV 1997 - 2011 | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Íløgur (mió. kr.)** | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 |
| **Vatnorkuverk** | 30,7 | 35,1 | 43,3 | 13,7 | 8,6 | 8,6 | 0,0 | 0,3 | 0,3 | 0,5 | 4,0 | 27,4 | 41,7 | 46,6 | 66,9 |
| **Onnur elorkuverk** | 0,1 | 0,1 | 1,1 | 5,8 | 30,4 | 18,1 | 52,0 | 18,0 | 20,0 | 2,3 | 2,8 | 5,0 | 3,1 | 2,7 | 0,8 |
| **Býtisvirkir** | 12,5 | 21,0 | 13,8 | 13,6 | 14,6 | 19,5 | 17,4 | 18,6 | 18,2 | 32,8 | 41,9 | 41,1 | 19,6 | 21,7 | 9,1 |
| **Felagsognir** | 0,5 | 0,1 | 1,8 | 0,7 | 0,1 | 0,0 | 0,1 | 0,8 | 0,0 | 0 | 0,8 | 0,0 | 0 | 0 | 0 |
| **Jarðarognir** | - | - | - | 1,5 | -4,8 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0 | 0,0 | 0,0 | 0 | 0 | 0 |
| **Onnur rakstrargøgn** | 2,1 | 1,8 | 2,6 | 1,5 | 2,4 | 1,7 | 2,4 | 2,0 | 3,2 | 2,2 | 2,5 | 3,1 | 5,6 | 5,7 | 3,9 |
| **Tilsamans** | **45,9** | **58,1** | **62,6** | **36,8** | **51,3** | **47,9** | **71,9** | **39,7** | **41,7** | **37,8** | **52,0** | **76,6** | **70,0** | **76,7** | **80,7** |

# Maskinyvirlit 31. desember 2011

| Stað | Maskina | MW | Hk | Maskintypa | Maskinframleiðari | Drív evni | Ár | Aldur | Tímar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Botnur** | T1 | 1,00 | 1.360 | Pelton vatnturbina | Voith | Vatn | 1965 | 46 | 177.596 |
| **Botnur** | T2 | 2,00 | 2.719 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1966 | 45 | 136.449 |
| **Eiðisverkið** | T1 | 6,70 | 9.109 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 24 | 87.752 |
| **Eiðisverkið** | T2 | 6,70 | 9.109 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 24 | 81.698 |
| **Neshagi** | M1 | 0,15 | 204 | Vindmylla ( fixed pitch) | Nordtank | Vindur | 1993 | 18 | 110.000 |
| **Neshagi** | M2 | 0,66 | 898 | Vindmylla | Vestas | Vindur | 2005 | 6 | 42.793 |
| **Neshagi** | M3 | 0,66 | 898 | Vindmylla | Vestas | Vindur | 2005 | 6 | 45.235 |
| **Neshagi** | M4 | 0,66 | 898 | Vindmylla | Vestas | Vindur | 2005 | 6 | 38.934 |
| **Skopunarverkið** | M1 – M3 | 1,83 | 2.483 | 4-T | Mercedes og Deutz | Gassolja | 1984 | | |
| **Smáverk** | | 1,70 | 2.311 | 4-T | Deutz, Mercedes, Perkins | Gassolja | | | |
| **Strond** | M2 | 2,30 | 3.127 | 4-T KV 12 SS | Mirrleese Blackstone | Gassolja | 1965 | 46 | 78.839 |
| **Strond** | M3 | 3,60 | 4.895 | 4-T 12 M 453 K | Krupp Mak | Gassolja | 1982 | 29 | 45.291 |
| **Strond** | T1 | 1,40 | 1.903 | Francis vatnturbina | Sulzer Hydro | Vatn | 1998 | 13 | 40.488 |
| **Sundsverkið** | M1 | 8,10 | 11.013 | 4-T 9M43C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2001 | 10 | 41.773 |
| **Sundsverkið** | M2 | 8,10 | 11.013 | 4-T 9M43C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2004 | 7 | 35.474 |
| **Sundsverkið** | M3 | 5,70 | 7.750 | 4-T KV16MAJOR | Mirrleese Blackstone | Tungolja | 1978 | 33 | 69.538 |
| **Sundsverkið** | M4 | 12,40 | 16.859 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Götaverken | Tungolja | 1983 | 28 | 153.444 |
| **Sundsverkið** | M5 | 12,40 | 16.859 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Götaverken | Tungolja | 1988 | 23 | 127.806 |
| **Tvøroyri** | M1 | 2,00 | 2.719 | 4-T | Nohab | Gassolja | 1973 | 38 | 81.520 |
| **Vágsverkið** | M1 | 2,70 | 3.671 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 28 | 107.342 |
| **Vágsverkið** | M2 | 2,70 | 3.671 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 28 | 110.165 |
| **Vágsverkið** | M3 | 4,32 | 5.874 | 4-T 9M32C | Caterpillar/MaK | Tungolja | 2004 | 7 | 46.211 |
| **Vestmanna** | Fossá 1 | 2,10 | 2.855 | Pelton vatnturbina | Maier | Vatn | 1953 | 58 | 201.906 |
| **Vestmanna** | Fossá 2 | 4,20 | 5.710 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1956 | 55 | 314.310 |
| **Vestmanna** | Heygav. 1 | 4,90 | 6.662 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1963 | 48 | 203.508 |
| **Vestmanna** | Mýruv. 1 | 2,40 | 3.263 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1961 | 50 | 334.196 |
| | | | | | | | | | |
| | | **101,38** | **137.834** | | **Samlaður máttur:** | **101** | **MW** | | |
| | | | | | | **137,00** | **Hk** | | |

# Avroknað elsøla í kWt

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | Broyting |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna | 15.777.670 | 19.280.759 | 22.051.851 | 23.065.700 | 25.750.667 | 25.948.229 | 26.358.161 | 1,6 |
| Gerð, framleiðsla og byggivirksemi | 51.092.559 | 53.752.050 | 54.738.036 | 53.821.274 | 51.991.512 | 48.927.411 | 44.517.399 | -9 |
| Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi | 19.124.422 | 20.973.652 | 21.686.476 | 22.943.675 | 22.594.103 | 22.506.377 | 22.366.543 | -0,6 |
| Flutningur, postur og fjarskifti | 18.682.436 | 21.752.822 | 23.306.471 | 25.075.762 | 24.371.029 | 28.706.990 | 31.784.095 | 10,7 |
| Fígging, trygging og aðrar vinnutænastur | 3.809.231 | 3.915.595 | 4.008.046 | 4.239.439 | 4.456.466 | 4.247.976 | 4.241.944 | -0,1 |
| Almennar og privatar tænastur, kirkjur, samkomur v.m. | 32.049.660 | 34.079.230 | 35.240.703 | 36.171.787 | 35.631.941 | 36.539.380 | 36.843.539 | 0,8 |
| Gøtuljós | 6.122.808 | 5.562.036 | 6.781.265 | 7.034.366 | 6.661.691 | 6.848.860 | 7.272.701 | 6,2 |
| Sethús,íbúðir, summarhús og neyst | 74.942.971 | 75.553.437 | 77.590.254 | 81.549.873 | 80.450.334 | 81.271.141 | 81.423.113 | 0,2 |
| | | | | | | | | |
| **Samanlagt (uttan eginnýtsluna hjá SEV)** | **221.601.757** | **234.869.581** | **245.403.102** | **253.901.877** | **251.907.742** | **254.996.364** | **254.807.495** | **-0,1** |
| **Eginnýtsla hjá SEV og tap av elmegi** | **23.319.243** | **24.608.419** | **24.012.898** | **21.927.123** | **23.619.258** | **25.326.636** | **19.035.505** | **-6,2** |
| **Elframleiðslan álmanakkaárið** | **244.921.000** | **259.478.000** | **269.416.000** | **275.829.000** | **275.527.000** | **280.323.000** | **273.843.000** | **-2,3** |

# Oljunýtslan í tonsum frá 1988 til 2011




# Størsti eftirspurningur og installeraður máttur – meginøkið frá 1954 til 2011



# Elframleiðslan fyri alt landið frá 1954 til 2011




# Elframleiðslan í Suðuroy frá 1940 til 2011



# Elframleiðslan fyri alt landið – elverksøkir 2011




# Elframleiðsla pr. íbúgva í Føroyum frá 1970 til 2011



# Døgnlastin fyri meginøkið mikudagin 5. okt. 2011




# Leypandi 12 mánaðar framleiðsla fyri alt landið frá 1985 til 2011



# Ársfrágreiðing & ársroknskapur 2011

# Elfelagið SEV Ársfrásøgn fyri 2011

## Innihald

Upplýsingar um felagið v.m. . . . . . 34
Leiðsluátekning . . . . . . 35
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . 36
Høvuðs- og lyklatøl . . . . . . 37-38
Leiðslufrágreiðing . . . . . . 39-43
Rakstrarroknskapur . . . . . . 44
Fíggjarstøða . . . . . . 45-46
Peningastreymsuppgerð . . . . . . 47
Virkisbýti, framleiðsla og net . . . . . . 48-49
Rakstrarbýti framleiðsla og net . . . . . . 50
Nýttur roknskaparháttur . . . . . . 51-53
Notur . . . . . . 54-59

## Felagið

Elfelagið SEV
Landavegur 92
FO-100 Tórshavn
Telefon: 346800
Telefax: 346801
Heimasíða: www.sev.fo
Heimstaður: Tórshavn
Roknskaparár: 01.01 - 31.12

## Nevnd

Jákup Suni Lauritsen, formaður
Kári E. Jacobsen, næstformaður
Marin Katrina Frýdal
Steinbjørn O. Jacobsen
Niclas Hentze
Pauli T. Petersen
Bødvar Hjartvarsson

## Leiðsla

Hákun Djurhuus, stjóri
Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisitingina
Finn Jakobsen, deildarstjóri fyri tøkni

## Grannskoðan

NOTA
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

## Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram ársfrásøgn felagsins fyri roknskaparárið 01.01.11 - 31.12.11.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini og viðtøkum felagsins.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu, úrslitinum og peningastreymum. Samstundis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin greiðir rættvísandi frá teimum viðurskiftum, sum frágreiðingin fevnir um.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin, og mælt verður til at góðkenna hana.

Tórshavn, tann 3. apríl 2012

## Nevnd:

| | | |
|---|---|---|
| *Jákup Suni Lauritsen*<br>*formaður* | *Kári E. Jacobsen*<br>*næstformaður* | *Marin Katrina Frýdal* |
| *Steinbjørn O. Jacobsen* | *Niclas Hentze* | *Pauli T. Petersen* |
| *Bødvar Hjartvarsson* | | |

## Stjórn:

*Hákun Djurhuus*
*stjóri*

## Fíggjarleiðsla:

*Bogi Bendtsen*
*deildarstjóri fyri fyrisitingina*

## Til kapitaleigaran í Elfelagnum SEV

# Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Elfelagnum SEV fyri roknskaparárið 01.01.11 - 31.12.11, við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, peningastreymi, virkisbýtisuppgerð, rakstrarbýti og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at felagið kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31.12.11 og av úrslitinum av virksemi, peningastreymi felagsins í roknskaparárinum 01.01.11 - 31.12.11 samsvarandi ársroknskaparlógini.

### Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Vit hava sum ásett í ársroknskaparlógini lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað í hesum sambandi, tá ið ársroknskapurin varð grannskoðaður. Útfrá omanfyri standandi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 3. apríl 2012

**NOTA**

Løggilt grannskoðanarvirki P/F

*Hans Laksá*
*Løggildur grannskoðari*

*Jørmann Petersen*
*Løggildur grannskoðari*

# Høvuðs- og lyklatøl

## HØVUÐSTØL

| Upphæddir í tkr. | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Úrslit** | | | | | |
| Nettoumsetningur | 316.391 | 280.816 | 279.870 | 276.860 | 249.105 |
| Indeks | 127 | 113 | 112 | 111 | 100 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskriving | 20.886 | 8.021 | 69.282 | 20.752 | 63.795 |
| Indeks | 33 | 13 | 109 | 33 | 100 |
| Úrslit av primerum rakstri (EBIT) | -34.936 | -47.644 | 14.467 | -27.605 | -14.329 |
| Indeks | 244 | 333 | -101 | 193 | 100 |
| Fíggjarpostar, netto | -14.454 | -10.139 | -5.210 | -3.533 | -2.293 |
| Indeks | 630 | 442 | 227 | 154 | 100 |
| Ársúrslit | -49.390 | -57.783 | 9.257 | -31.138 | 12.036 |
| Indeks | -410 | -480 | 77 | -259 | 100 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Aktiv tilsamans | 1.243.765 | 1.200.554 | 1.151.024 | 484.126 | 539.325 |
| Indeks | 231 | 223 | 213 | 90 | 100 |
| Eginogn | 842.276 | 889.131 | 945.563 | 325.987 | 357.125 |
| Indeks | 236 | 249 | 265 | 91 | 100 |
| **Peningastreymar** | | | | | |
| Nettopeningastreymar frá: | | | | | |
| Rakstri | -13.200 | 12.172 | 44.164 | 19.332 | 71.535 |
| Íløgum | -80.672 | -78.826 | -71.856 | -76.613 | -52.038 |
| Fígging | 108.615 | 72.055 | 40.158 | -18.018 | -18.930 |
| **Peningastreymar í árinum** | **14.743** | **5.401** | **12.466** | **-75.299** | **567** |

## LYKLATØL

| | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rentabilitetur** | | | | | |
| Renting av egingogn | -5,6% | -6,3% | 1,0% | -9,1% | 3,4% |
| Ognaravkast | 1,8% | 0,7% | 6,0% | 4,3% | 11,8% |
| Ognarumferð | 0,25 | 0,23 | 0,24 | 0,57 | 0,46 |
| | | | | | |
| **Soliditetur** | | | | | |
| Eginognarpartur | 67,8% | 74,1% | 82,1% | 67,3% | 66,2% |
| | | | | | |
| **Annað** | | | | | |
| Starvsfólk við høvuðsinntøku frá SEV | 138 | 146 | 153 | 148 | 145 |
| Ársverk í miðal | 166 | 175 | - | - | - |

### Útrokning av lyklatølum

| | |
|---|---|
| **Renting av eginogn** | Úrslit av vanligum rakstri eftir skatt x 100 / Miðal eginogn |
| **Yvirskotsstig** | Úrslit av primerum rakstri x 100 / Nettoumsetningur |
| **Ognaravkast** | Úrslit av primerum rakstri x 100 / Miðalvirði av operativum aktivum |
| **Ognarumferð** | Nettoumsetningur / Aktiv tilsamans |
| **Eginognarpartur** | Eginogn ultimo x 100 / Aktiv tilsamans |

Lyklatøl eru roknað út eftir tilmælum frá „Den Danske Finansanalytikerforening“.

# Leiðslufrágreiðing

## Høvuðsvirksemið

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti fyri náttúru og umhvørvi. Eftir Elveitingarlógini skal SEV (netvirksemið) fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, soleiðis at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Allar kommunur í Føroyum eru limir í SEV. Limirnir hefta fram til árslok 2008 bæði fyri skuld felagsins og møguligum rakstrarhalli. Frá 1. januar 2009 hefta kommunurnar einans fyri felagsins skyldum yvir fyri starvsfólkunum.

Inniverandi frágreiðing fevnir um virksemið hjá felagnum í tíðarskeiðinum 1. januar 2011 til 31. desember 2011.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum hjá felagnum

Rakstrarútreiðslurnar hjá felagnum verða vanliga býttar í lønir til starvsfólk og tilfar- og tænastuveitingar. Hesar útreiðslur verða aftur býttar millum framleiðsluvirksemi, netvirksemi og fyrisiting.

Rakstrarúrslitið fyri 2011 gjørdist eitt hall uppá 49,4 mió. kr. móti einum halli uppá 57,8 mió. kr. í 2010. Tann av eykaaðalfundinum í november 2010 samtykta fíggjarætlan vísir eitt hall uppá 32,9 mió. kr.

Felagið hækkaði elprísin 1. januar 2011 við 0,15 kr. pr. kWt við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum. Samstundis ásannaði Elveitingareftirlitið, saman við SEV, at við høga oljuprísinum og við atliti at tørvinum um at útbyggja og endurnýggja bæði á linjuøkinum og í framleiðsluni, verður neyðugt við príshækkingum í framtíðini. Tann 1. januar 2012 hækkaði felagið elprísin við 0,10 kr. pr. kWt.

## Inntøkur

Samlaðu inntøkur felagsins í 2011 gjørdust 319,2 mió. kr., móti ætlaðu 314,5 mió. kr. ella ein meirinntøka uppá 4,7 mió. kr. Nógv tann størsti parturin av inntøkuni stavaði frá streymgjaldi svarandi til 296,4 mió. kr., meðan 22,8 mió. kr. vóru inntøkur frá føstum gjøldum og øðrum inntøkum. Elframleiðslan máld í MWt fyri 2011 var 273.843 móti 280.323 MWt í 2010, ella ein minking uppá 6.480 MWt, svarandi til 2,3%.

Av teimum 273.843 MWt vóru 166.815 MWt framleiddir av oljuriknu verkunum, meðan 92.502 MWt vóru framleiddir við vatnorku og 14.526 MWt við vindi í 2011. Harav Sp/f Røkt stóð fyri einum parti. Til samanberingar vóru í 2010 framleiddir 199.344 MWt av oljuriknu verkunum, soleiðis at framleiðslan av elmegi á teimum oljuriknu verkunum fall í 2011 við 16,3%. Elframleiðslan í 2010 við vatnorku var 67.395 MWt svarandi til, at framleiðslan av elmegi við vatnorku øktist við 37,3% í 2011. Eisini elframleiðslan við vindi øktist í 2011 við 6,9% mótvegis 2010, tá ið framleiðslan var 13.584 MWt.

*Uppgerð av inntøkum hjá elverkum*
Grundarlagið fyri uppgerð av inntøkunum hjá framleiðsluverkunum, eins og ásetan av kostnaðinum fyri stýringina av elnetinum, rullandi máttinum, tøka máttinum og fyri netábyrgdini annars, eru núverandi skrásetingar felagsins út frá einum vanligum rakstrarári.

Inntøkurnar hjá framleiðsluverkunum skulu umfata kostnaðin hjá verkunum, umframt at tey eiga at rokna sær vinning av framleiðsluni. Roknaði vinningurin uppá 26,2 mió. kr. er ásettur til 5% av ognunum hjá einstøku framleiðsluverkunum. Vinningurin uppá 5% er ásettur við støði í avkastinum av langfreistaðum realkreditslánsbrøvum, sum kann samanberast við langfreistaðu íløgurnar hjá framleiðsluverkunum.

## Útreiðslur

Útreiðslurnar í 2011 gjørdust 368,6 mió. kr., meðan hesar vóru mettar til at verða 347,5 mió. kr. ella 21,1 mió. kr. meiri enn ætlað. Fyri 2010 vóru samlaðu útreiðslurnar 338,5 mió. kr., svarandi til at útreiðslurnar vuksu 30,1 mió. kr. ella 8,9%. Útreiðslurnar til tilfar- og tænastuveitingar og lønir gjørdust 152,9 mió. kr., meðan ætlað var við 151,7 mió. kr. svarandi til, at hesar gjørdust 1,2 mió. kr. meiri enn ætlað. Fyri 2010 vóru tilsvarandi útreiðslur 145,0 mió. kr., soleiðis at hesar í 2011 gjørdist 7,9 mió. kr. størri svarandi til 5,5%.

Í 2011 hevur felagið útreiðsluført fyrireikingarkostnaðin fyri Víkarvatnsverkætlanina og fyrireikingarkostnaðin fyri útbyggingina av

skrivstovubygninginum við Landavegin uppá ávikavist 4,2 mió. kr. og 1,0 mió. kr. ella íalt 5,2 mió. kr. Harumframt hevur felagið avsett kostnað til trætumál við 1 mió. kr. Hesir kostnaðir eru innroknaðir í kostnaðin fyri tilfar- og tænastuveitingar hjá fyrisitingini, men ætlað er ikki við hesum í fíggjarætlanini fyri 2011.

*Kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt*
Samlaði kostnaðurin hjá verkunum stendst av kostnaðinum í sambandi við framleiðslu av elmegi umframt kostnaðinum fyri netábyrgd. Hesin kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðin fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnaðin fyri netábyrgd annars. Framleiðsluverkini selja sína framleiðslu av elmegi til netvirksemið, sum rindar fyri keypið umframt kostnaðin fyri ein part av netábyrgdini, sum verkini standa fyri.

*Kostnaður fyri stýring av elnetinum.*
Stýringin av elnetinum í Suðuroy fer fram á framleiðsluverkinum í Vági, meðan stýringin av elnetinum í restini av landinum fer fram á Fossáverkinum í Vestmanna.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum uppá 2,3 mió. kr. er uppgjørdur sum samlaði kostnaðurin fyri lønir á Fossáverkinum eitt vanligt rakstrarár uppá 3 mió. kr., frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum uppá 0,7 mió. kr. Kostnaðurin fyri vanligan rakstur á verkinum er settur til at verða tann sami, sum tað kostar at reka Mýru- og Heygaverkið tilsamans, svarandi til 0,7 mió. kr. eitt vanligt rakstrarár. Sami kostnaður fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum er brúktur til kostnaðin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy, svarandi til 2,3 mió. kr.

*Kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt.*
Kostnaðurin fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt er mettur til at verða 5% av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað avskrivingar av Sundsverkinum og Vágsverkinum, svarandi til ávikavist 8,4 mió. kr. og 1,3 mió. kr. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá felagnum av smáverkum kring landið, sum verða mett sum eyka verk ella tøkur máttur. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd, restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

*Kostnaður fyri netábyrgd samanumtikið*
Samlaður kostnaður fyri stýring av elnetinum í Føroyum er 4,6 mió. kr., meðan kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin á Sundsverkinum og Vágsverkinum er settur til 9,7 mió. kr. Kostnaðurin fyri veitingartrygdina v.m. frá øðrum verkum er 4,0 mió. kr. svarandi til, at samlaður kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og stýring av elnetinum er mettur til 18,3 mió. kr.

## Oljuútreiðslur

Oljuútreiðslurnar fyri 2011 gjørdust 142,6 mió. kr. Í fíggjarætlanini fyri 2011 vórðu oljuútreiðslurnar mettar til at verða 117,3 mió. kr., svarandi til at hesar vóru 25,3 mió. kr. størri enn ætlað varð, svarandi til 21,6 %.

Framleiðslan á oljuriknu verkunum fall við 32.529 MWt, svarandi til 16,3%, frá 199.344 MWt í 2010 til 166.815 MWt í 2011. Fallið í framleiðsluni á teimum oljuriknu verkunum bleiv mótsvarað við eini fallandi elnýtslu uppá 6.480 MWt, 25.107 MWt í meirframleiðslu av elmegi við vatni og 942 MWt í meirframleiðslu av elmegi við vindi.

Sostatt kann sigast, at økingin í oljuútreiðslunum stavar frá eini hækking í oljuprísunum í 2011. Um so var, at framleiðslan á oljuriknu verkunum ikki hevði fallið, høvdu oljuútreiðslurnar verið hægri. Oljuútreiðslurnar svara til 38,7% av kostnaðinum og avskrivingunum fyri 2011. Tí hevur tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, um gongdin í oljuprísinum og kursurin á dollaranum verður munandi øðrvísi enn ætlað í fíggjarætlanini.

## Lønarútreiðslur

Samlaða lønarútreiðslan er 62,6 mió. kr. mótvegis ætlaðu 65,3 mió. kr. í 2011 svarandi til eina minni nýtslu enn ætlað uppá 2,7 mió. kr. Fyri 2010 vóru samlaðu lønarútreiðslurnar 65,1 mió. kr., soleiðis at talan er um eina lækking í samlaðu lønarútreiðslunum uppá 2,5 mió. kr. ella 3,8%.

Lønarútreiðslurnar til framleiðsluvirksemið gjørdust 32,1 mió. kr. móti ætlaðu 26,3 mió. kr. ella ein hægri lønarútreiðsla uppá 5,8 mió. kr. stavandi frá eini meirnýtslu av lønum á teimum flestu verkunum grundað á nógvu umvælingar- og viðlíkahaldsarbeiði. Fyri 2010 vóru lønarútreiðslurnar 31,1 mió. kr. svarandi til eina hægri lønarútreiðslu uppá 1,0 mió. kr. í 2011 í mun til 2010 ella 3,2%.

Lønarútreiðslan fyri netvirksemið gjørdist 20,4 mió. kr. móti ætlaðu 26,6 mió. kr. ella ein minni nýtsla uppá 6,2 mió. kr. Fyri 2010 vóru somu útreiðslur 23,5 mió. kr. svarandi til, at útreiðslurnar í 2011 gjørdust 3,1 mió. kr. ella 13,2% lægri.

Ætlaða minni nýtslan í 2011 stavar frá, at ætlað varð við eini hægri lønarútreiðslu uppá 4,3 mió. kr. til teknikkdeildina og verkfrøðideildina enn veruligu lønarútreiðslurnar gjørdust, samstundis sum lønarútreiðslurnar til rakstaradeildirnar vóru 1,9 mió. kr. lægri enn ætlað.

Lønarútreiðslurnar til fyrisitingina gjørdust 10,0 mió. kr. móti ætlaðu 12,4 mió. kr. svarandi til eina minni nýtslu uppá 2,4 mió. kr. enn ætlað. Fyri 2010 vóru lønarútreiðslurnar til fyrisitingina 10,4 mió. kr. svarandi til eina minni afturgongd í lønunum uppá 0,4 mió. kr.

## Tilfar- og tænastuveitingar

Útreiðslurnar til tilfar- og tænastuveitingar gjørdust 90,3 mió. kr. móti ætlaðu 86,4 mió. kr. ella 3,9 mió. kr. hægri enn ætlað. Innroknað í útreiðslunum er fyrireikingarkostnaðurin fyri Víkarvatnsverkætlanini uppá 4,2 mió. kr., fyrireikingarkostnaðurin fyri útbyggingina av skrivstovubygninginum við Landavegin uppá 1,0 mió. kr. og avseting av kostnaði í sambandi við trætumál uppá 1,0 mió. kr.

At útreiðsluføra henda kostnað varð ikki ætlað í 2011. Um so var, at hesar útreiðslur ikki vóru útreiðsluførdar, høvdu útreiðslurnar til tilfar- og tænastuveitingar verið 84,1 mió. kr. ella 2,3 mió. kr. lægri enn upprunaliga ætlað.

Teir skaðar, sum ódnarveðrið veturin 2011/2012 førdi við sær, ávirkaði eisini útreiðslurnar til tilfar- og tænastuveitingar hjá felagnum nakað og harvið eisini úrslitið fyri 2011. Hetta sjálvt um felagið er væl tryggjað.

*Framleiðsluvirksemið*
Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til framleiðsluvirkir gjørdist 58,7 mió. kr. móti ætlaðu 46,1 mió. kr. svarandi til eina meirnýtslu uppá 12,6 mió. kr. Meirnýtslan stavar frá óvæntaðum umvælingarkostnaði í sambandi við viðlíkahald og umvæling av framleiðsluverkunum, serliga Fossáverkinum, Eiðisverkinum og Sundsverkinum. Fyri 2010 vóru somu útreiðslur 46,4 mió. kr. svarandi til, at kostnaðurin á økinum gjørdist 12,3 mió. kr. størri í 2011 enn í 2010 ella 26,5%.

*Netvirksemið*
Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til netvirksemið gjørdust 15,1 mió. kr. móti ætlaðu 19,7 mió. kr. svarandi til eina minni nýtslu uppá 4,6 mió. kr. grundað á minni nýtslu hjá rakstrardeildum felagsins. Fyri 2010 vóru somu útreiðslur 18,5 mió. kr., soleiðis at kostnaðurin á økinum er 3,4 mió. kr. lægri í 2011 í mun til 2010 ella 18,4%.

*Fyrisiting*
Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til fyrisiting gjørdust 16,5 mió. kr. í 2011 mótvegis ætlaðu 20,6 mió. kr., svarandi til eina minni útreiðslu uppá 4,1 mió. kr. Íroknað hesi minni nýtslu er kostnaðurin til Víkarvatnsverkætlanina og verkætlanina við Landavegin og avseting mótvegis kostnaðinum av trætumálum uppá tilsamans 6,2 mió. kr. Verður hesin kostnaður drigin frá kostnaðinum, verða útreiðslurnar 10,3 mió. kr. ella 10,3 mió. kr. minni enn ætlað. Minni nýtslan stavar frá lægri fyrisitingarkostnaði, íroknað kostnað til kanning og ráðgeving.

Fyri 2010 vóru somu útreiðslur 15 mió. kr. svarandi til, at kostnaðurin á økinum gjørdust 1,5 mió. kr. hægri í 2011 ella 10%.

## Fíggjarkostnaður

Rentuútreiðslurnar netto gjørdust 14,4 mió. kr. móti ætlaðu 15,6 mió. kr., svarandi til eina lægri útreiðslu enn ætlað uppá 1,2 mió. kr. Orsøkin er lægri rentustøði enn ætlað fyri broytiliga partin av lánum felagsins.

Felagið er partvíst viðkvæmt fyri broytingum í altjóða rentustøðinum, tí ein partur av skuldini hjá felagnum er upptikin við broytiligari rentu, meðan ein annar partur hevur fasta rentu, millum annað byggilánið til verkætlanina "Eiði 2", har rentan skal endurskoðast við árslok 2013 í sambandi við umlegging av byggiláninum til langfreistað lán.

## Avskrivingar

Avskrivingarhátturin er frá 1. januar 2009 broyttur eftir boðum frá Elveitingareftirlitinum. Ognarvirðini eru munandi broytt frá 1. januar 2009, og avskrivingartíðirnar fyri flestu ognir eru samstundis eisini munandi longdar.

Við støði í gjørdum metingum av tølunum kann afturlítandi sigast, at avskrivingarnar hjá felagnum eftir nýggja avskrivingarháttinum, har avskrivingartíðirnar vórðu longdar og ognarvirðini hækkað, eru 5,5 mió. kr. hægri í 2009 og 5,9 mió. kr. í 2010 enn um avskrivað varð við gomlum styttri avskrivingartíðum og lægri ognarvirðum. Um so var, at ognir felagsins, sum vóru avskrivaðar niður á null saldo, ikki vórðu tiknar við í uppgerðina av nýggja avskrivingarháttinum, hevði hetta merkt munandi lægri avskrivingar, men tá ið broyting verður gjørd, skal hendan gerast fyri økið sum heild, og partar kunnu ikki útilokast.

Fyri at gera eina meting yvir tíð av virknaðinum av broytta avskrivingarháttinum er ein meting gjørd. Fyritreytin er, at felagið ger árligar íløgur uppá 50 mió. kr. fyri tey komandi árini, og hesar verða vanliga avskrivaðar. Metingin vísir, at avskrivingarnar eru nakað lægri við nýggja háttinum enn eftir gamla avskrivingarháttinum.

Hetta merkir tó ikki, at felagið uttan víðari kann lækka elprísin ella lata vera at hækka hann, tí so verður einki gjaldførisavlop frá rakstrinum, sum skal tryggja eginfíggingina av ætlaðum íløgum. Javnvág má verða í rakstri felagsins. Eitt úrslit við ongari eginfígging er ikki nøktandi, um SEV skal gera íløgur í endurnýggingar á termisku elverkunum og útbygging av netinum, samstundis sum íløgur skulu fremjast í útbygging av varandi orkukeldum.

Avskrivingarnar fyri 2011 gjørdust 55,8 mió. kr. móti ætlaðu 60,0 mió. kr. svarandi til 4,2 mió. kr. lægri. Avskrivingarnar fyri 2010 vóru 55,7 mió. kr., sum er sama støði sum í 2011. Gjørdar verða metingar av, tá ið fíggjarætlanin verður gjørd fyri komandi ár, hvørjar íløgur væntandi verða lidnar í árinum og harvið tiknar í nýtslu, og byrjað verður at avskriva upp á ognina. Munurin millum staðfestu og ætlaðu avskrivingarnar hevur støði í hesum metingum og veruligum staðfestingum, eins og íløgurnar vóru nakað lægri enn ætlað.

## Serligir váðar

Felagið hevur avmarkaðan váða av einstøkum kundum. Felagið ansar støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum.

Sum nevnt undir brotinum um fíggjarkostnaðin, er felagið harumframt viðkvæmt fyri broytingum í rentustøðinum, men hevur valt ikki at tryggja móti rentuváða við fíggjarligum amboðum ella líknandi.

Felagið fylgir væl við gongdini í rentustøðinum og metir áhaldandi um, hvørt tað er ein fyrimunur at tryggja seg móti rentuváðanum.

Eisini er felagið viðkvæmt fyri broytingum í oljuprísinum og kursinum av dollarum, tí oljan verður keypt í dollarum. Felagið hevur ikki prístryggjað (hedgað) seg móti broytingum í oljuprísinum, eins og dollarar ikki eru keyptir upp á termin. Í løtuni verður arbeitt við at eftirmeta núverandi mannagongd á økinum.

## Íløgur

Íløgurnar í materiella støðisogn vóru 80,7 mió. kr., sum niðanfyri standandi talva vísir.

Í mun til fíggjarætlanina fyri 2011 er hetta 46,6 mió. kr. minni enn ásett. Harav eru 10,5 mió. kr. brúktar minni enn ásett í fíggjarætlanini uppá Eiðisverkið. Orsøkin er, at arbeiðið gongur seinri enn ætlað. 3,3 mió. kr. eru brúktar minni enn ætlað uppá Sundsverkið, eins og 8,0 mió. kr. ikki eru brúktar uppá langtíðarætlanina og vindmyllur. Minni íløgur vórðu eisini gjørdar í koplingarstøðir og net enn upprunaliga mett eins og íløgur í Granasamstarvið, amboð og fjaravlestur gjørdust 9,2 mió. kr. lægri enn ætlað.

## Gjaldførið

Í fíggjarætlanini fyri 2011 varð ætlað við eini lántøku og kassakreditti uppá tilsamans 130 mió. kr., og er hon fingin til vega. Gjaldførisbroyting felagsins frá rakstrinum var negativ við 13,2 mió. kr., við hesum úrsliti er eingin sjálvfígging til íløgur í 2011. Felagið skal eisini á hvørjum ári rinda avdráttir, hesir vóru 18,9 mió. kr. í 2011.

Gjaldføri felagsins var við ársenda 56,9 mió. kr. Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir uppá kassakredittir í peningastovnum tilsamans 5,4 mió. kr., soleiðis at samlaður tøkur peningur og kredittir eru 62,3 mió. kr.

Fyrst í januar 2012 hevur felagið tikið upp eitt gjaldførislán uppá 80 mió. kr. Endamálið er at hava eitt munagott gjaldføri, soleiðis at SEV altíð er ført fyri kontant at rinda fyri eitt oljukeyp og kostnaðin av einum óhappi á einum av framleiðsluverkunum ella av netinum.

Harumframt er neyðugt at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av felagnum. Eisini verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikanum á fíggjarmarknaðunum kring heimin.

## Uttanhýsis umhvørvi

Felagið leggur høvuðsdentin á at umhvørvið, reglur og krøv á økinum til eina og hvørja tíð verða fylgd.

| Íløgur | Staðfest 2011 | | Upprunaætlan 2011 | |
|---|---|---|---|---|
| | mió. kr. | prosent | mió. kr. | prosent |
| Eiðisverkið | 66,5 | 82,4 | 77,0 | 60,5 |
| Verkið í Botni | 0,5 | 0,6 | 0,0 | 0,0 |
| Vágsverkið | 0,1 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Sundsverkið | 0,7 | 0,9 | 4,0 | 3,1 |
| Smærri verk | 0,0 | 0,0 | 7,1 | 5,6 |
| Langtíðarætlan og vindmyllur í Neshaga 28 mió. kr. | 0,0 | 0,0 | 8,0 | 6,3 |
| Íløgur í framleiðsluvirkir tilsamans | 67,8 | 84,0 | 96,1 | 75,5 |
| Koplingarstøðir og net v.m. | 9,1 | 11,2 | 18,1 | 14,2 |
| Amboð, KT-útgerð, fjaravlestur og verkætlanin Grani v.m. | 3,9 | 4,8 | 13,1 | 10,3 |
| Tilsamans | 80,7 | 100,0 | 127,3 | 100,0 |

## Vitanarstøði og menning

Felagið leggur stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í virkseminum í tann mun, hetta verður mett neyðugt, og skipað verður fyri hóskandi eftirútbúgving av starvsfólkunum. Felagið arbeiðir framhaldandi við at menna veitingartrygdina og góðskuna. Arbeitt verður við ætlanum at økja tann partin av framleiðsluni, sum byggir á varandi orkukeldur, so sum vatn, vind og sjóvarfall.

## Útlit fyri rakstrarárið 2012

Úrslitið eftir skatt fyri 2012 er eitt ætlað hall uppá 6,3 mió. kr., sum er munandi betri enn úrslitið í 2011, tá ið hallið var 49,4 mió. kr. Í ætlaða hallinum er innroknað inntøka ella spard útreiðsla uppá 10 mió. kr., sum samtykt á eykaaðalfundinum 19. desember 2011 hjá felagnum.

Roknað er við einum miðalprísi uppá 1,28 kr. pr. kWt í 2012 og ongari týðandi broyting í samansetingini av elnýtsluni millum brúkararnar enn tann, sum er galdandi í dag. Við útgangsstøði í hesum miðalprísi verður roknað við eini samlaðari inntøku frá sølu av elmegi uppá 319,5 mió. kr. Harumframt koma inntøkur av fasta gjaldinum, íbindingargjaldinum og øðrum uppá 18,7 mió. kr., soleiðis at roknað verður við eini samlaðari inntøku uppá 338,2 mió. kr. Hetta svarar til, at felagið fær eina meirinntøku uppá 19,0 mió. kr. í mun til inntøkuna í 2011. Orsøkin er hækkandi elprísur við 0,10 kr. pr. kWt í 2012.

Rakstrarútreiðslurnar, áðrenn eina møguliga sparing í rakstrinum, verða mettar at verða 126,5 mió. kr. í 2012 móti 152,9 mió. kr. í 2011, svarandi til eina minni útreiðslu uppá 26,4 mió. kr. ella 17,3%. Orsøkin er serliga, at ætlað er við fallandi útreiðslum til netvirksemið, og viðlíkahaldsarbeiðir fyri nøkur av framleiðsluverkunum eru útsett til 2013. Hinvegin fer ódnarveðrið veturin 2011/2012 at føra við sær øktar útreiðslur til ábøtur á net og nýgerð av vindmyllum felagsins í Neshaga.
Oljuútreiðslurnar eru í fíggjarætlan felagsins fyri 2012 mettar at verða 134,5 mió. kr. Men við støði í oljuprísinum í fyrsta ársfjórðingi 2012 kann roknast við, at oljuútreiðslurnar verða umleið 15 til 20 mió. kr. hægri enn upprunaliga ætlað.

Ætlað er við 74,2 mió. kr. í úrsliti av vanligum rakstri í 2012. Hetta er áðrenn sparingina uppá 10 mió. kr., sum felagið skal fremja í 2012. Ætlað er við avskrivingum uppá 68,2 mió. kr. og rentuútreiðslum netto uppá 22,3 mió. kr. Øktu rentuútreiðslurnar stava frá øktari skuld hjá felagnum til at fíggja rakstur og íløgur.

Við einum mettum halli uppá 6,3 mió. kr. fyri 2012 verður gjaldførisbroytingin frá rakstrinum 62 mió. kr., og eftir at avdráttir uppá 20,7 mió. kr. eru goldnir, verða 41,3 mió. kr. eftir til sjálvfíggingina av rakstri og íløgum felagsins. Tá er ikki roknað við broytingum í rakstrarpeningi. Hetta er munandi meiri enn undanfarna ár.

Skal felagið framhaldandi gera neyðugar íløgur fyri at menna og viðlíkahalda net og framleiðsluverk, eins og at fremja íløgur í útbygging av varandi orkukeldum, er neyðugt, at felagið hevur eina nøktandi sjálvfígging frá rakstrinum.

Fyri at felagið skal kunna verða ført fyri at halda eitt nøktandi gjaldføri, eins og at útvega fígging frá lánveitarum til tær stóru íløgurnar, sum standa fyri framman komandi árini, er neyðugt, at felagið fær javnvág í raksturin, og at felagið hevur eitt nøktandi rakstrarúrslit hareftir.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag hevur felagið verið fyri óhappi á tveimum av vindmyllum felagsins. Hesar báðar vindmyllur er vorðnar vrak og tí ikki førar fyri at framleiða elmegi.

Felagið er í løtuni í ferð við at viðgera og kanna, hvør loysnin skal verða í sambandi við at endurskapa elframleiðsluna. Møguleiki er fyri at seta upp líknandi myllur, sum fórust í vindinum ella at seta nýggjari og framkomnari myllur upp í staðin. Tó kann væntast, at felagið fær eitt ávíst tap av hesum óhappum, sjálvt um felagið er tryggjað móti skaðum av slíkum slag.

# Rakstrarroknskapur

| | Nota | 2011 DKK | *2010 t. DKK* |
|---|---|---|---|
| **Nettoumsetningur** | 1 | **316.392.690** | **278.263** |
| Oljuútreiðslur | 2 | -142.640.371 | *-125.258* |
| Tilfar og tænastuveitingar | 3 | -90.289.592 | *-79.922* |
| **Bruttovinningur** | | **83.462.727** | ***73.083*** |
| | | | |
| Starvsfólkaútreiðslur | 4 | -62.576.236 | *-65.061* |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | | **20.886.491** | ***8.021*** |
| | | | |
| Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | | -55.822.669 | *-55.665* |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **-34.936.178** | ***-47.644*** |
| | | | |
| Fíggjarinntøkur | | 505.687 | *685* |
| Fíggjarútreiðslur | 5 | -14.959.521 | *-10.825* |
| **Fíggjarpostar tilsamans** | | **-14.453.834** | ***-10.139*** |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **-49.390.012** | ***-57.783*** |
| | | | |
| Skattur av ársúrsliti | 6 | 0 | *0* |
| **Ársúrslit** | | **-49.390.012** | ***-57.783*** |
| | | | |
| **Uppskot til býti av úrsliti:** | | | |
| Úrslit | | -49.390.012 | *-57.783* |
| Regulering til primo | | 2.534.565 | *1.351* |
| Flutt úrslit, primo | | 884.991.155 | *941.423* |
| **Til nýtslu** | | **838.135.708** | ***884.991*** |
| | | | |
| **Skotið verður upp at býta upphæddina soleiðis:** | | | |
| Flutt úrslit | | 838.135.708 | *884.991* |
| **Tilsamans** | | **838.135.708** | ***884.991*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| AKTIV | Nota | 31.12.11 DKK | *31.12.10 t. DKK* |
|---|---|---|---|
| Framleiðsluvirkir | 7 | 539.062.909 | *569.761* |
| Býtisvirkir | 7 | 373.226.403 | *376.128* |
| Bygningar og jarðarøkir | 7 | 37.243.022 | *38.267* |
| Rakstrargøgn | 7 | 7.762.709 | *8.988* |
| Íløguarbeiði í gerð | | 125.082.447 | *64.384* |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | **1.082.377.490** | ***1.057.528*** |
| | | | |
| Kapitalpartar í assosieraðum virkjum | 8 | 2.850.000 | *2.850* |
| **Fíggjarlig støðisogn tilsamans** | | **2.850.000** | ***2.850*** |
| **Støðisogn tilsamans** | | **1.085.227.490** | ***1.060.378*** |
| | | | |
| Olja | | 38.787.135 | *38.483* |
| Tilfar | | 11.321.099 | *11.734* |
| **Vørugoymslur tilsamans** | | **50.108.234** | ***50.217*** |
| | | | |
| Vøru- og tænastuáogn | 9 | 42.340.297 | *36.372* |
| Onnur áogn | | 5.199.715 | *7.347* |
| Tíðaravmarkingar | | 4.002.434 | *4.097* |
| | | | |
| **Áogn tilsamans** | | **51.542.446** | ***47.816*** |
| **Tøkur peningur** | | **56.886.927** | ***42.144*** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **158.537.607** | ***140.176*** |
| **Aktiv tilsamans** | | **1.243.765.097** | ***1.200.554*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| PASSIV | Nota | 31.12.11 DKK | *31.12.10 DKK* |
|---|---|---|---|
| Innskot | 10,16 | 4.139.875 | *4.140* |
| Flutt úrslit | 10,16 | 838.135.707 | *884.991* |
| **EGINOGN TILSAMANS** | | **842.275.582** | ***889.131*** |
| | | | |
| Avsetingar til eftirløn og líknandi skyldur | | 18.031.268 | *18.731* |
| Avsetingar til útsettan skatt | 11 | 0 | *0* |
| Aðrar avsetingar | | 1.001.129 | *0* |
| **Avsetingar tilsamans** | | **19.032.397** | ***18.731*** |
| | | | |
| Skuld til peningastovnar | 12 | 283.647.141 | *202.121* |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **283.647.141** | ***202.121*** |
| | | | |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 12 | 15.360.000 | *15.859* |
| Skuld til peningastovnar | | 27.587.468 | *0* |
| Móttikin frammanundangjøld frá kundum | | 22.504.458 | *20.271* |
| Vøru- og tænastuskuld | | 24.724.978 | 48.484 |
| Partafelagsskattur | 13 | 0 | *0* |
| Onnur skuld | | 186.823 | *5.958* |
| Tíðaravmarkingar | | 8.446.250 | |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **98.809.977** | ***90.572*** |
| | | | |
| **SKULD TILSAMANS** | | **382.457.118** | ***292.693*** |
| **PASSIV TILSAMANS** | | **1.243.765.097** | ***1.200.554*** |
| | | | |
| Veðsetingar og aðrar skyldur | 14 | | |

# Peningastreymsuppgerð

| | Nota | 2011 DKK | *2010 DKK* |
|---|---|---|---|
| **Ársúrslit** | | **-49.390.012** | ***-57.783*** |
| Reguleringar | 15 | 70.276.503 | *65.761* |
| Broyting í rakstrarpeningi: | | | |
| Vørugoymslur | | 108.477 | *-20.548* |
| Áogn | | -3.726.906 | *-2.533* |
| Vøru- og tænastuskuld | | -23.759.303 | *33.938* |
| Onnur rakstrarskuld | | 5.210.648 | *0* |
| **Peningastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar** | | **-1.280.593** | **18.835** |
| Móttiknar rentuinntøkur og líknandi inntøkur | | 505.687 | *685* |
| Goldin rentukostnaður og líknandi kostnaðir | | -14.959.521 | *-8.699* |
| Javning primo | | 2.534.565 | *1.351* |
| **Peningastreymar frá rakstrinum** | | **-13.199.863** | **12.172** |
| Keyp av materiellari støðisogn | | -19.972.955 | *-27.264* |
| Broyting arbeiði í gerð | | -60.698.845 | *-51.562* |
| **Peningastreymar frá íløgum** | | **-80.671.800** | ***-78.826*** |
| Lántøka | | 100.000.000 | *90.000* |
| Avdráttir uppá langfreistaða skuld | | -18.972.495 | *-17.945* |
| Trekk uppá kassakreditt (max. 33 mió.) | | 27.587.468 | *0* |
| **Peningastreymar frá fígging** | | **108.614.973** | **72.055** |
| **Samlaðir peningastreymar í árinum** | | **14.743.310** | **5.401** |
| Tøkur peningur við ársbyrjan | | 42.143.617 | *36.772* |
| **Tøkur peningur við árslok** | | **56.886.927** | **42.144** |
| Tøkur peningur við árslok verður útgreinaður soleiðis: | | | |
| Tøkur peningur | | 56.886.927 | *42.144* |
| **Tilsamans** | | **56.886.927** | **42.144** |

# Virkisbýti, framleiðsla og net

| RAKSTUR tkr. | Framleiðsla | 2011 Net | Tilsamans | Framleiðsla | *2010* Net | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | 301.698.840 | 14.693.850 | 316.392.690 | *238.266* | *39.997* | *278.263* |
| Oljuútreiðslur | -142.306.499 | -333.872 | -142.640.371 | *-124.731* | *-527* | *-125.258* |
| Tilfar og tænastuveitingar | -58.674.498 | -31.615.094 | -90.289.592 | *-46.416* | *-33.507* | *-79.923* |
| Lønir | -32.134.966 | -30.441.270 | -62.576.236 | *-31.103* | *-33.958* | *-65.061* |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | 68.582.877 | -47.696.386 | 20.886.491 | *36.016* | *-27.995* | *8.021* |
| Avskrivingar | -31.538.754 | -24.283.915 | -55.822.669 | *-31.306* | *-24.359* | *-55.665* |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | 37.044.123 | -71.980.301 | -34.936.178 | *4.710* | *-52.354* | *-47.644* |
| Fíggjarpostar, netto | -10.809.778 | -3.644.056 | -14.453.834 | *-4.710* | *-5.429* | *-10.139* |
| **Úrslit áðrenn skatt** | 26.234.345 | -75.624.357 | -49.390.012 | - | *-57.783* | *-57.783* |
| Skattur | - | - | - | - | - | - |
| **Ársúrslit** | **26.234.345** | **-75.624.357** | **-49.390.012** | **-** | ***-57.783*** | ***-57.783*** |

## FÍGGJARSTØÐA

| tkr. | 2011 Framleiðsla | 2011 Net | 2011 Tilsamans | 2010 Framleiðsla | 2010 Net | 2010 Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **AKTIV** | | | | | | |
| Fastar ognir, elverk v.m. | 543.296.589 | 413.998.455 | 957.295.044 | *574.157* | *418.988* | *993.145* |
| Íløguarbeiði í gerð | 121.478.051 | 3.604.395 | 125.082.446 | *54.357* | *10.027* | *64.384* |
| **Materiell støðisogn** | **664.774.640** | **-417.602.850** | **1.082.377.490** | ***628.514*** | ***429.015*** | ***1.057.529*** |
| Partapeningur | - | 2.850.000 | 2.850.000 | - | *2.850* | *2.850* |
| **Fíggjarlig støðisogn** | **-** | **2.850.000** | **2.850.000** | **-** | ***2.850*** | ***2.850*** |
| **STØÐISOGN TILSAMANS** | **664.774.640** | **420.452.850** | **1.085.227.490** | ***628.514*** | ***431.865*** | ***1.060.379*** |
| Olja á goymslu | 38.787.135 | - | 38.787.135 | *38.483* | - | *38.483* |
| Tilfar á goymslu | - | 11.321.099 | 11.321.099 | - | *11.714* | *11.714* |
| Arbeiði í gerð | - | - | - | - | *19* | *19* |
| **Goymslur tilsamans** | **38.787.135** | **11.321.099** | **50.108.234** | ***38.483*** | ***11.733*** | ***50.216*** |
| Elskuldarar | - | 35.247.039 | 35.247.039 | - | *32.144* | *32.144* |
| Skuldarar aðrir | - | 6.987.293 | 6.987.293 | - | *4.228* | *4.228* |
| Onnur áogn | - | 9.308.114 | 9.308.114 | - | *11.444* | *11.444* |
| **Skuldarar tilsamans** | **-** | **51.542.446** | **51.542.446** | **-** | ***47.816*** | ***47.816*** |
| **Tøkur peningur** | - | 56.886.927 | 56.886.927 | - | *42.143* | *42.143* |
| **OGN Í UMFERÐ TILSAMANS** | **38.787.135** | **119.750.472** | **158.537.607** | **38.483** | **101.692** | **140.175** |
| **AKTIV TILSAMANS** | **703.561.775** | **540.203.322** | **1.243.765.097** | **666.997** | **533.557** | **1.200.554** |
| **PASSIV** | | | | | | |
| Innskot | - | 4.139.875 | 4.139.875 | - | *4.140* | *4.140* |
| Kapitalkonto | 469.508.384 | 368.627.323 | 838.135.707 | *449.017* | *435.974* | *884.991* |
| **Eginogn tilsamans** | **469.508.384** | **372.767.198** | **842.275.582** | ***449.017*** | ***440.114*** | ***889.131*** |
| Eftirløn | - | 18.031.268 | 18.031.268 | - | *18.731* | *18.731* |
| Útsettur skattur | - | - | - | - | - | - |
| Aðrar avsetingar | - | 1.001.129 | 1.001.129 | - | - | - |
| **Avsetingar tilsamans** | **-** | **19.032.397** | **19.032.397** | **-** | ***18.731*** | ***18.731*** |
| Lán | 229.007.141 | 70.000.000 | 299.007.391 | *217.980* | - | *217.980* |
| Bankaskuld | - | 27.587.468 | 27.587.468 | - | - | - |
| Elognarar | - | 22.504.458 | 22.504.458 | - | *20.271* | *20.271* |
| Aðrir ognarnar | - | 24.724.978 | 24.724.978 | - | *48.484* | *48.484* |
| Onnur skuld | - | 186.823 | 186.823 | - | *5.957* | *5.957* |
| Tíðaravmarkingar | 5.046.250 | 3.400.000 | 8.446.250 | - | - | - |
| **Skuld tilsamans** | **234.053.391** | **148.403.727** | **382.457.118** | ***217.980*** | ***74.712*** | ***292.692*** |
| **PASSIV TILSAMANS** | **703.561.775** | **540.203.322** | **1.243.765.097** | ***666.997*** | ***533.557*** | ***1.200.554*** |

## INNTØKUBÝTI

| | Framleiðsla | Net | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Søla | - | 319.197.094 | 319.197.094 |
| Eginramleiðsla og keyp av streymi | 283.393.092 | -286.197.496 | -2.804.404 |
| Netábyrgd og netumsiting | 18.305.748 | -18.305.748 | - |
| **Framleiðsluúrslit** | **301.698.840** | **14.693.850** | **316.392.690** |

## RAKSTRARBÝTI FRAMLEIÐSLA

| | Inntøkur | Olja | Tilfar | Lønir | Avskriving | Rentur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Termisk | 205.157.142 | -140.314.593 | -20.446.282 | -22.956.154 | -15.974.781 | - | 5.465.332 |
| Vatn | 93.493.878 | -1.991.905 | -36.991.573 | -8.965.113 | -14.406.296 | -10.809.778 | 20.329.213 |
| Vind | 3.047.820 | - | -1.236.643 | -213.699 | -1.157.678 | - | 439.800 |
| **Framleiðsluúrslit** | **301.698.840** | **-142.306.498** | **-58.674.498** | **-32.134.966** | **-31.538.755** | **-10.809.778** | **26.234.345** |

## RAKSTRARBÝTI NET

| | Inntøkur | Olja | Tilfar | Lønir | Avskriving | Rentur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Net uttan fyrisiting | 1.524.872 | -252.604 | -15.098.621 | -20.420.202 | -22.299.018 | - | -56.545.573 |
| Fyrisiting | 13.168.979 | -81.268 | -16.516.474 | -10.021.068 | 1.984.897 | -3.644.056 | -19.078.784 |
| **Netúrslit** | **14.693.851** | **333.872** | **-31.615.095** | **-30.441.270** | **-24.283.915** | **-3.644.056** | **-75.624.357** |

# Nýttur roknskaparháttur

## ALMENT

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í flokki C.

Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanlíkningartøl fyri undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og máting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt sum tær verða forvunnar, herundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allar útreiðslur, herav av- og niðurskrivingar innroknaðar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virðið av ognini verður mett álítandi. Skuld verður innroknað í fíggjarstøðuna, tá hon er sannlík og kann mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað fyri kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og máting verður atlit tikið at væntaðum tapum og váðum, ið vísa seg, áðrenn ársroknskapurin er liðugur, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## GJALDOYRA

Ársroknskapurin er gjørdur í donskum krónum.

Flytingar í fremmandum gjaldoyra í árinum verða umroknaðar til kursin tann dagin, flytingin er gjørd. Kurstryggjaðar flytingar verða tó upptiknar til tann tryggjaða kursin. Áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra verður umroknað til danskar krónur eftir kursinum við roknskaparlok, tó undantikið kurstryggjaðar upphæddir, sum verða upptiknar fyri tann tryggjaða kursin. Staðfestur og óstaðfestur kursvinningur ella -tap verður tikið við í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Nettoumsetningur

Inntøkur við sølu av vørum verða tiknar við í rakstrarroknskapinum, um veiting er farin fram, og keyparin hevur yvirtikið váðan í roknskaparárinum. Nettoumsetningurin verður uppgjørdur uttan MVG.

### Aðrir kostnaðir

Her er talan um kostnað í sambandi við keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum, umframt annan fyrisitingarkostnað.

### Rakstrarbýti, framleiðsla og net

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni uppá 5% av ognunum hjá einstøku elverkunum er innroknaður. Roknaði vinningurin uppá 5% er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkreditlánsbrøvum, sum verður at samanbera við langfreistaðu íløgurnar hjá elverkunum.

Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum stendst av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi umframt kostnaðin fyri netábyrgd. Hesin kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðin fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnaðin fyri netábyrgd annars.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum, frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum. Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy er tann sami sum fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum.

Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er mettur til at verða 5% av samlaða

rakstrarkostnaðinum, íroknað avskrivingar hjá Sunds- og Vágsverkinum. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkum kring landið. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd. Restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

## Avskrivingar

Avskriving av materiellari støðisogn verður løgd soleiðis til rættis, at fram fer ein skipað avskriving av støðisognini grundað á eina meting av brúkstíðini. Felagið hevur brúkt niðanfyri standandi brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Framleiðslu- og býtisvirkir | 35 - 50 ár | 0% |
| Bygningar | 50 ár | 0% |
| Rakstrargøgn og innbúgv | 3 - 5 ár | 0% |

Grundøki verða ikki avskrivað.

## Fíggjarpostar

Undir fíggjarpostar koma rentuinntøkur, rentuútreiðslur, staðfestur og óstaðfestur kursvinningur og –tap av virðisbrøvum, skuld og flyting í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum aktivum og skyldum umframt rentuútreiðslur. Fíggjarinntøkur og fíggjarútreiðslur verða upptiknar við teimum upphæddum, sum hoyra roknskaparárinum til.

Vinningsbýti frá kapitalpørtum verður inntøkuført í roknskaparárinum, tá ið tað verður fráboðað.

## Skattur

Skattur í árinum, sum fevnir um aktuellan skatt fyri árið umframt broytingar í útsettum skatti, verður førdur í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur úrslitinum í árinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina, verður bókaður á eginognina.

## FÍGGJARSTØÐA

## Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður upptikin í fíggjarstøðuni fyri kostprís frádrigið samanløgdu avskrivingarnar ella til endurvinningarvirðið, har hetta er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Kostprísur umfatar útveganarvirði og beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur, frá tí ognin varð útvegað, til ognin er klár at taka í nýtslu. Rentur av lánum, tikin til at fíggja framleiðsluna, verða ikki íroknað kostprísin.

Vinningur ella tap við avhending av materiellari støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum søluprísin frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virðið, tá ið støðisognin verður seld.

## Fíggjarlig støðisogn

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða upptiknir í fíggjarstøðuni til kostprís, frádrigið møguligari niðurskriving.

## Niðurskriving av støðisognum

Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending, um tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Er ábending um virðisminkan, verður gjørd ein niðurskrivingarroynd av hvørji einstakari ogn og av hvørjum ognarbólki. Virðisminkaðu ognirnar verða niðurskrivaðar til endurvinningarvirðið, um hetta virðið er lægri enn roknskaparliga virðið.

Endurvinningarvirðið er tað hægra av nettosøluprísinum og kapitalvirðinum. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettoinntøkunum frá nýtsluni av ognunum.

## Vørugoymsla

Vørugoymsla verður virðisásett til kostprís eftir FIFO-háttinum ella nettosøluvirðinum, har hetta er lægri. Kostprísur fyri rávørur, hjálpitilfar og handilsvørur verður gjørdur upp sum keypsprísur umframt kostnað, sum er beinleiðis knýttur at keypinum.

Kostprísur fyri lidnar vørur og fyri vørur undir framleiðslu verður gjørdur upp sum virðið av beinleiðis brúktum tilfari og lønum. Rentur av lánum, tikin til at fíggja framleiðsluna, verða ikki íroknaðar kostprísin.

## Áogn

Áogn verður virðisásett við frádrátti av møguligum tapsvanda grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

Niðurskriving av møguligum tapi verður gjørd upp grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

## Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru upptiknar undir ogn, umfata goldnar útreiðslur, sum viðvíkja næsta roknskaparári.

## Avsetingar

Avsetingar til pensjónir verða upptiknar í fíggjarstøðuni við støði í útrokningum frá aktuari, um so er, at skyldurnar ikki eru tryggjaðar.

Aðrar avsetingar umfata væntaðar

skyldur til garantiskyldur, arbeiði í gerð, umskipanir v.m., og verða upptiknar, tá ið felagið við roknskaparlok hevur eina slíka skyldu. Avsetingin verður upptikin eftir eini meting um dagsvirði av skylduni.

## Aktuellur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virði av aktivum og skyldum. Útsettur skattur verður mátaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum.

Útsett skattaaktiv, her undir skattavirðið av framfluttum skatligum hallum, verða mátað til tað virði, aktivið kann væntast at kunna realiserast fyri.

## Skuld

Langfreistað skuld verður upptikin í fíggjarstøðuni fyri kostprís, tá ið skuldin verður stovnað. Skuldin verður hereftir upptikin við tí virði, sum hon er niðurskrivað til. Kurstap og lánsútreiðslur verða býttar sundur yvir afturgjaldstíðina við støði í roknaðu effektivu rentuni tann dagin, skuldin varð stovnað.

Stuttfreistað skuld verður somuleiðis tikin við fyri tann kostprís, sum hon er niðurgoldin til. Hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

## PENINGASTREYMSUPPGERÐ

Peningastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir peningastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broytingum í peningastreymum og tøkum peningi við ársbyrjan og enda.

Peningastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broytingum í rakstrarkapitali og goldnum skatti.

Peningastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevndu postum.

Peningastreymar frá fígging umfata fígging frá eigara, goldnum vinningsbýti til eigara og upptøku av láni og avdrátti av langfreistaðari skuld, umframt trekk uppá kassakredittar.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er kassapeningur og innistandandi í peningastovnum.

# Notur

## 1. NETTOUMSETNINGUR

| | | |
|---|---|---|
| kWh gjald o.a. | 296.388.398 | *261.845* |
| Fast gjald | 16.507.466 | *16.105* |
| Íbinding | 1.332.800 | *1.579* |
| Ómaksgjøld, áminning og onnur søla | 4.968.430 | *1.287* |
| Keyp av vindorku v.m. | -2.804.404 | *-2.553* |
| **Tilsamans** | **316.392.690** | ***278.263*** |

## 2. OLJUÚTREIÐSLUR

| | | |
|---|---|---|
| Gassolja | 6.410.245 | *9.065* |
| Tungolja | 129.853.160 | *109.807* |
| Smyrjiolja | 6.376.966 | *6.386* |
| **Tilsamans** | **142.640.371** | ***125.258*** |

## 3. TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR

| | | |
|---|---|---|
| Linjur | 9.985.442 | *10.606* |
| Byrging, rør og tunlar | 8.174.538 | *10.493* |
| Tangar og umhvørvi | 443.220 | *220* |
| Maskinur | 25.882.122 | *15.108* |
| El og teknikk | 5.241.735 | *5.019* |
| Bygningar og lendi | 3.062.605 | *3.191* |
| Aðalfundur og nevnd | 773.475 | *253* |
| Kanning og ráðgeving | 12.717.075 | *8.912* |
| Kunningartøkni | 2.434.510 | *3.211* |
| Leiðsla og skrivstovuhald | 2.609.493 | *1.921* |
| Tap uppá skuldarar | 1.594.872 | *4.546* |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 1.010.089 | *606* |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 16.360.416 | *15.836* |
| **Tilsamans** | **90.289.592** | ***79.922*** |

### 4. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR

| | | |
|---|---|---|
| Lønir | 54.400.170 | *57.120* |
| Pensjónir | 6.292.807 | *6.010* |
| Almenn gjøld | 1.883.259 | *1.932* |
| **Tilsamans** | **62.576.236** | ***65.061*** |
| | | |
| Starvsfólk við høvuðsinntøku frá SEV | 138 | *146* |
| Miðaltal av starvsfólkum | 166 | *175* |

### 5. FÍGGJARÚTREIÐSLUR

| | | |
|---|---|---|
| Rentur, lán og bankaskuld v.m. | 14.959.521 | *10.825* |
| **Tilsamans** | **14.959.521** | ***10.825*** |

### 6. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI

| | | |
|---|---|---|
| Partafelagsskattur | 0 | *0* |
| Javning av útsettum skatti | 0 | *0* |
| **Tilsamans** | **0** | ***0*** |

### 7. MATERIELL STØÐISOGN

| Upphædd í DKK | Framleiðsluvirkir | Býtisvirkir | Bygningar og jarðarøkir | Rakstrargøgn |
|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 1.272.737.109 | 738.657.899 | 59.493.221 | 94.768.959 |
| Tilgongd í árinum, netto | 555.397 | 18.661.251 | 0 | 756.307 |
| Útveganarvirði ultimo | 1.273.292.506 | 757.319.150 | 59.493.221 | 95.525.266 |
| Av- og niðurskriving primo | -702.975.874 | -362.529.931 | -21.225.724 | -85.780.902 |
| Avskrivingar í árinum | -31.253.723 | -21.562.816 | -1.024.475 | -1.981.655 |
| Av- og niðurskriving ultimo | -734.229.597 | -384.092.747 | -22.250.199 | -87.762.557 |
| Roknskaparligt virði ultimo | 539.062.909 | 373.226.403 | 37.243.022 | 7.762.709 |

| 8. KAPITALPARTAR Í ASSOSIERAÐUM VIRKJUM | 31.12.11 DKK | *31.12.10 t. DKK* |
|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 2.850.000 | 2.850 |
| | | |
| Útveganarvirði ultimo | 2.850.000 | 2.850 |
| Roknskaparligt virði ultimo | 2.850.000 | 2.850 |

**Assosierað virkir**

| Navn og heimstaður | Ognarpartur | Eginogn | Ársúrslit | Innroknað virði |
|---|---|---|---|---|
| P/F Fjarhitafelagið | 50% | 41.318.818 | 3.733.986 | 2.750.000 |
| P/F FDS | 20% | 375.044 | -137.026 | 100.000 |

Eingin roknskapur hjá Fjarhitafelagnum fyriliggur fyri 2011. Upplýstu tølini eru fyri 2010.

| 9. VØRU- OG TÆNASTUÁOGN | | |
|---|---|---|
| Elskuldarar | 38.097.039 | 34.294 |
| Aðrir skuldarar | 7.443.258 | 4.278 |
| Niðurskrivað uppá áogn | -3.200.000 | -2.200 |
| Tilsamans | 42.340.297 | 36.372 |

### 10. EGINOGN

| Upphædd í DKK | Innskot | Flutt úrslit |
|---|---|---|
| *Eginognaruppgerð 01.01.10 - 31.12.10* | | |
| Salda pr. 31.12.09 | 4.139.875 | 941.423.298 |
| Javning til primo | 0 | 1.350.544 |
| | | |
| Salda pr. 01.01.10 | 4.139.875 | 942.773.842 |
| Flutt úrslit | 0 | -57.782.687 |
| **Salda pr. 31.12.10** | **4.139.875** | **884.991.155** |
| | | |
| *Eginognaruppgerð 01.01.11 - 31.12.11* | | |
| Salda pr. 31.12.10 | 4.139.875 | 884.991.155 |
| Regulering til primo | 0 | 2.534.565 |
| Flutt úrslit | 0 | -49.390.012 |
| **Salda pr. 31.12.11** | **4.139.875** | **838.135.707** |

| 11. AVSETINGAR TIL ÚTSETTAN SKATT | 31.12.11<br>DKK | *31.12.11*<br>*t.DKK* |
|---|---|---|
| Avsetingar til útsettan skatt primo | 0 | 0 |
| Útsettur skattur í árinum | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** |

### 12. SKULD

| | Avdráttur fyrsta árið DKK | Restskuld eftir 5 ár DKK | Skuld tilsamans 31.12.11 DKK | Skuld tilsamans 31.12.10 DKK |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til fíggjarstovnar | 15.360.000 | 220.526.667 | 299.007.141 | 217.979.636 |
| **Tilsamans** | **15.360.000** | **220.526.667** | **299.007.141** | **217.979.636** |

Lán frá íleggingargrunninum á 180 mió. kr. er veitt til fígging av „Eiði 2 Suður“ verkætlanini og 3. turbinuni á Eiðisverkinum. Hesi arbeiði eru í gerð, og lánið verður hækkað til 218 mió. kr. í 2012. Eftir avtaluni við Íleggingargrunnin verður afturgjaldstíðin 14 ár, og afturgjaldingin skal byrja í 2014.

Lánið frá BankNordik uppá 70 mió. kr. er veitt til fígging av rakstri felagsins. Eftir avtalu við BankNordik verður afturgjaldstíðin 18 ár, og afturgjaldingin skal byrja í 2014.

| 13. SKYLDUGUR SKATTUR | 31.12.11 DKK | *31.12.10 t.DKK* |
|---|---|---|
| Skyldugur skattur primo | 0 | 0 |
| Goldin skattur í árinum | 0 | 0 |
| | | |
| Skyldugur skattur frá undanfarnum árum | 0 | 0 |
| Roknaður felagsskattur fyri inniverandi ár | 0 | 0 |
| Tilsamans | 0 | 0 |

### 14. VEÐSETINGAR OG AÐRAR SKYLDUR

Ognir felagsins eru veðsettar fyri tilsamans 410 mió. kr.
Ongar aðrar skyldur hvíla á felagnum.

| 15. REGULERINGAR | 2011 DKK | *2010 t. DKK* |
|---|---|---|
| Avskrivingar | 55.822.669 | 55.665 |
| Rentuinntøkur og líknandi inntøkur | -505.687 | -685 |
| Rentukostnaðir og líknandi kostnaðir | 14.959.521 | 8.699 |
| Niðurskriving av fíggjarligari støðisogn | 0 | 2.082 |
| Tilsamans | 70.276.503 | 65.761 |

| 16. Sundurgreining av eginogn | Kommunuinnskot DKK | Eginogn 2011 DKK | Eginogn 2010 t. DKK |
|---|---|---|---|
| Eiði | 78.625 | 11.637.439 | 12.280 |
| Eystur | 146.500 | 34.268.028 | 36.180 |
| Fámjin | 23.125 | 1.871.843 | 1.976 |
| Fugjafjørður | 136.250 | 26.533.271 | 28.000 |
| Fugloy | 17.500 | 658.611 | 695 |
| Hov | 22.875 | 2.081.763 | 2.196 |
| Húsar | 17.500 | 939.796 | 988 |
| Húsavík | 25.125 | 2.162.610 | 2.288 |
| Hvalba | 103.625 | 12.344.171 | 13.030 |
| Hvannasund | 36.375 | 7.389.192 | 7.796 |
| Klaksvík | 520.250 | 83.438.356 | 88.135 |
| Kunoy | 12.625 | 2.437.118 | 2.562 |
| Kvívík | 59.125 | 10.159.386 | 10.724 |
| Nes/Runavík | 332.133 | 88.416.133 | 93.278 |
| Porkeri | 51.000 | 5.442.209 | 5.746 |
| Sandur | 72.250 | 9.681.947 | 10.193 |
| Sjógv | 92.875 | 16.643.445 | 17.569 |
| Skálavík | 30.750 | 2.808.733 | 2.965 |
| Skopun | 71.000 | 8.150.826 | 8.601 |
| Skúvoy | 17.875 | 780.903 | 824 |
| Sørvágur | 127.500 | 19.552.398 | 20.625 |
| Sumba | 81.375 | 6.301.158 | 6.643 |
| Sunda | 177.367 | 28.757.355 | 30.379 |
| Tórshavn | 1.092.500 | 345.521.076 | 364.748 |
| Tvøroyri | 255.250 | 29.941.942 | 31.587 |
| Vága | 169.625 | 33.595.751 | 35.503 |
| Vágs | 218.375 | 23.878.484 | 25.218 |
| Vestmanna | 125.250 | 20.848.208 | 22.034 |
| Viðareiði | 25.250 | 6.033.431 | 6.369 |
| **Tilsamans** | **4.139.875** | **842.275.582** | **889.131** |

# Framleiðslu-roknskapur 2011

# Elfelagið SEV

## Framleiðsluroknskapur fyri 2011

### Innihald


Upplýsingar um felagið v.m. . . . . . 62
Leiðsluátekning . . . . . . 62
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . 64
Høvuðs- og lyklatøl . . . . . . 65-66
Leiðslufrágreiðing . . . . . . 67-70
Rakstrarroknskapur . . . . . . 71
Fíggjarstøða . . . . . . 72-73
Kapitalfrágreiðing . . . . . . 74
Nýttur roknskaparháttur . . . . . . 75-76
Notur . . . . . . 77-82


### Felagið

Elfelagið SEV
Landavegur 92
FO-100 Tórshavn
Telefon: 346800
Telefax: 346801
Heimasíða: www.sev.fo
Heimstaður: Tórshavn
Roknskaparár: 01.01 - 31.12

### Nevnd

Jákup Suni Lauritsen, formaður
Kári E. Jacobsen, næstformaður
Marin Katrina Frýdal
Steinbjørn O. Jacobsen
Niclas Hentze
Pauli T. Petersen
Bødvar Hjartvarsson

### Leiðsla

Hákun Djurhuus, stjóri
Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisitingina
Finn Jakobsen, deildarstjóri fyri tøkni

### Grannskoðan

NOTA
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

### Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram framleiðsluroknskap felagsins fyri roknskaparárið 01.01.11 - 31.12.11.

Framleiðsluroknskapurin er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini og viðtøkum felagsins.

Tað er okkara fatan, at framleiðsluroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og úrslitinum viðvíkjandi virksemi felagsins.

Samstundis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin greiðir rættvísandi frá teimum viðurskiftum, sum frágreiðingin fevnir um.

Tórshavn, tann 3. apríl 2012

## Nevnd:

| | | |
|---|---|---|
| *Jákup Suni Lauritsen*<br>*formaður* | *Kári E. Jacobsen*<br>*næstformaður* | *Marin Katrina Frýdal* |
| *Steinbjørn O. Jacobsen* | *Niclas Hentze* | *Pauli T. Petersen* |
| *Bødvar Hjartvarsson* | | |

## Stjórn:

*Hákun Djurhuus*
*stjóri*

## Fíggjarleiðsla:

*Bogi Bendtsen*
*deildarstjóri fyri fyrisitingina*

# Átekning frá óheftum grannskoðara

Framleiðsluroknskapurin er gjørdur sum eitt ískoyti og útgreining til ársfrásøgnina hjá Elfelagnum SEV. Í sambandi við framleiðsluvirksemið skulu vit vátta, at tølini í framleiðsluroknskapinum fyri 2011 eru samsvarandi grannskoðaðu ársfrásøgnina fyri 2011 hjá Elfelagnum SEV

Grannskoðanin av ársroknskapinum hjá Elfelagnum SEV er endað, og roknskapurin hevur fingið eina átekning uttan fyrivarni ella supplerandi upplýsingar. Víst verður til síðurnar 5 – 6 í ársfrásøgnini hjá Elfelagnum SEV, har tann samlaða átekningin framgongur.

Tórshavn, tann 3. apríl 2012

**NOTA**

Løggilt grannskoðanarvirki P/F

*Hans Laksá*
*Løggildur grannskoðari*

*Jørmann Petersen*
*Løggildur grannskoðari*

# Høvuðs- og lyklatøl

## HØVUÐSTØL

| Upphæddir í tkr. | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| **Úrslit** | | |
| Nettoumsetningur | 301.699 | 238.266 |
| Indeks | 127 | 100 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskriving | 68.583 | 36.016 |
| Indeks | 190 | 100 |
| Úrslit av primerum rakstri (EBIT) | 37.044 | 4.710 |
| Indeks | 786 | 100 |
| Fíggjarpostar, netto | -10.810 | -4.710 |
| Indeks | 230 | 100 |
| Ársúrslit | 26.234 | 0 |
| | | |
| **Fíggjarstøða** | | |
| Aktiv tilsamans | 703.562 | 666.997 |
| Indeks | 105 | 100 |
| | | |
| Eginogn | 469.508 | 449.017 |
| Indeks | 105 | 100 |
| | | |
| **Peningastreymar** | | |
| Nettopeningastreymar frá: | | |
| Rakstri | 56,772 | |
| Íløgum | -67.800 | |
| Fígging | 11.028 | |
| **Peningastreymar í árinum** | **0** | |

## LYKLATØL

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| **Rentabilitetur** | | |
| Renting av egingogn | 5,7% | 0,0% |
| Ognarumferð | 0,43 | 0,36 |
| | | |
| **Soliditetur** | | |
| Eginognarpartur | 66,7% | 67,3% |
| | | |
| **Annað** | | |
| Starvsfólk við høvuðsinntøku frá SEV | 52 | 57 |
| Ársverk í miðal | 61 | 67 |

### Útrokning av lyklatølum

**Renting av eginogn**

$$\frac{\text{Úrslit av vanligum rakstri eftir skatt x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$$

**Ognarumferð**

$$\frac{\text{Nettoumsetningur}}{\text{Aktiv tilsamans}}$$

**Eginognarpartur**

$$\frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$$

Lyklatøl eru roknað út eftir tilmælum frá „Den Danske Finansanalytikerforening“. Ongi høvuðs- og lyklatøl fyrilggja fyri tíðina áðrenn 2010.

# Leiðslufrágreiðing

## Høvuðsvirksemið

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti fyri náttúru og umhvørvi.

Inniverandi roknskapur fyri framleiðsluvirksemið hjá SEV er ein partur av samlaða roknskapinum hjá SEV. Frágreiðingin fevnir um framleiðsluvirksemið hjá felagnum í tíðarskeiðinum 1. januar 2011 til 31. desember 2011.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum

Grundarlagið fyri uppgerð av inntøkunum hjá framleiðsluverkunum eins og ásetan av kostnaðinum fyri stýringina av elnetinum, rullandi máttinum, tøka máttinum og fyri netábyrgdini annars, eru núverandi skrásetingar út frá einum vanligum rakstrarári.

## Inntøkur

Inntøkurnar hjá framleiðsluverkunum skulu umfata kostnaðin hjá verkunum, umframt at roknaður verður ein vinningur av framleiðsluni. Roknaði vinningurin uppá 26,2 mió. kr. er ásettur til 5% av ognunum hjá einstøku framleiðsluverkunum. Vinningurin er ásettur við støði í avkastinum av langfreistaðum realkreditslánsbrøvum, sum kann samanberast við langfreistaðu íløgurnar hjá framleiðsluverkunum.

Samlaðu inntøkurnar fyri framleiðslupartin í 2011 gjørdust 301,7 mió. kr. Av hesum inntøkunum stóð Sundsverkið fyri 171,7 mió. kr. ella 56,9% og Vágsverkið fyri 27,1 mió. kr. ella 9,0%. Hetta svarar til, at tey bæði størstu oljuriknu framleiðsluverkini standa fyri eini inntøku uppá 198,8 mió. kr. ella 65,9%. Framleiðsluverkini í Vestmanna standa fyri eini inntøku uppá 37,3 mió. kr. ella 12,4%. Tó skal viðmerkjast, at verkini ikki hava framleitt elorku alt árið grundað á stórar umvælingar í 2011. Eiðisverkið stendur fyri 47,1 mió. kr. ella 15,6% av samlaðu framleiðsluni.

Rakstrarúrslitið fyri framleiðslupartin 2011 gjørdust eitt yvirskot uppá 26,2 mió. kr. móti einum úrsliti uppá 0,0 mió. kr. í 2010, harav úrslitið hjá Eiðisverkinum uppá 18,6 mió. kr. stendur fyri 71% av yvirskotinum.

Elframleiðslan máld í MWt fyri 2011 var 273.843 móti 280.323 MWt í 2010, ella ein minking uppá 6.480 MWt, svarandi til 2,3%.

Av teimum 273.843 MWt vóru 166.815 MWt framleiddir av oljuriknu verkunum, meðan 92.502 MWt vóru framleiddir við vatnorku og 14.526 MWt við vindi í 2011. Harav Sp/f Røkt stóð fyri einum parti. Til samanberingar vórðu í 2010 framleiddir 199.344 MWt av oljuriknu verkunum, soleiðis at framleiðslan av elmegi á teimum oljuriknu verkunum fall í 2011 við 16,3%. Elframleiðslan í 2010 við vatnorku var 67.395 MWt svarandi til, at framleiðslan av elmegi við vatnorku øktist við 37,3% í 2011. Eisini elframleiðslan við vindi øktist í 2011 við 6,9% mótvegis 2010, har framleiðslan var 13.584 MWt.

## Útreiðslur

Samlaðu útreiðslurnar í 2011 gjørdust 275,4 mió. kr., meðan samlaðu útreiðslurnar fyri 2010 gjørdust 238,2 mió. kr. svarandi til, at útreiðslurnar vuksu við 37,2 mió. kr. ella 15,6%. Rakstrarútreiðslurnar verða vanliga býttar í lønir til starvsfólk og tilfar- og tænastuveitingar. Fyri framleiðsluverkini eru oljuútreiðslurnar ein sera stórur partur av samlaðu útreiðslunum.

Útreiðslurnar til tilfar- og tænastuveitingar og lønir gjørdust 90,8 mió. kr., tilsvarandi útreiðslur fyri 2010 vóru 77,5 mió. kr., soleiðis at hesar í 2011 gjørdust 13,3 mió. kr. størri svarandi til 17,2%.

*Kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt*
Samlaðu útreiðslurnar hjá verkunum standast av kostnaðinum í sambandi við framleiðslu av elmegi umframt kostnaðinum fyri netábyrgd. Hesin kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðin fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnaðin fyri netábyrgd annars. Framleiðsluverkini selja sína framleiðslu av elmegi til netvirksemið, sum rindar fyri keypið umframt kostnaðin fyri ein part av netábyrgdini, sum verkini standa fyri.

*Kostnaður fyri stýring av elnetinum.*
Stýringin av elnetinum í Suðuroy fer fram á framleiðsluverkinum í Vági, meðan stýringin av elnetinum í restini av landinum fer fram á Fossáverkinum í Vestmanna.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum uppá 2,3

mió. kr. er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum eitt vanligt rakstrarár uppá 3 mió. kr., frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum uppá 0,7 mió. kr. Kostnaðurin fyri vanligan rakstur á verkinum er settur til at verða tann sami, sum tað kostar at reka Mýru- og Heygaverkið tilsamans, svarandi til 0,7 mió. kr. eitt vanligt rakstrarár. Sami kostnaður fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum er brúktur til kostnaðin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy, svarandi til 2,3 mió. kr.

*Kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt*
*Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er mettur til at verða 5% av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað avskrivingar av Sundsverkinum og Vágsverkinum, svarandi til ávikavist 8,4 mió. kr. og 1,3 mió. kr. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.*

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá felagnum av smáverkum kring landið, sum verða mett sum eyka verk ella tøkur máttur. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd, restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

*Kostnaður fyri netábyrgd samanumtikið*
Samlaður kostnaður fyri stýring av elnetinum í Føroyum er 4,6 mió. kr., meðan kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin á Sundsverkinum og Vágsverkinum er settur til 9,7 mió. kr. Kostnaðurin fyri veitingartrygdina v.m. frá øðrum verkum er 4,0 mió. kr. svarandi til, at samlaður kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og stýring av elnetinum er mettur til 18,3 mió. kr.

## Oljuútreiðslur

Oljuútreiðslurnar fyri 2011 gjørdust 142,3 mió. kr. Í fíggjarætlanini fyri 2011 vórðu oljuútreiðslurnar mettar til at verða 117,3 mió. kr., svarandi til at hesar vóru 25,0 mió. kr. ella 21,3% størri enn ætlað varð. Fyri 2010 gjørdust oljuútreiðslurnar 124,7 mió. kr.

Framleiðslan á oljuriknu verkunum fall við 32.529 MWt, svarandi til 16,3%, frá 199.344 MWt í 2010 til 166.815 MWt í 2011. Fallið í framleiðsluni á teimum oljuriknu verkunum bleiv mótsvarað við eini fallandi elnýtslu uppá 6.480 MWt, 25.107 MWt í meirframleiðslu av elmegi við vatni og 942 MWt í meirframleiðslu av elmegi við vindi.

Sostatt kann sigast, at økingin í oljuútreiðslunum stavar frá eini hækking í oljuprísunum í 2011. Um so var, at framleiðslan á oljuriknu verkunum ikki hevði fallið, høvdu oljuútreiðslurnar verið hægri. Oljuútreiðslurnar svara til 51,7% av kostnaðinum og avskrivingunum fyri 2011. Tí hevur tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið, um gongdin í oljuprísinum og kursurin á dollaranum verður munandi øðrvísi enn ætlað í fíggjarætlanini.

Nógv tann største parturin av oljuútreiðslunum uppá 142,3 mió. kr. stavaðu frá Sundsverkinum og Vágsverkinum, svarandi til ávikavist 124,4 mió. kr. og 14,8 mió. kr. ella 87,4% og 10,4%.

## Lønarútreiðslur

Lønarútreiðslurnar til framleiðsluvirksemið gjørdust 32,1 mió. kr. móti ætlaðu 26,3 mió. kr. ella ein hægri lønarútreiðsla uppá 5,8 mió. kr. stavandi frá eini meirnýtslu av lønum á teimum flestu verkunum grundað á nógvu umvælingar- og viðlíkahaldsarbeiði. Fyri 2010 vóru lønarútreiðslurnar 31,1 mió. kr. svarandi til eina lægri lønarútreiðslu uppá 1,0 mió. kr. í 2011 í mun til 2010 ella 3,2%.

Av samlaða lønarkostnaðinum uppá 32,1 mió. kr. stóð Sundsverkið fyri 15,4 mió. kr. ella umleið helvtini, meðan Vágsverkið hevði eina lønarútreiðslu uppá 5,4 mió. kr. svarandi til 16,8%. Lønarútreiðslurnar til Fossáverkið gjørdust 4,8 mió. kr. svarandi til 15%. At lønarútreiðslurnar til Fossáverkið og Vágsverkið eru á einum hægri støði enn framleiðslan tilskilar, er grundað á stýringina av elnetinum í meginøkinum og í Suðuroy. Henda kostnað fáa framleiðsluverkini endurrindaðan frá netpartinum.

Samanumtikið kann sigast, at lønarútreiðslurnar fyri oljuriknu verkini eru á einum væl hægri støði enn á teimum vatn- og vindorku riknu verkunum.

## Tilfar- og tænastuveitingar

Útreiðslur til tilfar- og tænastuveitingar til framleiðsluvirkir gjørdust 58,7 mió. kr. móti ætlaðu 46,1 mió. kr. svarandi til eina meirnýtslu uppá 12,6 mió. kr. Meirnýtslan stavar frá óvæntaðum eyka umvælingarkostnaði í sambandi við viðlíkahald og umvæling av framleiðsluverkunum, serliga Fossáverkinum, Eiðisverkinum og Sundsverkinum. Fyri 2010 vóru somu útreiðslur 46,4 mió. kr. svarandi til, at kostnaðurin á økinum gjørdust 12,3 mió. kr. størri í 2011 enn í 2010 ella 26,5%.

Kostnaðurin til tilfar- og tænastuveitingar á Sundsverkinum er 15,8

mió. kr. ella 26,9% av kostnaðinum fyri 2011. Sundsverkið og Vágsverkið hava vanliga ein væl hægri kostnað til tilfar- og tænastuveitingar móti tilsvarandi kostnaði hjá teimum vatn- og vindorku riknu verkunum. Tó hevur kostnaðurin fyri Fossáverkið og Heygaverkið í 2011 verið serliga høgur grundað á umfatandi umvælingar og viðlíkahaldsarbeiði í 2011. Kostnaðurin gjørdust ávikavist 12,9 mió. kr. og 15,1 mió. kr. ella 22,0% og 25,7% av samlaða kostnaðinum. Hetta merkir, at hesi bæði vatnorkuverkini stóðu fyri úti við helminginum av kostnaðinum í 2011.

## Fíggjarkostnaður

Rentuútreiðslurnar gjørdust 10,8 mió. kr. Rentuútreiðslurnar kunnu allar tilførast útbyggingini av Eiðisverkinum.

Felagið er partvíst viðkvæmt fyri broytingum í altjóða rentustøðinum, tí ein partur av skuldini hjá felagnum er upptikin við broytiligari rentu, meðan ein annar partur hevur fasta rentu, millum annað byggilánið til verkætlanina "Eiði 2", tá ið rentan skal endurskoðast við árslok 2013 í sambandi við umlegging av byggiláninum til langfreistað lán.

## Avskrivingar

Avskrivingarhátturin er frá 1. januar 2009 broyttur eftir boðum frá Elveitingareftirlitinum. Ognarvirðini eru munandi broytt frá 1. januar 2009, og avskrivingartíðirnar fyri flestu ognir eru samstundis eisini munandi longdar.
Hetta merkir tó ikki, at elprísurin uttan víðari kann lækka, ella umgangast kann at hækka hann, tí so verður einki gjaldførisavlop frá rakstrinum, sum skal tryggja eginfíggingina av ætlaðum íløgum. Raksturin skal geva avlop fyri at kunna gera íløgur í endurnýggingar á framleiðsluverkunum og útbygging av varandi orkukeldum.

Avskrivingarnar fyri 2011 gjørdust 31,5 mió. kr. Sundsverkið hevur avskrivað uppá ognir fyri 12,6 mió. kr. og Eiðisverkið fyri 12,4 mió. kr. svarandi til, at hesi bæði framleiðsluverkini hava avskrivað uppá ognir fyri 25 mió. kr. av tilsamans 31,5 mió. kr. ella 79,4%.

Gjørdar verða metingar av, tá ið fíggjarætlanin verður gjørd fyri komandi ár, hvørjar íløgur væntandi verða lidnar í árinum og harvið tiknar í nýtslu, og byrjað verður at avskriva uppá ognina. Munurin millum staðfestu og ætlaðu avskrivingarnar hevur støði í hesum metingum og veruligum staðfestingum, eins og íløgurnar vórðu nakað lægri enn ætlað.

## Serligir váðar

Framleiðsluparturin hevur avmarkaðan váða í sambandi við sølu av framleiðslu, tí bert netparturin er avtakari av elframleiðsluni hjá framleiðsluvirkseminum. Framleiðsluparturin er eisini viðkvæmur fyri broytingum í rentustøðinum, men hevur valt ikki at tryggja móti rentuváða við fíggjarligum amboðum ella líknandi. Fylgt verður væl við gongdini í rentustøðinum, og mett verður áhaldandi um, hvørt tað er ein fyrimunur at tryggja seg móti rentuváðanum.

Framleiðsluparturin er serliga viðkvæmur fyri broytingum í oljuprísinum og kursinum av dollarum, tí oljan verður keypt í dollarum. Prístryggjað (hedgað) er ikki móti broytingum í oljuprísinum, eins og dollarar ikki eru keyptir upp á termin. Í løtuni verður arbeitt við at eftirmeta núverandi mannagongd á økinum.

## Íløgur

Íløgurnar í materiella støðisogn vóru 67,8 mió. kr., sum niðanfyri standandi talva vísir.

Í fíggjarætlanini fyri 2011 er ætlað við íløgum fyri 96,1 mió. kr., meðan staðfestu íløgurnar fyri 2011 gjørdust 67,8 ella 28,3 mió. kr. minni enn ásett. Av hesi minni íløgu stendur Eiðisverkið fyri 10,5 mió. kr. Orsøkin er, at arbeiðið gongur seinri enn ætlað. Eisini eru 3,3 mió. kr. brúktar minni enn ætlað upp á Sundsverkið, eins og 8,0 mió. kr. ikki eru brúktar í sambandi við langtíðar íløguætlanina og vindmyllur.

## Gjaldførið

Gjaldførið er í løtuni ikki skilt sundur millum framleiðslu og net, men hetta verður gjørt í 2012. Í inniverandi roknskapi er gjaldførið hjá framleiðsluverkunum ásett til 0 mió. kr.,

| Íløgur | Staðfest 2011 | | Upprunaætlan 2011 | |
|---|---|---|---|---|
| | mió. kr. | prosent | mió. kr. | prosent |
| Eiðisverkið | 66,5 | 98,1 | 77,0 | 80,1 |
| Verkið í Botni | 0,5 | 0,7 | 0,0 | 0,0 |
| Vágsverkið | 0,1 | 0,2 | 0,0 | 0,0 |
| Sundsverkið | 0,7 | 1,0 | 4,0 | 4,2 |
| Smærri verk | 0,0 | 0,0 | 7,1 | 7,4 |
| Langtíðarætlan og vindmyllur í Neshaga 28 mió. kr. | 0,0 | 0,0 | 8,0 | 8,3 |
| Íløgur í framleiðsluvirkir tilsamans | 67,8 | 100,0 | 96,1 | 100,0 |

men alt virksemið hjá verkunum verður fíggjað av netpartinum, sum tryggjar verkunum neyðugt gjaldføri.

Samlaða gjaldførið við ársenda er 56,9 mió. kr. fyri framleiðsluvirkini og netpartin tilsamans. Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir uppá kassakredittir í peningastovnum uppá tilsamans 5,4 mió. kr., soleiðis at samlaður tøkur peningur og kredittir eru 62,3 mió. kr.

Fyrst í januar 2012 er eitt gjaldførislán uppá 80 mió. kr. tikið. Endamálið er at hava eitt munagott gjaldføri, soleiðis at SEV altíð er ført fyri kontant at rinda fyri eitt oljukeyp og kostnaðin av einum óhappi á einum av framleiðsluverkunum ella av netinum.

Harumframt er neyðugt at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin hjá framleiðsluverkunum og á netpartinum. Eisini verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikanum á fíggjarmarknaðunum kring heimin.

## Uttanhýsis umhvørvi

Framleiðsluverkini leggja høvuðsdentin á at umhvørvið, reglur og krøv á økinum til eina og hvørja tíð verða fylgd.

## Vitanarstøði og menning

Framleiðsluverkini leggja stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í virkseminum í tann mun, hetta verður mett neyðugt, og skipað verður fyri hóskandi eftirútbúgving av starvsfólkunum. Framleiðsluverkini arbeiða framhaldandi við at menna veitingartrygdina og góðskuna. Arbeitt verður við ætlanum at økja tann partin av framleiðsluni, sum byggir á varandi orkukeldur, so sum vatn, vind og sjóvarfall.

## Útlit fyri rakstrarárið 2012

Úrslitið eftir skatt fyri 2012 verður mett at liggja á sama støði sum fyri 2011 umleið 30 til 50 mió. kr. í yvirskoti. Í yvirskotinum er innroknað gjald fyri netábyrgd og vinning. Øll framleiðsla verður seld til netpartin.

Rakstrarútreiðslurnar, áðrenn eina møguliga sparing í rakstrinum, verða mettar at verða 57,7 mió. kr. í 2012 móti 90,8 mió. kr. í 2011, svarandi til eina minni útreiðslu uppá 33,1 mió. kr. ella 36,5%. Hetta kemur av fallandi útreiðslum til viðlíkahaldsarbeiðir av framleiðsluverkunum, tí hesi arbeiði eru útsett til 2013. Hinvegin fer ódnarveðrið veturin 2011/2012 at føra við sær øktar útreiðslur til nýgerð av vindmyllum í Neshaga.

Oljuútreiðslurnar eru í fíggjarætlanini fyri 2012 mettar at verða 134,5 mió. kr. Men við støði í oljuprísinum í fyrsta ársfjórðingi 2012 kann roknast við, at oljuútreiðslurnar verða umleið 15 til 20 mió. kr. hægri enn upprunaliga ætlað, soleiðis at hesar fara at gerast 150 til 160 mió. kr.

Væntandi verða avskrivingarnar eitt vet størri enn staðfest í inniverandi ári. Hesar verða mettar at verða 37,5 mió. kr. móti 31,5 mió. kr. Rentuútreiðslurnar væntast at veksa við økingini í skuldini uppá 99 mió. kr., sum fer til at fíggja íløgurnar í framleiðsluverkinum á Eiði við 69 mió. kr. og nýggju vindmyllurnar í Neshaga við 30 mió. kr. Hesar verða væntandi settar upp í summar. Rentuútreiðslurnar væntast tí at veksa frá umleið 11 mió. kr. til góðar 16 mió. kr.
Við einum mettum yvirskoti uppá 30 til 50 mió. kr. fyri 2012 frá framleiðslupartinum verður gjaldførisbroytingin frá rakstrinum mett at verða umleið 60 til 80 mió. kr. Tað er neyðugt at hava eina nøktandi sjálvfígging frá rakstrinum, sum skal vera við til at fíggja komandi íløgur í viðlíkahald av verandi framleiðsluverkum og íløgur í varandi orkukeldum.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag hava tvær vindmyllur verið fyri óhappum. Hesar báðar vindmyllur eru vorðnar vrak og tí ikki førar fyri at framleiða elmegi.

Í løtuni fer arbeiðið fram at viðgera og kanna, hvør loysnin skal verða í sambandi við at endurskapa elframleiðsluna. Møguleiki er fyri at seta upp líknandi myllur, sum fórust í vindinum, ella at seta nýggjari og framkomnari myllur upp í staðin. Tó kann væntast eitt ávíst tap av hesum óhappum, sjálvt um myllurnar eru tryggjaðar móti skaðum av slíkum slag.

# Rakstrarroknskapur

| | Nota | 2011 DKK | *2010 t. DKK* |
|---|---|---|---|
| **Nettoumsetningur** | 1 | **301.698.840** | ***238.266*** |
| Oljuútreiðslur | 2 | -142.306.499 | *-124.731* |
| Tilfar og tænastuveitingar | 3 | -58.674.498 | *-46.416* |
| **Bruttovinningur** | | **100.717.843** | ***67.119*** |
| | | | |
| Starvsfólkaútreiðslur | 4 | -32.134.966 | *-31.103* |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | | **68.582.877** | ***36.016*** |
| | | | |
| Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | | -31.538.754 | *-31.306* |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **37.044.123** | ***4.710*** |
| | | | |
| Fíggjarútreiðslur | 5 | -10.809.778 | *-4.710* |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **26.234.345** | ***0*** |
| | | | |
| Skattur av ársúrsliti | 6 | 0 | *0* |
| **Ársúrslit** | | **26.234.345** | ***0*** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Úrslit | | 26.234.345 | *0* |
| Regulering til primo | | -5.743.184 | *0* |
| Flutt úrslit, primo | | 449.017.223 | *449.017* |
| **Til nýtslu** | | **469.508.384** | ***449.017*** |

**Skotið verður upp at býta upphæddina soleiðis:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Flutt úrslit | | 469.508.384 | *449.017* |
| **Tilsamans** | | **469.508.384** | ***449.017*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| AKTIV | Nota | 31.12.11 DKK | *31.12.10 t. DKK* |
|---|---|---|---|
| Framleiðsluvirkir | 7,16 | 541.861.521 | *572.576* |
| Bygningar og jarðarøkir | 7 | 56.611 | *57* |
| Rakstrargøgn | 7 | 1.378.457 | *1.524* |
| Íløguarbeiði í gerð | | 121.478.051 | *54.357* |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | **664.774.640** | ***628.514*** |
| **Støðisogn tilsamans** | | **664.774.640** | ***628.514*** |
| Olja | | 38.787.135 | *38.483* |
| **Vørugoymslur tilsamans** | | **38.787.135** | ***38.483*** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **38.787.135** | ***38.483*** |
| **Aktiv tilsamans** | | **703.561.775** | ***666.997*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| PASSIV | Nota | 31.12.11 DKK | *31.12.10 DKK* |
|---|---|---|---|
| Flutt úrslit | 8 | 469.508.384 | *449.017* |
| **EGINOGN TILSAMANS** | | **469.508.384** | ***449.017*** |
| Avsetingar til útsettan skatt | 9 | 0 | *0* |
| **Avsetingar tilsamans** | | **0** | ***0*** |
| Skuld til peningastovnar | 10 | 213.647.141 | *202.121* |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **213.647.141** | ***202.121*** |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 10 | 15.360.000 | *15.859* |
| Partafelagsskattur | 11 | 0 | *0* |
| Tíðaravmarkingar | | 5.046.250 | *0* |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **20.406.250** | ***15.859*** |
| **SKULD TILSAMANS** | | **234.053.391** | ***217.980*** |
| **PASSIV TILSAMANS** | | **703.561.775** | ***666.997*** |
| Framleiðsluúrslit á virkir | 12 | | |
| Maskinyvirlit | 13 | | |
| Veðsetingar og aðrar skyldur | 14 | | |

# Kapitalfrágreiðing

| | Nota | *2011* *DKK* |
|---|---|---|
| **Ársúrslit** | | **26.234.345** |
| Reguleringar | 15 | 42.348.532 |
| Broyting í rakstrarpeningi: | | |
| Vørugoymslur | | -304.115 |
| Tíðaravmarkingar | | 5.046.250 |
| **Peningastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar** | | **73.325.012** |
| | | |
| Goldin rentukostnaður og líknandi kostnaðir | | -10.809.778 |
| Javning primo | | -5.743.184 |
| **Peningastreymar frá rakstrinum** | | **56.772.050** |
| | | |
| Keyp av materiellari støðisogn | | -678.385 |
| Broyting arbeiði í gerð | | -67.121.170 |
| **Peningastreymar frá íløgum** | | **-67.799.555** |
| | | |
| Lántøka | | 30.000.000 |
| Avdráttir uppá langfreistaða skuld | | -18.972.495 |
| **Peningastreymar frá fígging** | | **11.027.505** |
| **Samlaðir peningastreymar í árinum** | | **0** |
| | | |
| Tøkur peningur við ársbyrjan | | 0 |
| **Tøkur peningur við árslok** | | **0** |

# Nýttur roknskaparháttur

## ALMENT

Framleiðsluroknskapurin er gjørdur í samsvari í við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í flokki C. Tann nýtti roknskaparhátturin er broyttur í mun til undanfarna ár á hesum økjum:

- Vinningur er innroknaður í søluna av elmegi
- Netábyrgdin verður sundurgreinað og víst fyri seg í roknskapinum

Broytti roknskaparhátturin ávirkar ársúrslitið og eginognina positivt við 26,2 mió. kr. Samanberingartøl, høvuðs- og lyklatøl eru ikki tillagað hesa broyting.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanlíkningartøl fyri undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

## Alment um innrokning og máting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt sum tær verða forvunnar, herundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allar útreiðslur, herav av- og niðurskrivingar innroknaðar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virðið av ognini verður mett álítandi. Skuld verður innroknað í fíggjarstøðuna, tá hon er sannlík og kann mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað fyri kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri. Við innrokning og máting verður atlit tikið at væntaðum tapum og váðum, ið vísa seg, áðrenn ársroknskapurin er liðugur, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## GJALDOYRA

Ársroknskapurin er gjørdur í donskum krónum.

Flytingar í fremmandum gjaldoyra í árinum verða umroknaðar til kursin tann dagin, flytingin er gjørd. Kurstryggjaðar flytingar verða tó upptiknar til tann tryggjaða kursin. Áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra verður umroknað til danskar krónur eftir kursinum við roknskaparlok, tó undantikið kurstryggjaðar upphæddir, sum verða upptiknar fyri tann tryggjaða kursin. Staðfestur og óstaðfestur kursvinningur ella -tap verður tikið við í rakstrarroknskapinum undir fíggjarpostum.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Nettoumsetningur

Inntøkur við sølu av vørum verða tiknar við í rakstrarroknskapinum, um veiting er farin fram, og keyparin hevur yvirtikið váðan í roknskaparárinum. Nettoumsetningurin verður uppgjørdur uttan MVG.

### Aðrir kostnaðir

Her er talan um kostnað í sambandi við keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum, umframt annan fyrisitingarkostnað.

### Rakstrarbýti, framleiðsla og net

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni uppá 5% av ognunum hjá einstøku elverkunum er innroknaður. Roknaði vinningurin uppá 5% er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkreditlánsbrøvum, sum verður at samanbera við langfreistaðu íløgurnar hjá elverkunum.

Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum stendst av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi umframt kostnaðin fyri netábyrgd. Hesin kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðin fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnaðin fyri netábyrgd annars.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum, frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum. Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy er tann sami sum fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum

Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er mettur til at verða 5% av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað avskrivingar hjá Sunds- og Vágsverkinum. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkum kring landið. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar

endurgoldnan fyri veitingartrygd, restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

## Avskrivingar

Avskriving av materiellari støðisogn verður løgd soleiðis til rættis, at fram fer ein skipað avskriving av støðisognini grundað á eina meting av brúkstíðini. Felagið hevur brúkt niðanfyri standandi brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Framleiðslu- og býtisvirkir | 35 - 50 ár | 0% |
| Bygningar | 50 ár | 0% |
| Rakstrargøgn og innbúgv | 3 - 5 ár | 0% |

Grundøki verða ikki avskrivað.

## Fíggjarpostar

Undir fíggjarpostar koma rentuinntøkur, rentuútreiðslur, staðfestur og óstaðfestur kursvinningur og –tap av virðisbrøvum, skuld og flyting í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum aktivum og skyldum umframt rentuútreiðslur. Fíggjarinntøkur og fíggjarútreiðslur verða upptiknar við teimum upphæddum, sum hoyra roknskaparárinum til.

## Skattur

Skattur í árinum, sum fevnir um aktuellan skatt fyri árið umframt broytingar í útsettum skatti, verður førdur í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur úrslitinum í árinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina, verður bókaður á eginognina.

# FÍGGJARSTØÐA

## Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður upptikin í fíggjarstøðuni fyri kostprís frádrigið samanløgdu avskrivingarnar ella til endurvinningarvirðið, har hetta er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Kostprísur umfatar útveganarvirði og beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur, frá tí ognin varð útvegað, til ognin er klár at taka í nýtslu. Rentur av lánum, tikin til at fíggja framleiðsluna, verða ikki íroknað kostprísin.

Vinningur ella tap við avhending av materiellari støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum søluprísin frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virðið, tá ið støðisognin verður seld.

## Niðurskriving av støðisognum

Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending, um tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Er ábending um virðisminkan, verður gjørd ein niðurskrivingarroynd av hvørji einstakari ogn og av hvørjum ognarbólki. Virðisminkaðu ognirnar verða niðurskrivaðar til endurvinningarvirðið, um hetta virðið er lægri enn roknskaparliga virðið.

Endurvinningarvirðið er tað hægra av nettosøluprísinum og kapitalvirðinum. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettoinntøkunum frá nýtsluni av ognunum.

## Vørugoymsla

Vørugoymsla verður virðisásett til kostprís eftir FIFO-háttinum ella nettosøluvirðinum, har hetta er lægri.

Kostprísur fyri rávørur, hjálpitilfar og handilsvørur verður gjørdur upp sum keypsprísur umframt kostnað, sum er beinleiðis knýttur at keypinum.

Kostprísur fyri lidnar vørur og fyri vørur undir framleiðslu verður gjørdur upp sum virði av beinleiðis brúktum tilfari og lønum. Rentur av lánum, tikin til at fíggja framleiðsluna, verða ikki íroknaðar kostprísin.

## Aktuellur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virði av aktivum og skyldum. Útsettur skattur verður mátaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum.

Útsett skattaaktiv, her undir skattavirðið av framfluttum skatligum hallum, verða mátað til tað virði, aktivið kann væntast at kunna realiserast fyri.

## Skuld

Langfreistað skuld verður upptikin í fíggjarstøðuni fyri kostprís, tá ið skuldin verður stovnað. Skuldin verður hereftir upptikin við tí virði, sum hon er niðurskrivað til. Kurstap og lánsútreiðslur verða býttar sundur yvir afturgjaldstíðina við støði í roknaðu effektivu rentuni tann dagin, skuldin varð stovnað.

Stuttfreistað skuld verður somuleiðis tikin við fyri tann kostprís, sum hon er niðurgoldin til. Hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

## 1. NETTOUMSETNINGUR

| | | |
|---|---|---|
| Egin framleiðsla | 283.393.092 | *238.266* |
| Netábyrgd | 18.305.748 | *0* |
| **Tilsamans** | **301.698.840** | ***238.266*** |

## 2. OLJUÚTREIÐSLUR

| | | |
|---|---|---|
| Gassolja | 6.410.245 | *9.065* |
| Tungolja | 129.853.160 | *109.807* |
| Smyrjiolja | 6.043.094 | *5.859* |
| **Tilsamans** | **142.306.499** | ***124.731*** |

## 3. TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR

| | | |
|---|---|---|
| Linjur | 2.316.454 | *983* |
| Byrging, rør og tunlar | 8.174.343 | *10.441* |
| Tangar og umhvørvi | 431.912 | *220* |
| Maskinur | 25.878.436 | *15.108* |
| El og teknikk | 4.455.472 | *4.571* |
| Bygningar og lendi | 2.112.951 | *2.069* |
| Aðalfundur og nevnd | 406.634 | *126* |
| Kanning og ráðgeving | 8.027.985 | *5.488* |
| Kunningartøkni | 220.948 | *283* |
| Leiðsla og skrivstovuhald | 600.242 | *436* |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 731.674 | *579* |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 5.317.447 | *6.112* |
| **Tilsamans** | **58.674.498** | ***46.416*** |

## 4. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR

| | | |
|---|---|---|
| Lønir | 28.870.024 | *28.093* |
| Pensjónir | 2.503.959 | *2.221* |
| Almenn gjøld | 760.983 | *789* |
| **Tilsamans** | **32.134.966** | ***31.103*** |
| | | |
| Starvsfólk við høvuðsinntøku frá SEV | 52 | *57* |
| Miðaltal av starvsfólkum | 61 | *67* |

## 5. FÍGGJARÚTREIÐSLUR

| | | |
|---|---|---|
| Rentur, lán og bankaskuld v.m. | 10.809.778 | *4.710* |
| **Tilsamans** | **10.809.778** | ***4.710*** |

## 6. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI

| | | |
|---|---|---|
| Partafelagsskattur | 0 | *0* |
| Javning av útsettum skatti | 0 | *0* |
| **Tilsamans** | **0** | ***0*** |

## 7. MATERIELL STØÐISOGN

| Upphædd í DKK | Framleiðsluvirkir | Bygningar og jarðarøkir | Rakstrargøgn |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 1.275.671.306 | 56.611 | 2.812.976 |
| Tilgongd í árinum, netto | 555.397 | 0 | 122.987 |
| Útveganarvirði ultimo | 1.276.226.704 | 56.611 | 2.935.963 |
| | | | |
| Av- og niðurskriving primo | -703.095.345 | 0 | -1.288.590 |
| Avskrivingar í árinum | -31.269.838 | 0 | -268.916 |
| Av- og niðurskriving ultimo | -734.365.183 | 0 | -1.557.506 |
| Roknskaparligt virði ultimo | 541.861.521 | 56.611 | 1.378.457 |

## 8. EGINOGN

| Upphædd í DKK | Flutt úrslit |
| --- | --- |
| *Eginognaruppgerð 01.01.10 - 31.12.10* | |
| Salda pr. 31.12.09 | 449.017.223 |
| Javning til primo | 0 |
| Salda pr. 01.01.10 | 449.017.223 |
| Flutt úrslit | 0 |
| Salda pr. 31.12.10 | 449.017.223 |
| *Eginognaruppgerð 01.01.11 - 31.12.11* | |
| Salda pr. 31.12.10 | 449.017.223 |
| Regulering til primo | -5.743.184 |
| Flutt úrslit | 26.234.345 |
| Salda pr. 31.12.11 | 469.508.384 |

| 9. AVSETINGAR TIL ÚTSETTAN SKATT | 31.12.11<br>DKK | 31.12.10<br>t.DKK |
| --- | --- | --- |
| Avsetingar til útsettan skatt primo | 0 | 0 |
| Útsettur skattur í árinum | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** |

### 10. SKULD

| | Avdráttur fyrsta árið DKK | Restskuld eftir 5 ár DKK | Skuld tilsamans 31.12.11 DKK | Skuld tilsamans 31.12.10 DKK |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til fíggjarstovnar | 15.360.000 | 152.562.061 | 229.007.141 | 217.979.636 |
| **Tilsamans** | **15.360.000** | **152.562.061** | **229.007.141** | **217.979.636** |

### 11. SKYLDUGUR SKATTUR

| | Innskot | Flutt úrslit |
|---|---|---|
| Skyldugur skattur primo | 0 | 0 |
| Goldin skattur í árinum | 0 | 0 |
| | | |
| Skyldugur skattur frá undanfarnum árum | 0 | 0 |
| Roknaður felagsskattur fyri inniverandi ár | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | **0** | **0** |

Lán frá íleggingargrunninum á 180 mió. kr. er veitt til fígging av „Eiði 2 - suður" verkætlanini og 3. turbinuni á Eiðisverkinum. Hesi arbeiði eru í gerð, og lánið verður hækkað til 218 mió. kr. í 2012. Eftir avtaluni við Íleggingargrunnin verður afturgjaldstíðin 14 ár, og afturgjaldingin skal byrja í 2014.

### 12. FRAMLEIÐSLUÚRSLIT Á VERKIR (DKK)

| | Inntøkur | Olja | Tilfar | Lønir | Avskriving | Rentur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sundsverkið | 171.712.667 | -124.354.799 | -15.824.738 | -15.418.379 | -12.606.498 | - | 3.508.253 |
| Vágsverkið | 27.136.828 | -14.837.188 | -2.946.095 | -5.398.109 | -2.297.336 | - | 1.658.100 |
| Fossáverkið | 18.801.411 | - | -12.932.685 | -4.831.148 | -514.014 | - | 523.564 |
| Heygaverkið | 16.467.046 | -34.484 | -15.097.942 | -693.306 | -300.314 | - | 341.000 |
| Mýruverkið | 2.026.967 | -1.891 | -878.480 | -302.221 | -391.975 | - | 452.400 |
| Eiðisverkið | 47.068.582 | -3.225 | -3.738.592 | -1.565.847 | -12.366.983 | -10.809.778 | 18.584.157 |
| Verkið í Botni | 1.743.361 | - | -731.642 | -227.216 | -339.503 | - | 445.000 |
| Verkið á Strond | 7.386.511 | -1.952.304 | -3.612.233 | -1.345.375 | -493.506 | - | -16.907 |
| Vindorka | 3.047.820 | - | -1.237.024 | -213.699 | -1.157.677 | - | 439.420 |
| Smáverk | 6.307.647 | -1.122.607 | -1.675.069 | -2.139.666 | -1.070.946 | - | 299.359 |
| **Framleiðsluúrslit** | **301.698.840** | **-142.306.498** | **-58.674.500** | **-32.134.966** | **-31.538.752** | **-10.809.778** | **26.234.346** |

### 13. MASKINYVIRLIT VIÐ ÁRSLOK 2011

| Stað | Maskina | MW | Hk | Maskintypa | Maskinframleiðari | Drívevni | Ár | Aldur | Tímar |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Botnur | T1 | 1,00 | 1.360 | Pelton vatnturbina | Voith | Vatn | 1965 | 46 | 177.596 |
| Botnur | T2 | 2,00 | 2.719 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1966 | 45 | 136.449 |
| Eiðisverk | T1 | 6,70 | 9.109 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 24 | 87.752 |
| Eiðisverk | T2 | 6,70 | 9.109 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1987 | 24 | 81.698 |
| Neshagi | M1 | 0,15 | 204 | Vindmylla (fixed pitch) | Nordtank | Vindur | 1993 | 18 | 110.000 |
| Neshagi | M2 | 0,66 | 898 | Vindmylla | Vestas | Vindur | 2005 | 6 | 42.793 |
| Neshagi | M3 | 0,66 | 898 | Vindmylla | Vestas | Vindur | 2005 | 6 | 45.235 |
| Neshagi | M4 | 0,66 | 898 | Vindmylla | Vestas | Vindur | 2005 | 6 | 38.934 |
| Skopunarverkið | M1 - M3 | 1,83 | 2.483 | 4-T | Mercedes og Deutz | Gassolja | 1984 | | |
| Smáverk | | 1,70 | 2.311 | 4-T | Deutz, Mercedes, perkins | Gassolja | | | |
| Strond | M2 | 2,30 | 3.127 | 4-T KV 12 SS | Mirrleese Blackstone | Gassolja | 1965 | 46 | 78.839 |
| Strond | M3 | 3,60 | 4.895 | 4-T 12 M 453 K | Krupp Mak | Gassolja | 1982 | 29 | 45.291 |
| Strond | T1 | 1,40 | 1.903 | Francis vatnturbina | Sulzer Hydro | Vatn | 1998 | 13 | 40.488 |
| Sundsverkið | M1 | 8,10 | 11.013 | 4-T 9M43C | Catepillar/MaK | Tungolja | 2001 | 10 | 41.773 |
| Sundsverkið | M2 | 8,10 | 11.013 | 4-T 9M43C | Catepillar/MaK | Tungolja | 2004 | 7 | 35.474 |
| Sundsverkið | M3 | 5,70 | 7.750 | 4-T KV16MAJOR | Mirrleese Blackstone | Tungolja | 1978 | 33 | 69.538 |
| Sundsverkið | M4 | 12,40 | 16.859 | 2-T 12L55 GSCA | B&W Gőtaverken | Tungolja | 1983 | 28 | 153.444 |
| Sundsverkið | M5 | 12,40 | 16.859 | 2-T 12 L55 GSCA | B&W Gőtaverken | Tungolja | 1988 | 23 | 127.806 |
| Tvøroyri | M1 | 2,00 | 2.719 | 4-T | Nohab | Gassolja | 1973 | 38 | 81.520 |
| Vágsverkið | M1 | 2,70 | 3.671 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 28 | 107.342 |
| Vágsverkið | M2 | 2,70 | 3.671 | 4-T 9 M 453 | Krupp Mak | Tungolja | 1983 | 28 | 110.165 |
| Vágsverkið | M3 | 4,32 | 5.874 | 4-T 9M32C | Catepillar/MaK | Tungolja | 2004 | 7 | 46.211 |
| Vestmanna | Fossá 1 | 2,10 | 2.855 | Pelton vatnturbina | Maier | Vatn | 1953 | 58 | 201.906 |
| Vestmanna | Fossá 2 | 4,20 | 5.710 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1956 | 55 | 314.310 |
| Vestmanna | Heygav. 1 | 4,90 | 6.662 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1963 | 48 | 203.508 |
| Vestmanna | Mýruv. 1 | 2,40 | 3.263 | Francis vatnturbina | Voith | Vatn | 1961 | 50 | 334.196 |
| **Samlaður máttur:** | | **101,38** | **137.834** | | | | | | **2.712.268** |

### 14. VEÐSETINGAR OG AÐRAR SKYLDUR

Ognir felagsins eru veðsettar fyri tilsamans 380 mió. kr.
Ongar aðrar skyldur hvíla á felagnum.

| 15. REGULERINGAR | 2011<br>DKK | *2010*<br>*t. DKK* |
|---|---|---|
| Avskrivingar | 31.538.754 | *31.306* |
| Rentukostnaðir og líknandi kostnaðir | 10.809.778 | *4.710* |
| **Tilsamans** | **42.348.532** | ***36.016*** |

| 16. Útgreining framleiðsluvirkir | | |
|---|---|---|
| Fossáverkið | 10.249.544 | 10.685 |
| Heygaverkið | 6.812.319 | 7.112 |
| Mýruverkið | 9.041.368 | 9.431 |
| Eiðisverkið | 373.396.681 | 385.731 |
| Verkið í Botni | 8.892.030 | 8.831 |
| Vágsverkið | 33.005.129 | 35.326 |
| Verkið á Tvøroyri | 4.923.590 | 5.088 |
| Sundsverkið | 83.371.755 | 95.787 |
| Skopun | 79.335 | 330 |
| Verkið KG | 388.312 | 836 |
| Mobilaggregat | 9.296.703 | 10.453 |
| Fugloy | 462.683 | 614 |
| Svínoy | 542.438 | 739 |
| Mykines | 92.003 | 103 |
| Skúvoy | 991.645 | 1.116 |
| Dímun | 315.985 | 394 |
| **Tilsamans** | **541.861.521** | **572** |

# Netroknskapur 2011

# Elfelagið SEV

## Netroknskapur fyri 2011

### Innihald


Upplýsingar um felagið v.m. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 84
Leiðsluátekning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 84
Átekning frá óheftum grannskoðara . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 86
Høvuðs- og lyklatøl . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 87-88
Leiðslufrágreiðing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 89-92
Rakstrarroknskapur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 93
Fíggjarstøða . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 94 -95
Peningastreymsuppgerð . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 96
Nýttur roknskaparháttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 97-99
Notur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 100-106


### Felagið

Elfelagið SEV
Landavegur 92
FO-100 Tórshavn
Telefon: 346800
Telefax: 346801
Heimasíða: www.sev.fo
Heimstaður: Tórshavn
Roknskaparár: 01.01 - 31.12

### Nevnd

Jákup Suni Lauritsen, formaður
Kári E. Jacobsen, næstformaður
Marin Katrina Frýdal
Steinbjørn O. Jacobsen
Niclas Hentze
Pauli T. Petersen
Bødvar Hjartvarsson

### Leiðsla

Hákun Djurhuus, stjóri
Bogi Bendtsen, deildarstjóri fyri fyrisitingina
Finn Jakobsen, deildarstjóri fyri tøkni

### Grannskoðan

NOTA
Løggilt grannskoðanarvirki P/F

### Leiðsluátekning

Vit leggja við hesum fram netroknskap felagsins fyri roknskaparárið 01.01.11 - 31.12.11.

Netroknskapurin er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini og viðtøkum felagsins.

Tað er okkara fatan, at netroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðu og úrslitinum viðvíkjandi virksemi felagsins.

Samstundis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin greiðir rættvísandi frá teimum viðurskiftum, sum frágreiðingin fevnir um.

Tórshavn, tann 3. apríl 2012

# Leiðslufrágreiðing

## Nevnd:

| | | |
|---|---|---|
| *Jákup Suni Lauritsen*<br>*formaður* | *Kári E. Jacobsen*<br>*næstformaður* | *Marin Katrina Frýdal* |
| *Steinbjørn O. Jacobsen* | *Niclas Hentze* | *Pauli T. Petersen* |
| *Bødvar Hjartvarsson* | | |

## Stjórn:

*Hákun Djurhuus*
*stjóri*

## Fíggjarleiðsla:

*Bogi Bendtsen*
*deildarstjóri fyri fyrisitingina*

# Átekning frá óheftum grannskoðara

Netroknskapurin er gjørdur sum eitt ískoyti og útgreining til ársfrásøgnina hjá Elfelagnum SEV. Í sambandi við netvirksemið skulu vit vátta, at tølini í netroknskapinum fyri 2011 eru samsvarandi grannskoðaðu ársfrásøgnina fyri 2011 hjá Elfelagnum SEV.

Grannskoðanin av ársroknskapinum hjá Elfelagnum SEV er endað, og roknskapurin hevur fingið eina átekning uttan fyrivarni ella supplerandi upplýsingar. Víst verður til síðurnar 5-6 í ársfrásøgnini hjá Elfelagnum SEV, har tann samlaða átekningin framgongur.

Tórshavn, tann 3. apríl 2012

**NOTA**

Løggilt grannskoðanarvirki P/F

*Hans Laksá*
*Løggildur grannskoðari*

*Jørmann Petersen*
*Løggildur grannskoðari*

# Høvuðs- og lyklatøl

## HØVUÐSTØL

| Upphæddir í tkr. | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| **Úrslit** | | |
| Nettoumsetningur | 319.197 | 280.816 |
| Indeks | 114 | 100 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskriving | -47.696 | -27.995 |
| Indeks | 170 | 100 |
| Úrslit av primerum rakstri (EBIT) | -71.980 | -52.354 |
| Indeks | 137 | 100 |
| Fíggjarpostar, netto | -3.644 | -5.429 |
| Indeks | 67 | 100 |
| Ársúrslit | -75.624 | -57.783 |
| Indeks | 131 | 100 |
| | | |
| **Fíggjarstøða** | | |
| Aktiv tilsamans | 540.203 | 533.557 |
| Indeks | 101 | 100 |
| | | |
| Eginogn | 372.767 | 440.114 |
| Indeks | 85 | 100 |
| | | |
| **Peningastreymar** | | |
| Nettopeningastreymar frá: | | |
| Rakstri | -69.972 | |
| Íløgum | -12.872 | |
| Fígging | 97.587 | |
| **Peningastreymar í árinum** | **14.743** | |

## LYKLATØL

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| **Rentabilitetur** | | |
| Renting av egingogn | -18,6% | -13,1% |
| Ognarumferð | 0,59 | 0,53 |
| | | |
| **Soliditetur** | | |
| Eginognarpartur | 69,0% | 82,5% |
| | | |
| **Annað** | | |
| Starvsfólk við høvuðsinntøku frá SEV | 86 | 89 |
| Ársverk í miðal | 105 | 108 |

### Útrokning av lyklatølum

**Renting av eginogn** $\frac{\text{Úrslit av vanligum rakstri eftir skatt x 100}}{\text{Miðal eginogn}}$

**Ognarumferð** $\frac{\text{Nettoumsetningur}}{\text{Aktiv tilsamans}}$

**Eginognarpartur** $\frac{\text{Eginogn ultimo x 100}}{\text{Aktiv tilsamans}}$

Lyklatøl eru roknað út eftir tilmælum frá „Den Danske Finansanalytikerforening". Eingi høvuðs- og lyklatøl fyrilggja fyri tíðina áðrenn 2010.

# Leiðslufrágreiðing

## Høvuðsvirksemið

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti fyri náttúru og umhvørvi.

Inniverandi roknskapur fyri netvirksemið hjá SEV er ein partur av samlaða roknskapinum hjá SEV. Frágreiðingin fevnir um netvirksemið, íroknað fyrisiting, hjá felagnum í tíðarskeiðnum 1. januar 2011 til 31. desember 2011.

## Gongdin í virkseminum og fíggjarligu viðurskiftunum

Grundarlagið fyri uppgerð av útreiðslunum fyri keyp av elmegi frá framleiðsluverkunum, eins og útreiðslurnar fyri stýringina av elnetinum, rullandi máttinum, tøka máttinum og fyri netábyrgdini annars, eru núverandi skrásetingar út frá einum vanligum rakstrarári.

## Inntøkur

Inntøkurnar hjá netpartinum stava frá sølu av elmegi til vinnuligar, privatar og almennar kundar, herundir kommunur. Harumframt stava inntøkurnar frá føstum gjøldum og øðrum ómaksgjøldum frá somu kundum.

Rakstrarúrslitið fyri 2011 gjørdist eitt hall uppá 75,6 mió. kr. móti einum halli uppá 57,8 mió. kr. í 2010.

Elprísurin hækkaði tann 1. januar 2011 við 0,15 kr. pr. kWt við góðkenning frá Elveitingareftirlitinum. Samstundis ásannaði Elveitingareftirlitið, saman við SEV, at við høga oljuprísinum og við atliti at tørvinum um at útbyggja og endurnýggja bæði á netpartinum og í framleiðsluni verður neyðugt við príshækkingum í framtíðini. Tann 1. januar 2012 hækkaði felagið aftur elprísin við 0,10 kr. pr. kWt.

Samlaðu inntøkurnar í 2011 gjørdust 319,2 mió. kr., móti ætlaðu 314,5 mió. kr. ella ein meir inntøka uppá 4,7 mió. kr. Nógv tann størsti parturin av inntøkuni stavaði frá streymgjaldi svarandi til 296,4 mió. kr., meðan 22,8 mió. kr. vóru inntøkur frá føstum gjøldum og øðrum inntøkum. Fyri 2010 vóru inntøkurnar frá streymgjaldi 261,8 mió. kr. og ómaksgjøldini 19 mió. kr.

Elkeypið mált í MWt fyri 2011 var 273.843 móti 280.323 MWt í 2010, ella ein minking uppá 6.480 MWt, svarandi til 2,3%. Av teimum 273.843 MWt vóru 166.815 MWt framleiddir av oljuriknu verkunum, meðan 92.502 MWt vóru framleidd við vatnorku og 14.526 MWt við vindi í 2011. Harav Sp/f Røkt stóð fyri einum parti. Til samanberingar vóru í 2010 framleiddir 199.344 MWt av oljuriknu verkunum, soleiðis at framleiðslan av elmegi á teimum oljuriknu verkunum fall í 2011 við 16,3%.

Elframleiðslan í 2010 við vatnorku var 67.395 MWt svarandi til, at framleiðslan av elmegi við vatnorku øktist við 37,3% í 2011. Eisini elframleiðslan við vindi øktist í 2011 við 6,9% mótvegis 2010, har framleiðslan var 13.584 MWt.

Framleiðslan á oljuriknu verkunum fall við 32.529 MWt, svarandi til 16,3%, frá 199.344 MWt í 2010 til 166.815 MWt í 2011. Fallið í framleiðsluni á teimum oljuriknu verkunum bleiv mótsvarað við eini fallandi elnýtslu uppá 6.480 MWt, 25.107 MWt í meirframleiðslu av elmegi við vatni og 942 MWt í meirframleiðslu av elmegi við vindi.

Um so var, at framleiðslan á oljuriknu verkunum ikki hevði fallið, høvdu samlaðu útreiðslurnar til keyp av elorku hjá netpartinum verið hægri. Oljuútreiðslurnar hjá framleiðsluverkunum svara til 51,7% av kostnaðinum og avskrivingunum fyri 2011 hjá hesum. Tí hevur tað stóra ávirkan á rakstrarúrslitið hjá netpartinum, hvussu framleiðslan hjá verkunum verður løgd til rættis.

## Útreiðslur

Útreiðslurnar í 2011 gjørdust 394,8 mió. kr., meðan hesar fyri 2010 vóru 338,6 mió. kr., svarandi til at útreiðslurnar vuksu 56,2 mió. kr. ella 16,6%. Íroknað hesu upphædd er vinningurin uppá 26,3 mió. kr. hjá framleiðsluverkunum fyri 2011. Eingin vinningur er roknaður í 2010.

Útreiðslurnar til tilfar- og tænastuveitingar og lønir gjørdust 62,0 mió. kr., meðan ætlað var við 79,3 mió. kr. svarandi til, at hesar gjørdust 17,3 mió. kr. minni enn ætlað. Fyri 2010 vóru tilsvarandi útreiðslur 67,5 mió. kr., soleiðis at hesar gjørdust 5,5 mió. kr. minni í 2011 svarandi til 8,2%.

Í 2011 er fyrireikingarkostnaðurin fyri Víkarvatnsverkætlanina og

fyrireikingarkostnaðin fyri útbyggingina av skrivstovubygninginum við Landavegin útreiðsluførdir uppá ávikavist 4,2 mió. kr. og 1,0 mió. kr. ella íalt 5,2 mió. kr. Harumframt er avsett kostnaður til trætumál við 1 mió. kr.

Hesir kostnaðir eru innroknaðir í kostnaðin fyri tilfar- og tænastuveitingar hjá fyrisitingini, men ætlað er ikki við hesum í fíggjarætlanini fyri 2011.

*Kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt*
Samlaði kostnaðurin hjá verkunum stendst av kostnaðinum í sambandi við framleiðslu av elmegi umframt kostnaðinum fyri netábyrgd. Hesin kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðin fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnaðin fyri netábyrgd annars. Netvirksemið keypir framleiðsluna hjá framleiðsluverkunum umframt at rindað verður fyri kostnaðin av netábyrgdini, sum verkini standa fyri vegna netpartin.

*Kostnaður fyri stýring av elnetinum*
Stýringin av elnetinum í Suðuroy fer fram á framleiðsluverkinum í Vági, meðan stýringin av elnetinum í restini av landinum fer fram á Fossáverkinum í Vestmanna.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum uppá 2,3 mió. kr. er uppgjørdur sum samlaði kostnaðurin fyri lønir á Fossáverkinum eitt vanligt rakstrarár uppá 3 mió. kr., frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum uppá 0,7 mió. kr. Kostnaðurin fyri vanligan rakstur á verkinum er settur til at verða tann sami, sum tað kostar at reka Mýru- og Heygaverkið tilsamans, svarandi til 0,7 mió. kr. eitt vanligt rakstrarár. Sami kostnaður fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum er brúktur til kostnaðin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy, svarandi til 2,3 mió. kr.

*Kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt og tøkan mátt*
Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er mettur til at verða 5% av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað avskrivingar av Sundsverkinum og Vágsverkinum, svarandi til ávikavist 8,4 mió. kr. og 1,3 mió. kr. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá felagnum av smáverkum kring landið, sum verða mett sum eyka verk ella tøkur máttur. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd, restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

*Kostnaður fyri netábyrgd samanumtikið*
Samlaður kostnaður fyri stýring av elnetinum í Føroyum er 4,6 mió. kr., meðan kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin á Sundsverkinum og Vágsverkinum er settur til 9,7 mió. kr. Kostnaðurin fyri veitingartrygdina v.m. frá øðrum verkum er 4,0 mió. kr. svarandi til, at samlaður kostnaður fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og stýring av elnetinum er mettur til 18,3 mió. kr.

## Lønarútreiðslur

Samlaða lønarútreiðslan í 2011 fyri netpartin, íroknað fyrisiting, gjørdist 30,4 mió. kr. mótvegis ætlaðu 39,0 mió. kr. svarandi til eina minni nýtslu uppá 8,6 mió. kr. Fyri 2010 vóru samlaðu lønarútreiðslurnar 34,0 mió. kr., soleiðis at talan er um eina lækking í samlaðu lønarútreiðslunum uppá 3,6 mió. kr. ella 10,6%.

Lønarútreiðslan fyri netvirksemið gjørdust 20,4 mió. kr. móti ætlaðu 26,6 mió. kr. ella ein minni nýtsla uppá 6,2 mió. kr. Fyri 2010 vóru somu útreiðslur 23,5 mió. kr. svarandi til, at útreiðslurnar í 2011 gjørdust 3,1 mió. kr. ella 13,2% lægri.

Minni nýtslan í 2011 stavar frá, at ætlað varð við eini hægri lønarútreiðslu uppá 4,3 mió. kr. til teknikkdeildina og verkfrøðideildina enn veruligu lønarútreiðslurnar gjørdust, samstundis sum lønarútreiðslurnar til rakstaradeildirnar vóru 1,9 mió. kr. lægri enn ætlað.

Lønarútreiðslurnar til fyrisitingina gjørdust 10,0 mió. kr. móti ætlaðu 12,4 mió. kr. svarandi til eina minni nýtslu uppá 2,4 mió. kr. Fyri 2010 vóru lønarútreiðslurnar til fyrisitingina 10,4 mió. kr. svarandi til eina minni afturgongd í lønunum uppá 0,4 mió. kr.

## Tilfar- og tænastuveitingar

Útreiðslurnar til tilfar- og tænastuveitingar gjørdust 31,6 mió. kr. móti ætlað 40,3 mió. kr. ella 8,7 mió. kr. minni enn ætlað. Innroknað í útreiðslunum er fyrireikingarkostnaðurin fyri Víkarvatnsverkætlanini uppá 4,2 mió. kr., fyrireikingarkostnaðurin fyri útbyggingina av skrivstovubygninginum við Landavegin uppá 1,0 mió. kr. og avseting av kostnaði í sambandi við trætumál uppá 1,0 mió. kr. ella íalt 6,2 mió. kr. Ætlað var ikki við hesum kostnaði í 2011.

*Netvirksemið*
Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til netvirksemið gjørdust 15,1 mió. kr. móti ætlaðu 19,7 mió. kr. svarandi til eina minni nýtslu uppá

4,6 mió. kr. grundað á minni nýtslu hjá rakstrardeildum felagsins. Fyri 2010 vóru somu útreiðslur 18,5 mió. kr., soleiðis at kostnaðurin á økinum er 3,4 mió. kr. lægri í 2011 í mun til 2010 ella 18,4%. Teir skaðar, sum ódnarveðrið veturin 2011/2012 førdi við sær, ávirkaði eisini útreiðslurnar til tilfar- og tænastuveitingar nakað og harvið eisini úrslitið fyri 2011.

*Fyrisiting*

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til fyrisiting gjørdust 16,5 mió. kr. í 2011 mótvegis ætlaðu 20,6 mió. kr., svarandi til eina minni útreiðslu uppá 4,1 mió. kr. Íroknað hesi meirnýtslu er, sum nevnt omanfyri, kostnaðurin til Víkarvatnsverkætlanina og verkætlanina við Landavegin og avseting mótvegis kostnaðinum av trætumálum uppá tilsamans 6,2 mió. kr. Verður hesin kostnaður drigin frá kostnaðinum, verða útreiðslurnar til tilfar og tænastuveitingar 10,3 mió. kr. ella 10,3 mió. kr. minni enn ætlað. Minni nýtslan stavar frá lægri fyrisitingarkostnaði, íroknað kostnað til kanning og ráðgeving.

## Fíggjarkostnaður

Rentuútreiðslurnar gjørdust 3,6 mió. kr. Felagið er viðkvæmt fyri broytingum í altjóða rentustøðinum, tí skuldin hjá felagnum er upptikin við broytiligari rentu.

## Avskrivingar

Avskrivingarhátturin er frá 1. januar 2009 broyttur eftir boðum frá Elveitingareftirlitinum. Ognarvirðini eru munandi broytt frá 1. januar 2009, og eru avskrivingartíðirnar fyri flestu ognir samstundis eisini munandi longdar.

Hetta merkir tó ikki, at elprísurin uttan víðari kann lækka, ella umgangast kann at hækka hann, tí so verður einki gjaldførisavlop frá rakstrinum, sum skal tryggja eginfíggingina av ætlaðum íløgum. Raksturin skal geva avlop fyri at kunna gera íløgur í endurnýggingar á framleiðsluverkunum og útbygging av varandi orkukeldum.

Avskrivingarnar fyri 2011 gjørdust 24,3 mió. kr. harav 22,3 mió. kr. stava frá netvirkseminum og 2,0 mió. kr. frá fyrisitingini.

Gjørdar verða metingar av, tá ið fíggjarætlanin verður gjørd fyri komandi ár, hvørjar íløgur væntandi verða lidnar í árinum og harvið tiknar í nýtslu, og byrjað verður at avskriva uppá ognina. Munurin millum staðfestu og ætlaðu avskrivingarnar hevur støði í hesum metingum og veruligum staðfestingum, eins og íløgurnar vórðu nakað lægri enn ætlað.

## Serligir váðar

Avmarkaður váði er av einstøkum kundum. Ansað verður støðugt eftir skuldarbindingini hjá kundum mótvegis felagnum.

Sum nevnt undir brotinum um fíggjarkostnaðin, er felagið harumframt viðkvæmt fyri broytingum í rentustøðinum, men hevur valt ikki at tryggja móti rentuváða við fíggjarligum amboðum ella líknandi. Fylgt verður væl við gongdini í rentustøðinum og áhaldandi verður mett um, hvørt tað er ein fyrimunur at tryggja seg móti rentuváðanum.

## Íløgur

Íløgurnar í materiella støðisogn vóru 13,0 mió. kr., sum niðanfyri standandi talva vísir.

Í mun til fíggjarætlanina fyri 2011 er hetta 18,2 mió. kr. minni enn ásett. Minni íløgur vórðu gjørdar í koplingarstøðir og net enn upprunaliga mett uppá 9,0 mió. kr. eins og íløgur í Granasamstarvið, amboð og fjaravlestur gjørdist 9,2 mió. kr. lægri enn ætlað.

## Gjaldførið

Gjaldførið er í løtuni ikki skilt sundur millum framleiðslu og net, men hetta verður gjørt í 2012. Í inniverandi roknskapi er gjaldførið hjá framleiðsluverkunum ásett til 0 mió. kr., men alt virksemið hjá verkunum verður fíggjað av netpartinum, sum tryggjar verkunum neyðugt gjaldføri.

Samlaða gjaldførið við ársenda er 56,9 mió. kr. fyri framleiðsluvirkini og netpartin tilsamans. Herumframt koma óbrúktir trekningsrættir uppá kassakredittir í peningastovnum uppá tilsamans 5,4 mió. kr., soleiðis at samlaður tøkur peningur og kredittir eru 62,3 mió. kr.

Fyrst í januar 2012 er eitt gjaldførislán uppá 80 mió. kr. tikið. Endamálið er at hava eitt munagott gjaldføri, soleiðis at felagið altíð er ført fyri kontant at rinda fyri eitt oljukeyp og kostnaðin av einum óhappi á einum av framleiðsluverkunum ella av netinum.

Harumframt er neyðugt at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin hjá framleiðsluverkunum og á netpartinum. Eisini verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við

| Íløgur | Staðfest 2011 | | Upprunaætlan 2011 | |
|---|---|---|---|---|
| | mió. kr. | prosent | mió. kr. | prosent |
| Koplingarstøðir og net v.m. | 9,1 | 70,0 | 18,1 | 58,0 |
| Amboð, KT-útgerð, fjaravlestur og verkætlanin Grani v.m. | 3,9 | 30,0 | 13,1 | 42,0 |
| Tilsamans | 13,0 | 100,0 | 31,2 | 100,0 |

atliti at ótryggleikanum á fíggjarmarknaðunum kring heimin.

## Uttanhýsis umhvørvi

Framleiðsluverkini leggja høvuðsdentin á at umhvørvið, reglur og krøv á økinum til eina og hvørja tíð verða fylgd.

## Vitanarstøði og menning

Framleiðsluverkini leggja stóran dent á, at hóskandi vitan og arbeiðsroyndir eru á øllum økjum í virkseminum í tann mun, hetta verður mett neyðugt, og skipað verður fyri hóskandi eftirútbúgving av starvsfólkunum. Framleiðsluverkini arbeiða framhaldandi við at menna veitingartrygdina og góðskuna. Arbeitt verður við ætlanum at økja tann partin av framleiðsluni, sum byggir á varandi orkukeldur so sum vatn, vind og sjóvarfall.

## Útlit fyri rakstrarárið 2012

Úrslitið eftir skatt fyri 2012 er eitt ætlað hall uppá 36 til 56 mió. kr., sum er betri enn úrslitið í 2011, tá ið hallið var 75,6 mió. kr. Hetta er eitt úrslit, sum ikki er nøktandi, og javnvág má fáast í raksturin í 2013, eins og at úrslitið frameftir má geva eitt nøktandi avlop.

Roknað er við einum miðalprísi uppá 1,28 kr. pr. kWt í 2012 og ongari týðandi broyting í samansetingini av elnýtsluni millum brúkararnar enn tann, sum er galdandi í dag. Við útgangsstøði í hesum miðalprísi verður roknað við eini samlaðari inntøku frá sølu av elmegi uppá 319,5 mió. kr. Harumframt koma inntøkur av fasta gjaldinum, íbindingargjaldinum og øðrum uppá 18,7 mió. kr., soleiðis at roknað verður við eini samlaðari inntøku uppá 338,2 mió. kr. Hetta svarar til eina meirinntøku uppá 19,0 mió. kr. í mun til inntøkuna í 2011. Orsøkin er hækkandi elprísur við 0,10 kr. pr. kWt í 2012.

Rakstrarútreiðslurnar, áðrenn eina møguliga sparing í rakstrinum, verða mettar at verða 68,6 mió. kr. í 2012 móti 62,3 mió. kr. í 2011, svarandi til eina størri útreiðslu uppá 6,3 mió. kr. ella 10,1%.

Ætlað er við avskrivingum uppá 30,7 mió. kr. og rentuútreiðslum netto uppá 6,3 mió. kr. Øktu rentuútreiðslurnar stava frá øktari skuld uppá 70 mió. kr. tikin í september 2011 og 80 mió. kr. í januar 2012 til at fíggja serliga rakstur og partvíst íløgur.

Við einum mettum undirskoti uppá 36 til 56 mió. kr. fyri 2012 verður gjaldførisundirskotið frá rakstrinum mett at verða umleið 5 til 25 mió. kr. Tað er neyðugt at hava eina nøktandi sjálvfígging frá rakstrinum, sum skal vera við til at fíggja komandi íløgur í koplingarstøðir og viðlíkahald av verandi eins og íløgur í menning av netinum skal gerast fyri at taka ímóti altsamt veksandi partinum av elmegi frá varandi orkukeldum.

Fyri at felagið skal kunna verða ført fyri at halda eitt nøktandi gjaldføri, eins og at útvega fígging frá lánveitarum til tær stóru íløgurnar, sum standa fyri framman komandi árini, er neyðugt, at felagið fær javnvág í raksturin í 2013, og at felagið hevur eitt nøktandi rakstrarúrslit hareftir.

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av roknskapinum.

# Rakstrarroknskapur

| | Nota | 2011<br>DKK | *2010*<br>*t. DKK* |
|---|---|---|---|
| **Nettoumsetningur** | 1 | **319.197.094** | ***280.816*** |
| Keyp av streymi | | -283.393.092 | *-238.266* |
| Keyp av vindorku | | -2.804.404 | *-2.553* |
| Netábyrgd og netumsiting | 2 | -18.305.748 | *0* |
| Oljuútreiðslur | 3 | -333.872 | *-527* |
| Tilfar og tænastuveitingar | | -31.615.094 | *-33.507* |
| **Bruttovinningur** | | **-17.255.116** | ***5.963*** |
| | | | |
| Starvsfólkaútreiðslur | 4 | -30.441.270 | *-33.958* |
| **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | | **-47.696.386** | ***-27.995*** |
| | | | |
| Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | | -24.283.915 | *-24.359* |
| **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | | **-71.980.301** | ***-52.354*** |
| | | | |
| Fíggjarútreiðslur | 5 | -3.644.056 | *-5.429* |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **-75.624.357** | ***-57.783*** |
| | | | |
| Skattur av ársúrsliti | 6 | 0 | *0* |
| **Ársúrslit** | | **-75.624.357** | ***-57.783*** |
| | | | |
| **Uppskot til býti av úrsliti:** | | | |
| Úrslit | | -75.624.357 | *-57.783* |
| Regulering til primo | | 8.277.747 | *0* |
| Flutt úrslit, primo | | 435.973.933 | *493.757* |
| **Til nýtslu** | | **368.627.323** | ***435.974*** |
| | | | |
| **Skotið verður upp at býta upphæddina soleiðis:** | | | |
| Flutt úrslit | | 368.627.323 | *435.974* |
| **Tilsamans** | | **368.627.323** | ***435.974*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| AKTIV | Nota | 31.12.11<br>DKK | *31.12.10<br>t. DKK* |
|---|---|---|---|
| Býtisvirkir | 7,18 | 370.427.792 | *373.313* |
| Bygningar og jarðarøkir | 7 | 37.186.411 | *38.211* |
| Rakstrargøgn | 7 | 6.384.252 | *7.464* |
| Íløguarbeiði í gerð | | 3.604.395 | *10.027* |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | **417.602.850** | ***429.015*** |
| | | | |
| Kapitalpartar í assosieraðum virkjum | 8 | 2.850.000 | *2.850* |
| **Fíggjarlig støðisogn tilsamans** | | **2.850.000** | ***2.850*** |
| **Støðisogn tilsamans** | | **420.452.850** | ***431.865*** |
| | | | |
| Tilfar | | 11.321.099 | *11.733* |
| **Vørugoymslur tilsamans** | | **11.321.099** | ***11.733*** |
| | | | |
| Vøru- og tænastuáogn | 9 | 42.340.297 | 36.372 |
| Onnur áogn | | 5.199.715 | 7.347 |
| Tíðaravmarkingar | | 4.002.434 | 4.097 |
| **Áogn tilsamans** | | **51.542.446** | ***47.816*** |
| **Tøkur peningur** | | **56.886.927** | ***42.143*** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **119.750.472** | ***101.692*** |
| **Aktiv tilsamans** | | **540.203.322** | ***533.557*** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| PASSIV | Nota | 31.12.11 DKK | *31.12.10 t.DKK* |
|---|---|---|---|
| Innskot | 10 | 4.139.875 | *4.140* |
| Flutt úrslit | 10 | 368.627.323 | *435.974* |
| **EGINOGN TILSAMANS** | | **372.767.198** | ***440.114*** |
| | | | |
| Avsetingar til eftirløn og líknandi skyldur | | 18.031.268 | *18.731* |
| Avsetingar til útsettan skatt | 11 | 0 | *0* |
| Aðrar avsetingar | | 1.001.129 | *0* |
| **Avsetingar tilsamans** | | **19.032.397** | ***18.731*** |
| | | | |
| Skuld til peningastovnar | 12 | 70.000.000 | *0* |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **70.000.000** | ***0*** |
| | | | |
| Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 12 | 0 | *0* |
| Skuld til peningastovnar | | 27.587.468 | *0* |
| Móttikin frammanundangjøld frá kundum | | 22.504.458 | *20.271* |
| Vøru- og tænastuskuld | | 24.724.978 | *48.484* |
| Partafelagsskattur | 13 | 0 | *0* |
| Onnur skuld | | 186.823 | *5.957* |
| Tíðaravmarkingar | | 3.400.000 | |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **78.403.727** | ***74.712*** |
| | | | |
| **SKULD TILSAMANS** | | **148.403.727** | ***74.712*** |
| **PASSIV TILSAMANS** | | **540.203.322** | ***533.557*** |
| | | | |
| Netúrslit á økir | 14 | | |
| Netyvirlit | 15 | | |
| Veðsetingar og aðrar skyldur | 16 | | |

# Peningastreymsuppgerð

| | Nota | *2011 DKK* |
|---|---|---|
| **Ársúrslit** | | **-75.624.357** |
| Reguleringar | 17 | 27.927.971 |
| Broyting í rakstrarpeningi: | | |
| Vørugoymslur | | 412.592 |
| Áogn | | -3.726.906 |
| Vøru- og tænastuskuld | | -23.759.303 |
| Onnur rakstrarskuld | | 164.399 |
| **Peningastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar** | | **-74.605.604** |
| | | |
| Goldin rentukostnaður og líknandi kostnaðir | | -3.644.056 |
| Javning primo | | 8.277.747 |
| **Peningastreymar frá rakstrinum** | | **-69.971.913** |
| | | |
| Keyp av materiellari støðisogn | | -19.294.571 |
| Broyting arbeiði í gerð | | 6.422.326 |
| **Peningastreymar frá íløgum** | | **-12.872.245** |
| | | |
| Lántøka | | 70.000.000 |
| Trekk uppá kassakreditt (max. 33 mió.) | | 27.587.468 |
| **Peningastreymar frá fígging** | | **97.587.468** |
| **Samlaðir peningastreymar í árinum** | | **14.743.310** |
| | | |
| Tøkur peningur við ársbyrjan | | 42.143.617 |
| **Tøkur peningur við árslok** | | **56.886.927** |
| | | |
| **Tøkur peningur við árslok verður útgreinaður soleiðis:** | | |
| Tøkur peningur | | 56.886.927 |
| **Tilsamans** | | **56.886.927** |

# Nýttur roknskaparháttur

## ALMENT

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri miðalstór feløg í flokki C.

Nýtti roknskapurin er óbroyttur í mun til undanfarna ár. Tó skal viðmerkjast, at framleiðsluvirksemið hevur í 2011 innroknað ein vinning vegna sølu av elmegi. Hetta ávirkar ársúrslitið og eginognina hjá netvirkseminum negativt.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanlíkningartøl fyri undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og máting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt sum tær verða forvunnar, herundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allar útreiðslur, herav av- og niðurskrivingar innroknaðar.

Í fíggjarstøðuni verða ognir innroknaðar, tá tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum til góðar, og virðið av ognini verður mett álítandi. Skuld verður innroknað í fíggjarstøðuna, tá hon er sannlík og kann mátast álítandi. Ogn og skuld verða innroknað fyri kostprís, og eftir hetta verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum lýst niðanfyri.

Við innrokning og máting verður atlit tikið at væntaðum tapum og váðum, ið vísa seg, áðrenn ársroknskapurin er liðugur, og sum kunnu sanna ella avsanna viðurskifti, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## GJALDOYRA

Ársroknskapurin er gjørdur í donskum krónum.

Flytingar í fremmandum gjaldoyra í árinum verða umroknaðar til kursin tann dagin, flytingin er gjørd. Kurstryggjaðar flytingar verða tó upptiknar til tann tryggjaða kursin. Áogn og skuld í fremmandum gjaldoyra verður umroknað til danskar krónur eftir kursinum við roknskaparlok, tó undantikið kurstryggjaðar upphæddir, sum verða upptiknar fyri tann tryggjaða kursin. Staðfestur og óstaðfestur kursvinningur ella -tap, verður tikið við í rakstrarroknskapinum undir fíggjarpostum.

## RAKSTRARROKNSKAPUR

### Nettoumsetningur

Inntøkur við sølu av vørum verða tiknar við í rakstrarroknskapinum, um veiting er farin fram, og keyparin hevur yvirtikið váðan í roknskaparárinum. Nettoumsetningurin verður uppgjørdur uttan MVG.

### Aðrir kostnaðir

Her er talan um kostnað í sambandi við keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum, umframt annan fyristitingarkostnað.

### Rakstrarbýti, framleiðsla og net

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni uppá 5% av ognunum hjá einstøku elverkunum er innroknaður. Roknaði vinningurin uppá 5% er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkreditlánsbrøvum, sum verður at samanbera við langfreistaðu íløgurnar hjá elverkunum.

Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum stendst av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi umframt kostnaðin fyri netábyrgd. Hesin kann sundurgreinast í kostnaðin fyri stýring av elnetinum, kostnaðin fyri veitingartrygd, rullandi mátt, tøkan mátt og kostnaðin fyri netábyrgd annars.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum, frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum. Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy er tann sami

sum fyri stýringina av elnetinum í meginøkinum.

Kostnaðurin fyri veitingartrygdina, rullandi máttin og tøka máttin er mettur til at verða 5% av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað avskrivingar hjá Sunds- og Vágsverkinum. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri netábyrgdina annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkum kring landið. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd, restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

## Avskrivingar

Avskriving av materiellari støðisogn verður løgd soleiðis til rættis, at fram fer ein skipað avskriving av støðisognini grundað á eina meting av brúkstíðini. Felagið hevur brúkt niðanfyri standandi brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Framleiðslu- og býtisvirkir | 35 - 50 ár | 0% |
| Bygningar | 50 ár | 0% |
| Rakstrargøgn og innbúgv | 3 - 5 ár | 0% |

Grundøki verða ikki avskrivað.

## Fíggjarpostar

Undir fíggjarpostar koma rentuinntøkur, rentuútreiðslur, staðfestur og óstaðfestur kursvinningur og -tap av virðisbrøvum, skuld og flyting í fremmandum gjaldoyra, amortisering av fíggjarligum aktivum og skyldum umframt rentuútreiðslur. Fíggjarinntøkur og fíggjarútreiðslur verða upptiknar við teimum upphæddum, sum hoyra roknskaparárinum til.

Vinningsbýti frá kapitalpørtum verður inntøkuført í roknskaparárinum, tá ið tað verður fráboðað.

## Skattur

Skattur í árinum, sum fevnir um aktuellan skatt fyri árið umframt broytingar í útsettum skatti, verður førdur í rakstrarroknskapin við tí parti, sum viðvíkur úrslitinum í árinum. Skattur viðvíkjandi møguligum bókingum beinleiðis á eginognina, verður bókaður á eginognina.

# FÍGGJARSTØÐA

## Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður upptikin í fíggjarstøðuni fyri kostprís frádrigið samanløgdu avskrivingarnar ella til endurvinningarvirðið, har hetta er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Kostprísur umfatar útveganarvirði og beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur, frá tí ognin varð útvegað, til ognin er klár at taka í nýtslu. Rentur av lánum, tikin til at fíggja framleiðsluna, verða ikki íroknað kostprísin.

Vinningur ella tap við avhending av materiellari støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum søluprísin frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virðið, tá ið støðisognin verður seld.

## Fíggjarlig støðisogn

Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða upptiknir í fíggjarstøðuni til kostprís, frádrigið møguligari niðurskriving.

## Niðurskriving av støðisognum

Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending, um tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Er ábending um virðisminkan, verður gjørd ein niðurskrivingarroynd av hvørji einstakari ogn og av hvørjum ognarbólki. Virðisminkaðu ognirnar verða niðurskrivaðar til endurvinningarvirðið, um hetta virðið er lægri enn roknskaparliga virðið.

Endurvinningarvirðið er tað hægra av nettosøluprísinum og kapitalvirðinum. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettoinntøkunum frá nýtsluni av ognunum.

## Vørugoymsla

Vørugoymsla verður virðisásett til kostprís eftir FIFO-háttinum ella nettosøluvirðinum, har hetta er lægri. Kostprísur fyri rávørur, hjálpitilfar og handilsvørur verður gjørdur upp sum keypsprísur umframt kostnað, sum er beinleiðis knýttur at keypinum.

Kostprísur fyri lidnar vørur og fyri vørur undir framleiðslu verður gjørdur upp sum virðið av beinleiðis brúktum tilfari og lønum. Rentur av lánum, tikin til at fíggja framleiðsluna, verða ikki íroknaðar kostprísin.

## Áogn

Áogn verður virðisásett við frádrátti av møguligum tapsvanda grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

Niðurskriving av møguligum tapi verður gjørd upp grundað á eina meting av hvørjum einstøkum skuldara.

## Tíðaravmarkingar

Tíðaravmarkingar, sum eru upptiknar

undir ogn, umfata goldnar útreiðslur, sum viðvíkja næsta roknskaparári.

## Avsetingar

Avsetingar til pensjónir verða upptiknar í fíggjarstøðuni við støði í útrokningum frá aktuari, um so er, at skyldurnar ikki eru tryggjaðar.

Aðrar avsetingar umfata væntaðar skyldur til garantiskyldur, arbeiði í gerð, umskipanir v.m., og verða upptiknar, tá ið felagið við roknskaparlok hevur eina slíka skyldu. Avsetingin verður upptikin eftir eini meting um dagsvirði av skylduni.

## Aktuellur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt viðvíkjandi undanfarnum árum.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virði av aktivum og skyldum. Útsettur skattur verður mátaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi á statusdegnum.
Útsett skattaaktiv, her undir skattavirðið av framfluttum skatligum hallum, verða mátað til tað virði, aktivið kann væntast at kunna realiserast fyri.

## Skuld

Langfreistað skuld verður upptikin í fíggjarstøðuni fyri kostprís, tá ið skuldin verður stovnað. Skuldin verður hereftir upptikin við tí virði, sum hon er niðurskrivað til. Kurstap og lánsútreiðslur verða býttar sundur yvir afturgjaldstíðina við støði í roknaðu effektivu rentuni tann dagin, skuldin varð stovnað.

Stuttfreistað skuld verður somuleiðis tikin við fyri tann kostprís, sum hon er niðurgoldin til. Hetta svarar vanliga eisini til áljóðandi virði.

## PENINGASTREYMSUPPGERÐ

Peningastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir peningastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broytingum í peningastreymum og tøkum peningi við ársbyrjan og enda.

Peningastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broytingum í rakstrarkapitali og goldnum skatti.

Peningastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevndu postum.

Peningastreymar frá fígging umfata fígging frá eigara, goldnum vinningsbýti til eigara og upptøku av láni og avdrátti av langfreistaðari skuld, umframt trekk uppá kassakredittar.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er kassapeningur og innistandandi í peningastovnum.

# Notur

## 1. NETTOUMSETNINGUR

| | | |
|---|---|---|
| kWh gjald o.a. | 296.388.398 | *261.845* |
| Fast gjald | 16.507.466 | *16.105* |
| Íbinding | 1.332.800 | *1.579* |
| Ómaksgjøld og áminning og onnur søla | 4.968.430 | *1.287* |
| **Tilsamans** | **319.197.094** | ***280.816*** |

## 2. OLJUÚTREIÐSLUR

| | | |
|---|---|---|
| Gassolja | 333.872 | *527* |
| **Tilsamans** | **333.872** | ***527*** |

## 3. TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR

| | | |
|---|---|---|
| Linjur | 7.668.873 | *9.624* |
| El og teknikk | 786.263 | *448* |
| Bygningar og lendi | 949.655 | *1.122* |
| Aðalfundur og nevnd | 366.841 | *126* |
| Kanning og ráðgeving | 4.689.090 | *3.424* |
| Kunningartøkni | 2.213.563 | *2.929* |
| Leiðsla og skrivstovuhald | 2.009.250 | *1.485* |
| Tap uppá skuldarar | 1.594.872 | *4.546* |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 293.718 | *78* |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 11.042.969 | *9.725* |
| **Tilsamans** | **31.615.094** | ***33.507*** |

### 4. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR

| | | |
|---|---|---|
| Lønir | 25.054.027 | *29.027* |
| Pensjónir | 4.264.967 | *3.789* |
| Almenn gjøld | 1.122.276 | *1.143* |
| **Tilsamans** | **30.441.270** | ***33.958*** |
| | | |
| Starvsfólk við høvuðsinntøku frá SEV | 86 | *89* |
| Miðaltal av starvsfólkum | 105 | *108* |

### 5. FÍGGJARÚTREIÐSLUR

| | | |
|---|---|---|
| Rentur, lán og bankaskuld v.m. | 3.644.056 | *5.429* |
| **Tilsamans** | **3.644.056** | ***5.429*** |

### 6. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI

| | | |
|---|---|---|
| Partafelagsskattur | 0 | *0* |
| Javning av útsettum skatti | 0 | *0* |
| **Tilsamans** | **0** | ***0*** |

### 7. MATERIELL STØÐISOGN

| Upphædd í DKK | Býtisvirkir | Bygningar og jarðarøkir | Rakstrargøgn |
|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 735.723.702 | 59.436.610 | 91.955.983 |
| Tilgongd í árinum, netto | 18.661.251 | 0 | 633.320 |
| Útveganarvirði ultimo | 754.384.953 | 59.436.610 | 92.589.303 |
| Av- og niðurskriving primo | -362.410.460 | -21.225.724 | -84.492.312 |
| Avskrivingar í árinum | -21.546.701 | -1.024.475 | -1.712.739 |
| Av- og niðurskriving ultimo | -383.957.161 | -22.250.199 | -86.205.051 |
| Roknskaparligt virði ultimo | 370.427.792 | 37.186.411 | 6.384.252 |

| 8. KAPITALPARTAR Í ASSOSIERAÐUM VIRKJUM | 31.12.11<br>DKK | *31.12.10*<br>*t.DKK* |
|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 2.850.000 | 2.850 |
| Útveganarvirði ultimo | 2.850.000 | 2.850 |
| Roknskaparligt virði ultimo | 2.850.000 | 2.850 |

*Assosierað virkir*

| Navn og heimstaður | Ognarpartur | Eginogn | Ársúrslit | Innroknað virði |
|---|---|---|---|---|
| P/F Fjarhitafelagið | 50% | 41.318.818 | 3.733.986 | 2.750.000 |
| P/F FDS | 20% | 375.044 | -137.026 | 100.000 |

Eingin roknskapur hjá Fjarhitafelagnum fyriliggur fyri 2011. Upplýstu tølini eru fyri 2010.

| 9. VØRU- OG TÆNASTUÁOGN | 31.12.11<br>DKK | 31.12.10<br>t.DKK |
|---|---|---|
| Elskuldarar | 38.097.039 | *34.294* |
| Aðrir skuldarar | 7.443.258 | *4.278* |
| Niðurskrivað uppá áogn | -3.200.000 | *-2.200* |
| **Tilsamans** | **42.340.297** | ***36.372*** |

## 10. EGINOGN

| Upphædd í DKK | Innskot | Flutt úrslit |
|---|---|---|
| *Eginognaruppgerð 01.01.10 - 31.12.10* | | |
| Salda pr. 31.12.09 | 4.139.875 | 493.756.620 |
| Javning til primo | 0 | 0 |
| Salda pr. 01.01.10 | 4.139.875 | 493.756.620 |
| Flutt úrslit | 0 | -57.782.687 |
| Salda pr. 31.12.10 | 4.139.875 | 435.973.933 |
| | | |
| *Eginognaruppgerð 01.01.11 - 31.12.11* | | |
| Salda pr. 31.12.10 | 4.139.875 | 435.973.933 |
| Regulering til primo | 0 | 8.277.747 |
| Flutt úrslit | 0 | -75.624.357 |
| Salda pr. 31.12.11 | 4.139.875 | 368.627.323 |

## 11. AVSETINGAR TIL ÚTSETTAN SKATT

| | 31.12.11 DKK | *31.12.10 t.DKK* |
|---|---|---|
| Avsetingar til útsettan skatt primo | 0 | *0* |
| Útsettur skattur í árinum | 0 | *0* |
| **Tilsamans** | **0** | ***0*** |

## 12. SKULD

| | Avdráttur fyrsta árið DKK | Restskuld eftir 5 ár DKK | Skuld tilsamans 31.12.11 DKK | Skuld tilsamans 31.12.10 DKK |
|---|---|---|---|---|
| Skuld til fíggjarstovnar | 0 | 67.964.606 | 70.000.000 | 0 |
| Tilsamans | **0** | **67.964.606** | **70.000.000** | **0** |

Lánið frá BankNordik uppá 70 mió. kr. er veitt til fígging av rakstri felagsins. Eftir avtalu við BankNordik verður afturgjaldstíðin 18 ár, og skal afturgjaldingin byrja í 2014.

| 13. SKYLDUGUR SKATTUR | 31.12.11 DKK | *31.12.10 t. DKK* |
|---|---|---|
| Skyldugur skattur primo | 0 | *0* |
| Goldin skattur í árinum | 0 | *0* |
| Skyldugur skattur frá undanfarnum árum | 0 | *0* |
| Roknaður felagsskattur fyri inniverandi ár | 0 | *0* |
| **Tilsamans** | **0** | ***0*** |

### 14. NETÚRSLIT Á ØKIR

| | Inntøkur | Olja | Tilfar | Lønir | Avskriving | Rentur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Koplingarstøðir | 36.477 | - | -642.425 | -633.406 | -2.691.096 | - | -3.930.450 |
| Býtisvirkir | 149.397 | -252.604 | -11.741.614 | -14.124.939 | -18.498.112 | - | -44.467.872 |
| Innlegging | 1.336.998 | - | -1.536.556 | -3.397.154 | -1.089.666 | - | -4.686.378 |
| Verkfrøði | 2.000 | - | -579.594 | -993.636 | 19.732 | - | 1.551.498 |
| Teknikk | - | - | -598.432 | 1.271.067 | -39.876 | - | 1.909.375 |
| Net uttan fyrisiting | **1.524.872** | **-252.604** | **-15.098.621** | **-20.420.202** | **-22.299.018** | **-** | **-56.545.573** |
| Fyrisiting | 13.168.979 | -81.268 | -16.516.474 | -10.021.068 | -1.984.899 | -3.644.056 | -19.078.786 |
| **Framleiðsluúrslit** | **14.693.851** | **-333.872** | **-31.615.095** | **-30.441.270** | **-24.283.917** | **-3.644.056** | **-75.624.359** |

## 15. NETYVIRLIT

| | Fugloy | Svínoy | Viðoy | Borðoy | Kunoy | Kallsoy | Eysturoy | Streymoy | Vágoy | Mykines | Nólsoy | Koltur | Hestoy | Sandoy | Skúvoy | Stóra Dímun | Suðuroy | Samtal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| TRAFOSTØÐIR; TAL | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 6kV Transformarastøðir | 1 | | | 2 | | | | | | | | | | | | | | 3 stk. |
| 10kV Transformarastøðir | | 1 | 6 | 32 | 4 | 7 | | 67 | | | 1 | | | 16 | | | 51 | 185 stk. |
| 20kV Transformarastøðir | | | | 2 | | | 111 | 77 | 30 | | | | 1 | | | | | 221 stk. |
| 60kV Transformarastøðir | | | | 1 | | | 2 | 4 | | | | | | | | | | 7 stk. |
| Samtal økir | 1 | 1 | 6 | 37 | 4 | 7 | 113 | 148 | 30 | | 1 | | 1 | 16 | | | 51 | 416 stk. |
| TRANSFORMARAR; TAL | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 6kV Transformarastøðir | 2 | | | 4 | | | | 1 | | | | | | | | | | 7 stk. |
| 10kV Transformarastøðir | | 1 | 6 | 38 | 4 | 7 | | 78 | | | 1 | | | 18 | | | 60 | 213 stk. |
| 20kV Transformarastøðir | | | | 4 | | | 129 | 104 | 35 | | | | 1 | 3 | | | 3 | 279 stk. |
| 60kV Transformarastøðir | | | | 1 | | | 6 | 12 | | | | | | | | | | 19 stk. |
| Samtal økir | 2 | 1 | 6 | 47 | 4 | 7 | 135 | 195 | 35 | | 1 | | 1 | 21 | | | 63 | 518 stk. |
| KAÐALSKÁP; TAL | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 0,4kV kaðalskáp | 13 | 25 | 79 | 502 | 30 | 30 | 1569 | 2316 | 511 | 7 | 38 | | 10 | 217 | 11 | | 850 | 6208 stk. |
| LINJUR OG KAÐALAR | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 60kV linja | | | | 1,02 | | | 37,57 | 42,99 | | | | | | | | | | 81,58 km |
| 60kV kaðal | | | | 0,09 | | | 13,68 | 14,81 | | | | | | | | | | 28,58 km |
| 20kV linja | | | | | | | 60,27 | 52,60 | 9,27 | | | | | | 12,03 | | 12,03 | 134,17 km |
| 20kV kaðal | | | | 11,46 | | | 151,54 | 143,74 | 39,52 | | | | 0,56 | 0,63 | | | 4,30 | 351,75 km |
| 10kV linja | | 3,23 | 16,31 | 13,84 | 9,37 | 6,44 | | 4,70 | | | | | | 12,14 | | | 44,24 | 110,27 km |
| 10kV kaðal | | 0,55 | 3,96 | 29,86 | 2,75 | 11,15 | | 68,92 | | | 1,47 | | | 34,10 | | | 59,20 | 211,96 km |
| 6kV linja | 2,19 | | | 7,17 | | | | | | | | | | | | | | 9,36 km |
| 6kV kaðal | 0,17 | | | 0,07 | | | | 0,16 | | | | | | | | | | 0,04 km |
| 0,4kV linja | | | | 0,32 | | | | 0,04 | | | | | | | | | 1,70 | 2,06 km |
| 0,4 kaðal | 1,10 | 4,22 | 11,34 | 60,78 | 2,99 | 2,97 | 197,19 | 285,19 | 57,37 | 0,55 | 3,38 | 0,38 | 0,90 | 28,96 | 0,88 | 0,05 | 95,07 | 753,32 km |
| MÁLARAR | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Fjarlisnir kWh málarar | 58 | 76 | 265 | 302 | 82 | 117 | 2673 | 3423 | 836 | 52 | 175 | 0 | 43 | 783 | 54 | 2 | 509 | 9450 stk. |
| Ikki fjarlisnir kWh málarar | 2 | 2 | 8 | 2208 | 2 | 4 | 1639 | 7091 | 735 | 1 | 5 | 2 | 0 | 31 | 0 | 2 | 2371 | 15103 stk. |
| kWh málarar tils./øki | 60 | 78 | 273 | 2510 | 84 | 121 | 5312 | 10514 | 1571 | 53 | 180 | 2 | 43 | 814 | 54 | 4 | 2880 | 24553 stk. |
| Vøkstur 2011 | -1 | 3 | -1 | 6 | 0 | 0 | 50 | 85 | 9 | 0 | 2 | 0 | 0 | 3 | 0 | 0 | 11 | 167 stk. |

## 16. Veðsetingar og aðrar skyldur

Ognir felagsins eru veðsettar fyri tilsamans 30 mió. kr.
Ongar aðrar skyldur hvíla á felagnum.

| | 2011 | *2010* |
|---|---|---|
| **17. REGULERINGAR** | **DKK** | ***t. DKK*** |
| Avskrivingar | 24.283.915 | *24.359* |
| Rentukostnaðir og líknandi kostnaðir | 3.644.056 | *5.429* |
| Tilsamans | 27.927.971 | *29.788* |

| **18. ÚTGREINING BÝTISVIRKIR** | | |
|---|---|---|
| Koplingarstøðir | 54.141.745 | *56.201* |
| Býtisvirkir | 316.286.047 | *317.112* |
| **Tilsamans** | **370.427.792** | ***373.313*** |

# Elkervið


Motororkuverk
Vatnorkuverk
60kV Koblingsstøð
Vindorka
60kV
20kV
10kV
6kV
Sjókaðal

Elfelagið SEV · Boks 319 · FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 34 68 00 · Fax +298 34 68 01
sev@sev.fo · www.sev.fo